# Filmsvinna í Føroyum –ein framtíðarmøguleiki

## *Álit*

um úrslitið av Filmssummarskúlanum 2006 (FISK 2006)
og greining av framtíðarmøguleikunum fyri filmsvinnu í
Føroyum.



Við útgangsstøði í skeiðnum Filmssummarskúli 2006
Tórshavn 10.-22. juli 2006.

Mikkjal N. Helmsdal.
Samvit 28. mai 2008.

## Samandráttur.

Filmsvinna, skilt sum framleiðsla av fiktión á filmi, hevur higartil verið lítil og eingin í Føroyum. Heldur ikki síðani sjónvarpið kom. Ein orsøk er, at miðilin er dýrur, og tí ongantíð hevur fingið fótafesti í tí frammanundan fíggjarliga avmarkaða mentanarpolitikkinum í Føroyum.

Men filmur er ikki bara ein kostnaðarmikil vinna. Hann er eisini ein miðil og ein samskiftisháttur, ið hevur stóran mentanarligan týdning og stóra ávirkan á menningina av samleikanum hjá nútíðar menniskjanum. Regionali vinnupolitikkurin, ið hevur ligið til grund fyri stóru menningini av regionalu filmsvinnuni í Norðurlondum seinastu árini, er bygdur á trúnna uppá, at staðbundin filmsframleiðsla styrkir tann regionala samleikan munandi, og harvið eisini ger ta einstøku regiónina meira kappingarføra í mun til at varðveita og draga til sín dugnaliga arbeiðsmegi og nýskapandi og vakstrarførar fyritøkur.

Við dagsins tøkni er filmur eisini ein vinnumøguleiki, sum kann skapa tænastur til marknaðir langt frá framleiðslustaðnum, um karmarnir og førleikarnir eru til staðar.

Seinastu árini hava vit sæð eina stóra menning innan filmsvinnuna í fleiri norðurlendskum regiónum. Tann áður so fast grógvna hugsanin, at filmsvinna einans kann virka, har sum stórir býir eru, er gjørd til skammar. Í Svøríki eru stórir filmsdeplar vaksnir fram í m.a. Trollhättan í Västra Götalandsregionen og í Umeå í Norðursvøríki, sum framleiða spælifilmar á hvørjum ári og draga nógv virksemi til sín. Hetta eru virksemi, sum eru byrjaði í tí smáa sum miðlaverkstaðir fyri umleið 15 árum síðani, og sum við fíggjarligum stuðli frá regionalum og kommunalum myndugleikum hava vaksið seg til stórar fyritøkur.

Í sama tíðarskeiði er Ísland vaksið nógv sum filmsland og hevur framleitt umleið 6 spælifilmar um árið í miðal seinastu 12 árini. Tað svarar lutfalsliga til, at vit í Føroyum høvdu framleitt ein spælifilm í fullari longd á hvørjum ári. Ísland hevur bæði ein aktivan mentanarpolitikk á filmsøkinum, við ríkisstuðli til framleiðslu av íslendskum filmum, og ein vinnupolitikk, sum eitt nú gevur skattafyrimunir og lutvísa fíggjarliga afturbering til útlendskar filmsframleiðarar, sum leggja framleiðsluvirksemi í Íslandi.

Við miðvísum málum og stigvísum íløgum ber til at skapa eina filmsvinnu í Føroyum, sum kann nøkta tann mentanarliga tørvin á livandi søgum á okkara egna máli í okkara egna umhvørvi, og sum samstundis kann skapa arbeiðspláss, gera Føroyar til eitt spennandi stað at búgva og arbeiða hjá skapandi og evnaríkum fólki og gera Føroyar meira sjónligar sum ferðamannaland og sum ein møguligur depil fyri kreativar og intellektuellar vinnur.

Men fyrst av øllum er neyðugt at menna førleikar, skapa karmar og at byrja við hesum á tí støði, har vit eru nú. Tí verður sum ein byrjan mælt til:

- At skapa grundarlag fyri einum vælútgjørdum miðlaverkstaði, ið kann veita ungdómi, filmsáhugaðum borgarum, skúlum og filmsframleiðarum undirvísing, skeið og tænastur.
- At gera føroyska films- og videomarknaðin meira dynamiskan við at hækka játtanina hjá Kringvarpinum munandi og samstundis
    - taka rættin til at senda lýsingar frá Kringvarpinum, soleiðis at grundarlag verður fyri at reka sjónvarp á handilsligum grundarlagi uttan fyri Kringvarpið og harvið skapa meira dynamikk og kapping í føroyskari framleiðslu av sjónvarpi,

    - áleggja kringvarpinum at nýta ein triðing av játtan síni til at keypa føroyskar sjónvarpsframleiðslur uttan fyri stovnin og harvið stimbra eitt breiðari framleiðsluumhvørvi innan films- og sjónvarpsvinnuna.
- At stovna ein filmsgrunn, sum kann veita fíggjarligan stuðul til framleiðslu av føroyskum stuttfilmum og so við og við eisini spælifilmum. Grunnurin eigur at fáa eina játtan upp á 1 millión kr. um árið, sum eigur at økjast stigvíst við virkseminum.

Við hesum trimum tiltøkunum ber til at fáa gongd á menningina komandi 3-4 árini, soleiðis at ein førleiki verður bygdur upp og eitt vinnuligt grundarlag lagt, sum ger tað møguligt at framleiða styttri føroyskar fiktiónsfilmar.

Næsta stigið er so at víðka um vinnuliga undirstøðukervið og skapa fyritreytir fyri framleiðslu av føroyskum spælifilmum og føroyskum sjónvarpsrøðum. Við vinnuligt undirstøðukervi meinast her framleiðslutøkni og framleiðsluhøll/filmstudio. Eitt væl útgjørt filmstudio í Føroyum, sum kundi verið skipað sum eitt sjálvstøðugt alment partafelag, kann veita føroyskum films- sjónvarpsframleiðarum (íroknað Kringvarpið) tænastur, umframt at veita tænastur til útlendskar filmsframleiðarar.

Samstundis eigur at vera hugsað um vinnupolitisk tiltøk, ið kunnu fremja filmsvinnuna, t.d. skattafyrimunir og afturberingarskipanir eftir írskari og íslendskari fyrimynd, við endurrindan av 14-20% av tí peningi, sum filmsframleiðarar leggja eftir seg í sambandi við filmsframleiðslu í Føroyum.

Menningin av eini føroyskari filmsvinnu eigur eisini at hava sum ambitión, at náa einum aktivitets- og dygdarstøði, sum ger at filmsvinnan kann nýtast at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland, sum íløguland og sum location- og filmsframleiðsluland.

Eitt ítøkiligt mál fyri føroyska filmsframleiðslu – ein visión- kann vera, at Føroyar sum filmstjóð um 10 ár skal hava rokkið lutfalsliga sama støði, sum íslendska filmsvinnan er á í dag: T.v.s. at í 2015 megnar føroyska filmsvinnan at framleiða minst 1 spælifilm umframt nakrar tímar av stuttfilmum og sjónvarpsfiktión um árið.

INNIHALDSYVIRLIT síða


**SAMANDRÁTTUR.** 1

**FORORÐ.** 5

**INNGANGUR** 7

**1. FILMSVINNA Í NORÐURLENDSKUM ÚTJAÐARAØKJUM.** 9

**1.1 GRANSKING Í FILMSVINNU Í NORÐURLENDSKUM ÚTJAÐARUM: SAMBANDIÐ MILLUM FILMSVINNU OG ØKISMENNING.** 9

**1.2 ÁSTØÐI OG GRUNDSJÓNARMIÐ Í GRANSKINGARVERKÆTLANINI UM FILMSVINNU OG ØKISMENNING Í NORÐURLONDUM.** 9

***1.2.1 Mentan og búskapur: Kreativar vinnur.*** 9

***1.2.2 Lýsing av filmsvinnuni í Norðurlondum.*** 10

**1.2.2.1 Arbeiðshættir og fyriskipan** 11

**1.2.2.2 Alheimsgerð og altjóðagerð av filmi** 12

**1.2.2.3 Filmspolitikkur – almennur studningur til filmsframleiðslu.** 14

**1.2.2.4 Filmur og økismenning – politikkur og úrslit.** 14

**1.2.2.4.1 Vinnulív og arbeiðsmøguleikar** 16

**1.2.2.4.2 Atdráttarmegi fyri fyritøkur og fólk** 16

**1.2.2.4.3 Samleiki og sosialur kapitalur.** 17

**1.2.2.5 Landafrøðiliga spjaðingin av filmsvinnuni.** 17

***1.2.3 Samanumtøka.*** 19

**1.3 ØKISMENNING INNAN FILMSVINNUNA Í SVØRÍKI.** 19

***1.3.1 Film i Väst – eitt menningartiltak í Västra Götaland.*** 20

***Lyklafaktorar í samanrenningini millum film og økismenning í Västra Götalandsregionen.*** 22

***1.3.2 Filmsvinnan í Norrbotten – Filmpool Nord.*** 23

***Menningin av einum lands- og altjóða perspektivi.*** 24

***1.3.3 Samanumtøka um regionala filmsvinnu í Vestur- og Norðursvøríki.*** 26

**1.4 MENNING AV FILMSVINNU Í ÚTJAÐARUNUM Í NOREGI.** 27

**1.5 MENNING AV REGIONALARI FILMSVINNU Í DANMARK.** 28

**1.6 MENNING AV FILMSVINNUNI Í ÍSLANDI.** 29

**2. STØÐAN Í FØROYUM, SUM ER.** 31

**2.1 SØGULIGT AFTURLIT.** 31

***2.1.1 Nakrar royndir innan dokumentar- og spælifilmar: 1950-1980.*** 31

***2.1.2 Sjónvarpið og filmsframleiðsla.*** 32

***2.1.3 Útlendskar filmsframleiðslur í Føroyum*** 32

***2.1.4 Føroyskir spælifilmar.*** 33

**2.2 FILMS- OG VIDEOFRAMLEIÐSLA Í DAG.** 33

***2.2.1 Sjónvarp*** 33

***2.2.2 Reklamur.*** 34

***2.2.3 Annað*** 34

**2.3 FØROYINGAR Í FILMSVINNU UTTANLANDS.** 35

**2.4 UNDIRVÍSING Í FILMI Í FØROYUM.** 35

**3. FISK 2006: LÝSING OG EFTIRMETING.** 36

**3.1 MÁLSETING OG FYRIREIKINGAR.** 36

***3.1.1 Lýsing av konseptinum.*** 37

***3.1.2 Lærarar.*** 38

***3.1.3 Luttakarar.*** 38

***3.1.4 Stuðlar og áhugapartar.*** 38

**3.2 SKEIÐIÐ.** 39

***3.2.1 Undirvísingin og skeiðsgongdin.*** 39

1.-4. dagur: 39

5. dagur: 40

6.-8. dagur: 40

9.-10. dagur: 40

11.-12. dagur: 40
13. dagur. 40
*3.2.2 Filmarnir.* 40
*3.2.3 Eftirmetingin hjá næmingunum.* 41
*3.2.4 Eftirmetingin hjá lærarunum.* 41
**3.2.4.1 Metingin hjá lærarunum av møguleikunum fyri filmsvinnu í Føroyum.** 42
**3.2.4.1.1. Fyrimunir og møguleikar.** 42
**3.2.4.1.2 Vansar og avbjóðingar.** 43
**3.3 NIÐURSTØÐUR VIÐVÍKJANDI FISK 2006.** 43

**4. FILMSPOLITIKKUR SUM VINNUPOLITIKKUR: ÍRLAND OG ÍSLAND.** 45

**4.1 ÍRLAND SUM DØMI.** 45
*4.1.1 Vinnupolitisk tiltøk til fremjan av írskari filmsvinnu.* 45
*4.1.2 Fyritreytir fyri menning av filmsvinnuni í Írlandi.* 46
**4.2 ÍSLAND SUM DØMI.** 47
*4.2.1 Filmspolitisk tiltøk í Íslandi:* 47
*4.2.2 Fyritreytir fyri menningini av filmsvinnuni í Íslandi.* 48

**5. FRAMTÍÐARMØGULEIKAR FYRI FILMSVINNU Í FØROYUM.** 50

**5.1 MENTANARLIGUR TÝDNINGUR HJÁ EINI FILMSVINNU.** 50
**5.2 VINNULIGUR TÝDNINGUR AV FILMSVINNU** 50
**5.3 FILMSVINNA OG ÁRIN HENNARA Á SAMLEIKA OG ATDRÁTTARMEGI HENNARA MÓTVEGIS VINNULÍVI OG ARBEIÐSMEGI** 51
*5.3.1. Yvirskipaðar grundgevingar fyri einum filmsvinnupolitikki í Føroyum.* 51
**5.4 FILMSUNDIRVÍSING OG TÝDNINGUR HENNARA FYRI MENNING AV FILMSVINNU** 52
**5.5 FØROYAR SUM FILMSVINNULAND: STYRKIR OG VEIKLEIKAR, MØGULEIKAR OG FORÐINGAR.** 53
**5.6 STRATEGISKIR MØGULEIKAR FYRI MENNING AV FØROYSKARI FILMSVINNU** 53
*5.6.1 Menningarmøguleikar: Útbúgving og framleiðsla.* 53
*5.6.2 Útbygging av fiktión og dokumentari í sjónvarpinum.* 54
*5.6.3 Netverk og møtistaðir.* 54
*5.6.4 Tónleikavinnan og videoframleiðsla.* 54
*5.6.5 Reklamuvinnan.* 54
*5.6.6 Samstarv við íslendska filmsvinnu.* 55
*5.6.7 Samstarv við Norðurlond annars.* 55
*5.6.8 Fígging* 55
**5.7 EIN VISIÓN FYRI MENNING AV EINI FØROYSKARI FILMSVINNU.** 56

**6. SAMANUMTØKA OG TILMÆLI.** 57

**KELDULISTI:** 59

**Fororð.**

Er tað gjørligt at fáa eina filmsvinnu á føtur í Føroyum? Er nøkur meining í at royna at fara undir slíka vinnu í Føroyum?

Vit seta oftast filmsvinnuna í samband við altjóða undirhaldsídnað og risafyritøkur í USA, har spælifilmarnir kosta 100 milliónir og meira at framleiða. Slíkar verkætlanir liggja fjart frá okkara hugaheimi.

Mentanin fær ein alt størri leiklut í samfelagsmenningini í heiminum í dag. Hetta er ikki minst galdandi fyri filmsídnaðin, sum er bæði mentan og ídnaður, list og undirhald. Filmsvinnan er tann berandi veitarin av innihaldi til teir audiovisuellu miðlarnar og ein kreativ vinna við stórum menningarmøguleikum. Åse Kleveland, fyrrverandi norskur mentamálaráðharri og fráfarandi stjóri í Svenska Filminstitutet, førir fram, at filmsvinnan í nógvum pørtum av heiminum er skilgreinað (definerað) sum ein týdningarmikil drívmegi í arbeiðinum at menna øki uttan fyri stórbýirnar, og at hetta hevur ført til eina økta filmsframleiðslu, sum endurspeglarspeglar eitt størri margfeldi av røddum, landsløgum og søgum.[1] Hon sigur víðari, at gongdin í Norðurlondum er eitt lýsandi dømi um júst hetta. Filmsframleiðslan í útjaðarunum hevur endurnýggjað og ríkað tað samlaðu filmsframleiðsluna í teimum stóru Norðurlondunum, samstundis sum hon hevur verið ein drívmegi at skapa økt norðulendskt samstarv innan filmsvinnuna. Og nógvir landslutir í Norðurlondum eru í byrjanini av sínum filmssatsingum.[2]

Menning av filmsvinnu í útjaðarum er tí eitt rák, sum er frammi í tíðini í grannalondum okkara, og tað ber tí til at hyggja at og læra av teimum tiltøkum, sum verða framd har.

Livandi myndin er ein miðil, sum fær alt størri týdning í samskiftinum í nútíðar altjóðagjørda samfelagnum. Og tað hevur alstóran týdning fyri eina og hvørja mentan, sum vil vera partur av og mennast og yvirliva í altjóðagerðini at finna sítt mál og sín samleika í hesum samskiftinum. Tað er týdningarmikið hjá nútíðarmenniskjanum at síggja og hoyra søgur fortaldar á sínum egna máli og við støði í sínum egna umhvørvi og sínum egnu lívsroyndum og røtrum.

Hetta hava grannalond okkara sannað, sum hóast nógv størri enn vit eisini eru dvørgar í filmshøpi, tá ið tey verða samanborin við risastórar kappingarneytar sum Ongland, Canada og USA.

Enn er tó sera avmarkað í hvønn mun føroyskar røddir og føroyskar søgur hava verið at hoyrt og sæð gjøgnum filmsmiðilin. Filmur, t.v.s. fiktión frásøgd í livandi myndum, hevur onga raðfesting havt í føroyskum mentanarpolitikki, og ei heldur hjá almenna føroyska sjónvarpinum, har framleiðslan av fiktión hevur verið lítil og eingin og seinastu árini einans á barnaøkinum.

Higartil er bert ein spælifilmur framleiddur við føroyskari fígging burturav – Atlantic Rhapsody, sum var frumsýndur í 1989. Síðani tá hevur verið hildið, at filmurin sum miðil er ov kostnaðarmikil hjá okkum at hugsa um. Árliga játtanin hjá Mentanargrunni Landsins røkkur sera stutt, um grunnurin skal stuðla filmsframleiðslu, og um grunnurin so lat alla sína játtan til eina filmsverkætlan, hevði tað munað lítið í samlaða kostnaðinum fyri at framleiða ein spælifilm.

[1] Dahlström et al, s. 5.
[2] Sama.

Men hvussu skulu vit so yvirhøvur orka at hugsa um filmsvinnu í Føroyum, tá vit vita at pengarnir til aðra listargreinir frammanundan eru smáir?

Hyggja vit eftir Norðurlondum, so eru fleiri landspartar, sum í 90-árunum byrjaðu eina miðvísa og stigvísa uppbygging av filmsvinnu, og sum eftir 10-15 árum hava megnað at bygt upp filmsvinnuumhvørvi, ið framleiða upp í fleiri spælifilmar og sjónvarpsrøðir um árið. Tá eitt vinnuligt undirstøðukervi til filmsframleiðslu er bygt upp, fylgir nógv avleitt virksemi aftaná, miðlafyritøkur verða styrktar og filmsframleiðarar uttanífrá koma inn og nýta tær tænasturnar, sum eru uppbygdar. Soleiðis er filmsvinnan vorðin ein virðismikil partur av menningini í hesum landspørtum, sum skapar nýggj arbeiðspláss og skapar stoltleika um mentanina og vinnulívið á staðnum.

Grannar okkara fyri norðan, Ísland, fóru undir at menna veruliga filmsframleiðslu umleið 1990. Samstundis hava íslendingar eisini lagt dent á at fáa útlendskar filmsframleiðarar til Íslands at nýta umhvørvi og tænastur – filmar sum *James Bond – Die Another Day*, *Batman Begins* og *The Days of our Fathers* (krígsfilmur hjá Clint Easwood) eru lutvíst innspældir í Íslandi. Í tíðarskeiðnum 1995-2003 vóru 39 íslendskir spælifilmar framleiddir,[3] og tað er í miðal 6,5 filmar um árið. Samanborið við fólkatalið svarar tað til, at vit í Føroyum høvdu framleitt ein spælifilm í fullari longd um árið.

Filmsframleiðsla er bæði mentan og vinna. Filmsvinnan er ein kreativ vinnugrein, sum byggir á skapan, kreativ evni og gagnnýtslu av praktiskum førleikum og sosialum kapitali.

Skulu vit orða eina visión fyri føroyskan film, kundi tað verið eitt hóskiligt mentanarligt mál at tikið støði í eini samanbering við okkara nærmastu grannar, Ísland, sum helst er tað landið vit best kunnu samanbera okkum við hvat viðvíkur mentan, máli, fólkatali og fyritreytum fyri at skapa eina filmsvinnu. Eitt mál at arbeiða framímóti kann vera, at røkka eini filmsframleiðslu, sum er lutfalsliga á hædd við ta íslendsku, í 2015. Hetta álitið vil geva nøkur boð upp á ítøkilig stig til tess at røkka hesi visiónini.

[3] Skúladóttir 2005, s. 183.

**Inngangur.**

Á heysti 2005 tóku táverandi Menningarstovan saman við Jan Berg Jørgensen og Jákupi Veyhe frá filmsverkstaðnum Klippfisk stig til at skipa eitt norðurlendskt filmssummarskeið í Føroyum, sum skuldi føra føroyskar næmingar saman við dugnaligum professionellum filmsfólkum úr Norðurlondum. Samstundis skuldi høvið nýtast at meta um møguleikarnar at menna filmslist sum vinnugrein í Føroyum. Í hesum sambandi avgjørdi stýribólkurin fyri verkætlanina, at gerast skuldi ein neyv eftirmeting av summarskúlanum, og at skrivast skuldi eitt álit, sum metti um fyritreytirnar og møguleikarnar fyri at menna eina føroyska filmsvinnu.

Filmssummarskúlin fekk sum verkætlan navnið FISK 2006, og ein fylgibólkur, mannaður við umboðum fyri myndugleikar og feløg við mentanarpolitiskum og/ella vinnuligum áhugamálum í mun til filmsvinnu í Føroyum, var skipaður at fylgja fyrireikingararbeiðinum. Menningarstovan søkti stuðul frá Vinnuframagrunninum til endamálið á heysti 2005 og í desember byrjaði Mikkjal Helmsdal at starvast sum parttíðarsettur verkætlanarleiðari.

Verkætlanarleiðarin orðaði fylgjandi uppskot til arbeiðssetning fyri álitið um filmsvinnu, sum stýribólkurin samtykti:

Filmsvinna í Føroyum.

Arbeiðssetningur fyri álit í sambandi við verkætlanina "Filmssummarskúli í Føroyum 2006".

Álitið skal eftirmeta úrslitið av summarskeiðnum í filmsgerð 10.-23. juli 2006 við atliti til møguleikarnar fyri framtíðar menning av filmsvinnu[4] í Føroyum. Herundir:

a) Lýsa mentanarliga og vinnuliga týdningin av eini filmsvinnu í føroyskum høpi.
b) Lýsa møguleikarnar, sum liggja í filmsvinnuni. Herundir vinnuligar, listarligar og yrkisligar menningarmøguleikar fyri eina føroyska filmsvinnu.
c) Lýsa filmsvinnuna og ymisku og greinar hennara innan reklamu, tilfar til alnótina og nýggjar miðlar, spælifilm og sjónvarp. Útflutningsmøguleikar fyri føroyska filmsvinnu. Veikir liðir og møguleikar.
d) Meta um fyritreytirnar fyri menning av filmsvinnu í Føroyum, herundir samanbera við onnur lond, t.d. Ísland og Írland, ið bæði hava eina filmsvinnu, sum í altjóða høpi er nógv størri enn støddin á londunum átti at borið boð um.
e) Stig, ið tað almenna kann taka, og loysnir, ið tað almenna kann veita, fyri at fremja møguleikarnar at skapa eina filmsvinnu í Føroyum.

Í lýsingini av omanfyri standandi skal álitið kortleggja:

- Verandi útbúgvingarvirksemi á filmsøkinum, verandi framleiðslu innan allar greinar av filmsframleiðslu og verandi aktørar innan hesa framleiðslu.
- Stuðuls- og samstarvsmøguleikar við grunnar, stovnar og feløg uttanlands.
- Nøgd og dygd í føroyskari filmsframleiðslu higartil.

Tá eingin filmsvinna sum so enn finst í Føroyum, er neyðugt at byggja ein greining av møguleikunum fyri eini slíkari vinnu á viðkomandi royndir, sum eru gjørdar aðrastaðni. Tí kemur brot d) í arbeiðssetninginum at fylla nógv í samlaðu framsetingini, og tyngdin í samanberingini kemur at liggja á Norðurlondum og Íslandi.

[4] Tá tað í hesum arbeiðssetningi verður røtt um filmsvinnu, so meinast við alla framleiðslu, sum inniber upptøkur og samanseting av livandi myndum uttan mun til, hvør miðil, ið verður nýttur til framleiðslu og útbreiðslu av hesum myndum. Sum menningin er í løtuni merkir hetta í nógv størstan mun arbeiði við digitalum myndamiðlum.

Gongdin í framsetingini er hendan: Álitið byrjar við at hyggja at úrslitunum av norðurlendsku granskingarverktætlanini *Film och regional utveckling i Norden*, sum norðurlendski granskingarstovnurin fyri økismenning Nordregio framdi saman við Svenska Filminstitutet, og sum kom út í bók í 2005, og sum lýsir, hvussu filmsvinnan hevur ment seg í norðurlendskum útjaðarum seinastu 10-15 árini. Í øðrum parti verður støðan í Føroyum viðvíkjandi filmsvinnu lýst. Triði partur er ein lýsing og eftirmeting av Filmssummarskúlanum 2006. Í fjórða parti verður hugt at filmspolitikki sum vinnupolitikki, har Írland og Ísland verða tikin sum dømi. Í fimta parti verður so ein meting gjørd av framtíðarmøguleikunum fyri filmsvinnu í Føroyum, grundað á úrslitini av undanfarnu greiningunum. Endað verður við samanumtøku, niðurstøðum og tilmælum um, hvørji stig, ið kunnu takast fyri at skapa menningarumstøður fyri filmi sum vinnu í Føroyum.

## 1. Filmsvinna í norðurlendskum útjaðaraøkjum.

Í Norðurlondum hevur í nógv ár verið eitt kjak um, hvussu tær kreativu vinnurnar kunnu virka sum drívmegi fyri vinnuligari menning og búskaparvøkstri í útjaðaraøkjum.

Tey seinastu 10-15 árini hava fleiri landslutir (sonevndar regiónir) í Norðurlondum sett sær fyri at menna filmsvinnu í økjum sínum. Í fleiri av hesum landslutum er eydnast at fáa eina umfatandi vinnu at virka, og í t.d. Vestursvøríki, har Götalandsregionen hevur bygt upp og stuðlað felagnum Film i Väst, eru yvir 100 spælifilmar heilt ella lutvíst framleiddir síðani 1992, í Íslandi eru úti við 50 spælifilmar framleiddir í sama tíðarskeiði umframt, at fleiri útlendskir filmar lutvíst eru upptiknir har, og í Danmark hava tiltøk sum FilmFyn, Århus Filmby og Den Vestdanske Filmpulje við kommunalum stuðli út frá ymsum strategium sett gongd í filmsframleiðslur uttan fyri høvuðsstaðarøkið.

### 1.1 Gransking í filmsvinnu í norðurlendskum útjaðarum: Sambandið millum filmsvinnu og økismenning.

Í 1995 gjøgnumførdu Svenska Filminstitutet og Nordregio, sum er granskingarstovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, eina verkætlan, sum skuldi lýsa og greina sambandið millum filmsframleiðslu og økismenning í Norðurlondum. Úrslitið var almannakunngjørt í frágreiðingini *Film och regional utveckling i Norden*, sum kom út í oktober 2005, og inniheldur greinar um film og økismenning í Danmark, Noreg, Svøríki, Finlandi og Íslandi.[5] Meginásin í frágreiðingini er at lýsa, hvussu politikkur og almenn fígging verða nýtt at menna filmsvinnu í útjaðarunum, og í hvønn mun hesi náa setta málinum um at viðvirka til økismenning.

### 1.2 Ástøði og grundsjónarmið í granskingarverkætlanini um filmsvinnu og økismenning í Norðurlondum.

Frágreiðingin leggur dent á film sum bæði mentan og vinnu og at skilgreina (definera) filmsvinnuna sum eina kreativa vinnu. Hon lýsir bygnaðin í filmsvinnuni og lýsir tilgongdina í filmsframleiðsluni "frá kornaksinum til tað lidna breyðið" fyri harvið eisini at kunna greiða frá, hvussu filmsvinnan lokaliserar seg og á hvønn hátt, ið hon er landafrøðiliga staðbundin.

Fyri at lýsa hvussu filmframleiðslan ávirkar økismenning í Norðurlondum gjøgnumgongur frágreiðingin, hvussu filmsvinnan ávirkar trý ymisk men lutvíst umskarandi øki: *Vinnulív og arbeiðspláss*, *atdráttarmegi og samleika* og *sosialan kapital*. Frágreiðingin viðger harumframt landafrøðiligu eyðkennini fyri filmsvinnuna og bjóðar tí ráðandi sjónamiðnum av, at filmsvinna einans kann virka í stórbýarumhvørvum.

#### 1.2.1 Mentan og búskapur: Kreativar vinnur.

Til ber at siga, at alt búskaparligt virksemi er ávirkað av mentanini, eftirsum búskapurin ikki er leysur av metingum og normum. Tá vit siga soleiðis, tala vit út frá einum breiðum mentanarligum hugtaki. Tala vit um mentan sum list og skapandi virksemi, so hava vørur og tænastur í dag eitt størri mentanarligt innihald og eitt størri symbolvirði enn áður. Onglendingurin C. Leadbeater hevur í bókini *Living on Thin Air. The New Economy* (1999) á sera myndarligan hátt lýst hetta vektloysið í modernaða búskapinum. Ledbeater sigur, at fleiri og fleiri fáa sítt livibreyð frá "tí tey

[5] Granskararnir, sum skrivað hava um ymsu londini eru John Jørgensen, Danmark, Marta G. Skúladóttir og Hólmfriður Bjarnadóttir, Ísland, Greta Rusten, Noreg, Kaisa Lähteemäki-Smith, Finnland, Margareta Dahlström, Brita Hermelin og Elisabeth Wengström, Svøríki.

hava í høvdinum"- kreativiteti, talenti og hugskotum, og ikki ítøkiligum framleiðsluvørum. Hetta er ein gongd, ið førir mentan og búskap tættari saman.[6]

Týdningurin av mentanarligum og kreativum virksemi fyri økismenning og búskaparvøkstur er lutvíst beinleiðis avleiddur av sjálvum virkseminum. Yvirhøvur hevur talið av fólki í Vesturheiminum, sum starvast í mentanarligum og kreativum vinnum, verið vaksandi. Og lutvíst hevur mentanarligt virksemi óbeinleiðis ávirkan, sum er avleidd av t.d. førleikunum hjá kreativum yrkisfólkum innan sniðgeving ella marknaðarføring, sum kunnu vera við at økja virðið á tænastum og vørum í øðrum vinnugreinum. "Ein onnur positiv óbeinleiðis ávirkan er, at eitt skapandi og mentanarligt umhvørvi hevur eitt atdráttarvirði (en attraktionsværdi), sum dregur annað virksemi, aðrar fyritøkur og onnur menniskju til plássið."[7]

Bretska Mentanar-, Miðla- og Ítróttarmálaráðið skilgreinar kreativar vinnur soleiðis á heimasíðu síni: "Kreativar vinnur eru tær vinnurnar, sum byggja á kreativitet, evni og førleikar hjá einstaklingum, og sum bera møguleikar í sær at skapa vælferð og arbeiðspláss við at menna og gagnnýta óítøkiligan ognarrætt (intellectual property)"[8]

Høvundarnar aftan fyri *Film och regional utveckling i Norden* lúta seg at teirri skilgreiningi (definitiónini), at kreativar vinnur umfata tey virksemi, ið sameina mentan og vinnu. Filmsvinnan er ein slík vinna, og hon er harumframt partur av tí, ið verður rópt mentanarligar vinnur, og av upplivingarídnaðinum.[9]

Stern, Svensson og Toll taka soleiðis saman um filmsframleiðslu sum kreativa vinnu: "Langfilmsframleiðsla framleiðir eina mentanarvøru, sum skapar eitt upplivingarvirði hjá áskoðarafjøld síni, samstundis sum hon skapar arbeiðspláss og eftirspurning hjá undirveitarum og inntøkur til fyritøkurnar í vinnuni. Hon er eyðkend av einari framkomnari framleiðslutøkni, sum verður parað við listarligari formgeving. Stórt menniskjaligt og búskaparligt tilfeingi verður umsett í einum sera avmarkaðum tíðarskeiði, meðan innspælingin fer fram."[10]

### 1.2.2 Lýsing av filmsvinnuni í Norðurlondum.

Við filmsvinnu verður ofta í norðurlendskum høpi sipað til framleiðslu av langfilmum, men slík framleiðsla er í veruleikanum ofta ikki gjørlig at skilja sundur frá framleiðslu av stutt- og dokumentarfilmum, sjónvarpstilfari og lýsingarfilmum. Tey, ið framleiða langfilmar, hava t.d. ofta byrjað starvsleið sína við at gera stuttfilmar. Filmur sum vinnugrein verður ofta skilgreinað sum "framleiðsla av filmum, ið eru egnaðir at vísa í biografi, sjónvarpi ella á dvd-fløgu". Harumframt kemur so framleiðsla av videoløgum og lýsingarfilmum.

Tær einstøku fyritøkurnar í filmsvinnuni arbeiða oftast við eini ávísari sergrein innan vinnuna, og nógvir persónar í filmsvinnuni eru free-lansarar og starvast eftir sáttmála í stutt tíðarskeið í senn. Tí er neyðugt at vera virkin og sjónligur, og nýggj arbeiðstoymi verða uppbygd við støði í fyrri royndum og oftast við fólkum, ið frammanundan kenna hvønn annan.[11]

---

[6] Leadbeater 1999. Endurgivin í Dahlström et al (2007).
[7] Marcussen, Ann, og King, David (2003), endurgivið úr Dahlström et al (2005), s. 16.
8 DCMS, Department for Culture, Media and Sports (2007). http://www.culture.gov.uk/what_we_do/Creative_industries/
[9] Dahlström et al (2007), s. 16.
[10] Stern, Svensson og Toll (2003), s. 8.
[11] Dahlström et al (2007), s. 17.

Filmsvinnan hevur vanliga verið tengd at stórbýarumhvørvum, tí har eru kafféir, matstovur og stórir filmsfestivalar, ið skapa møtiplássini, har hugskot verða til og samstørv byrja, og har búgva flestu av teimum fólkunum, ið hava tær yrkisútbúgvingarnar, sum filmsvinnan hevur brúk fyri. Eisini hevur tað týdning, at flestu statsligir films- og listarskúlar í Norðurlondum liggja í høvuðsstaðarøkjunum. Í Noreg hevur staturin roynt at venda hesi miðsavningini við at leggja sínar týdningarmestu filmsútbúgvingar uttan fyri høvuðsstaðarøkið.[12]

Filmsstevnur og –ráðstevnur hava ein stóran leiklut í norðurlendskari filmsvinnu, tá tað snýr seg um at skapa sambond og netverk, ið kunnu føra til framleiðslusamstarv ella samstarv um fígging av filmum. Teir hava somuleiðis týdning fyri at fylgja við í tí, sum hendir á marknaðinum, og teimum hugskotum, sum røra seg í vinnuni. Eitt dømi um ein møtistað í Norðurlondum er árliga filmsstevnan í Haugesund, sum hevur skapað sær ein profil, sum festivalurin, ið vísir nýggjar norðurlendskar filmar. Á hesi stevnuni verður skipað fyri tiltakinum New Nordic Films, sum er ein sølumarknaður fyri norðurlendskar filmar.[13] Ein annar týdningarmikil marknaður fyri norðurlendskar filmar er Nordic Film Market, sum er partur av árligu filmsstevnuni í Göteborg og vendir sær til framleiðarar, sjónvarpsstøðir, filmsseljarar/filmsútbreiðarar og filmsstevnur kring allan heimin.[14]

Tað er nærliggjandi at lýsa filmsvinnuna og mátan, ið hon skipar seg, við *cluster*-hugtakinum hjá amerikanska búskaparfrøðinginum Michael Porter. " Eitt *cluster* (=tyssi, bólkur) er ein bólkur ella hópur av landafrøðiliga miðsavnaðum og samantengdum fyritøkum innan fyri eitt serligt vinnuøki, ið eru samanbundnar av, at tær líkjast og stuðla upp undir hvørja aðra.".[15] Eitt *cluster* kann landafrøðiliga fevna um ein ávísan bý, eitt land ella eitt øki/región, har mark millum fleiri lond møtast.

#### 1.2.2.1 Arbeiðshættir og fyriskipan

Filmsframleiðsla kann best lýsast sum ein hópur av ymiskum men samanknýttum og samanhoyrandi tilgongdum. Hesar tilgongdirnar kunnu bólkast í fýra liðir: Forframleiðsla, framleiðsla, eftirframleiðsla og útbreiðsla. (Á donskum: Forproduktion, produktion, postproduktion og distribution.) Hvør liður hevur sínar fyritreytir fyri, hvar virksemið kann liggja landafrøðiliga. Summir partar av filmsvinnuni liggja sera støðugir, aðrir partar flyta seg alt eftir tekniskum møguleikum og fíggingarmøguleikum. Við nýggju talgildu tøknini eru møguleikarnir bæði størri og fleiri fyri landafrøðiligari spjaðing av teimum ymsum framleiðsluliðunum.[16] At tað við nýggjari filmstøkni ber til at skapa, broyta ella tillaga umhvørvi eftir tørvi, ger at filmsvinnan fær verið meiri smidlig í valinum av plássum, ið verða víst á løriftinum.[17]

Forframleiðslan, s.s. menning av handritum, tilrættalegging og trygging av løgfrøðiligum og fíggjarligum grundarlagi, er ofta knýtt at rótfestum filmsumhvørvum. Á sama hátt er eftirframleiðslan, sum er klipping, ljóðeftirarbeiði, serligar effektir og liðuggerð av filminum til endaliga margfalding, ofta knýtt at nøkrum fáum serútgjørdum plássum, ofta í teimum størstu filmbýunum. Hetta er serfrøðingaarbeiði, ið er treytað av dýrari útgerð. Í Norðurlondum eru nøkur

---

[12] Útbúgvingarnar liggja í Lillehammer, Volda og Stavanger. (Norsk Filmsinstitutt: http://www.nfi.no/nyenorske/kart.html )
[13] Filmfestivalen i Haugesund (2006).
[14] Göteborg International Film Festival (2007): http://www.filmfestival.org/filmfestival/page/sv/nordicevent/nordicevent
[15] Porter (2003), s. 562.
[16] Dahlström et al (2007), s. 19.
[17] Sama.

serliga sterk umhvørvi innan ávís øki, t.d. er Stokkhólmur miðstøð fyri digitala eftirviðgerð, tað mesta av framkalling og margfaldan av biograffilmum til norðurlendska marknaðin fer fram í Oslo, meðan Keypmannahavn er sterkastur í Norðurlondum innan 3D grafikk og *special effects*.[18]

Útbreiðslan (distributiónin) er í stóran mun miðsavnað til stórar býir, tí fyritøkurnar innan hendan partin av vinnuni fyri tað mesta liggja har. Útbreiðslufyritøkurnar velja í stóran mun heimstað sín eftir eigarabygnaðinum innan biografvinnuna.

Sjálv framleiðslan, innspælingin, er tann parturin av leiðini hjá filminum frá korni til liðugt breyð, ið krevur mest tilfeingi. Umleið 90% av teimum fólkunum, hvørs nøvn, ið vit lesa í rullutekstinum, arbeiða í hesum partinum av tilgongdini. Innspælingin tekur oftast 6-12 vikur (tá vit tosa um spælifilmar og sjónvarpsfilmar) og her verður eitt kostnaðarmikið undirstøðukervi tikið í nýtslu, so sum filmstudio og øll tann útgerð, sum har hoyrir til. Innspælingin hevur higartil verið tætt knýtt at stórum býum, har stór studio við nógvum leiktjøldum eru til taks. Men við nútíðar tøkni og digitalari innspælingartøkni er tað lættari at velja innspælingarstøð aðrastaðni.

Fyriuttan teir nógvu yrkisbólkarnar, ið eru beinleiðis knýttir at filmsframleiðsluni “frá korninum til tað lidna breyðið”, koma ymiskar óbeinleiðis uppgávur afturat, sum t.d. matgerð og lokalur flutningur, handverkaratænastur av ymsum slag, gisting v.m. At hava góða tilgongd til tær óbeinleiðis tænasturnar er avgerandi fyri filmsframleiðsluna. Ein góð organisatión krevur góðar førleikar, kunnleika og eitt væl ment netverk av fólki, sum til ber at líta á. Ástøðingar innan filmvísindi hava yvirhøvur hildið upp á, at at kreativar vinnur eru tengdar at eini miðsavnan av vørum og tænastum, sum fyrst og fremst er at finna í stórbýunum. Nýggjari gransking (sum m.a. endurspeglast í teimum *case studies* sum stutt verða endurgivnar longri frammi í hesum áliti) bendir á, at smáir og miðalstórir býir uttanfyri stórbýarøkini, har øll kenna øll, men tað kortini finst eitt breitt úrval av fakligum førleikum, hava ein fyrimun tá tað kemur til filmsframleiðslu.[19] Tað finnast eisini fyrimunir í vera partur av smáum samfeløgum og netverkum.

### 1.2.2.2 Alheimsgerð og altjóðagerð av filmi

Filmsframleiðsla er ikki avmarkað til eitt ávíst nærøki, ávísan landspart ella ávísa skipan í einstøkum londum. Hon er ein partur av einum altjóða og alt meiri alheimsgjørdum (globaliseraðum) bygnaði. Alheimsgerð (globalisering) er eitt nógv nýtt hugtak, sum tó sjáldan verður skilgreinað. Alheimsgerð er kvalitativt øðrvísi enn altjóðagerð (internationalisering), hon stingur djúpri og er meiri samansett enn t.d. “øktur altjóða handil”. Alheimsgerðin er ein tilgongd har virkin samantvinning/integratión av búskaparligum og øðrum virksemi, t.d. mentanarligum virksemi, fer fram á plássum, ið eru landafrøðiliga spjadd. Tað eyðkennir eisini alheimsgerðina, at talið av innblandaðum aktørum er sera stórt. Aðrir aktørar enn lond, t.d. tvørtjóða fyritøkur og felagsskapir, eru týdningarmiklir partar av alheimsgjørda búskapinum. Tøknilig menning innan kunningar- og samskiftistøkni og avtøka av bindandi reglum innan eitt nú bankaheimin hevur gjørt alheimsgerðina møguliga.[20]

Alheimsgerðin hevur ført til eina herda kapping um allan knøttin, har fyritøkur mugu velja at kappast um prís ella dygd ella eina samanseting av báðum.

---

[18] Sama.
[19] Sama, s. 20.
[20] Dahlström (2004).

Samanspælið millum mentanarligu og búskaparligu alheimsgerðina snýr seg t.d. um at framleiða, útbreiða og framseta/úttrykkja symbol, ið umboða hendingar, kenslur, virði, smakk og annað. Í ítøkiligum formi kann hetta t.d. vera móti ella filmur. Margmiðlar gera tað møguligt at breiða út slík felags úttrykk um allan heimin.[21] Sum dømi um alheimsgerð verða ofta nýttar vørur sum pizza, jeans, Coca Cola og amerikanskir filmar, sum koma út í hvønn krók í heiminum.

Alheimsgerðin av mentanarídnaðinum inniber samstundis, at ein tørvur skapast at finna fram til og framala tað, sum eyðkennir tað einstaka plássið, landslutin ella landið. Í Norðurlondum er filmsstuðul soleiðis fyri ein stóran part latin fyri at viga upp ímóti eini mentarligari og búskaparligari alheimsgerð av filminum. Filmurin er tí í eini áhugaverdari dupultstøðu í mun til alheimsgerðina: Lutvíst er filmsframleiðsla partur av einari alheims búskaparligari skipan og filmarnir ein partur av eini alheims mentanarligari skipan *ella* eitt meira og minni medvitað alternativ til hetta.[22]

Mótvegis tí stóra talinum av filmum, sum eru framleiddir av stórfyritøkum í USA, vaks tað í londunum í Evropa fram eitt mál um at tryggja eina ávísa nøgd av innlendskum filmum. Hetta hevur m.a. verið partur av mentanarpolitikkinum hjá hesum londum. Politikkurin hjá hvørjum einstøkum landi hevði og hevur til endamáls at verja sítt egna samfelag við filmum á samfelagsins egna máli. Hetta hevur eisini ført til samstarv yvir um landamørk og til ein stóran vøkstur í samframleiðslum. Frá 1997-2002 vaks talið av filmum, sum vóru framleiddir í samstarvi millum tvey ella fleiri evropeisk lond við 25%.[23] Norðurlendskar samframleiðslur eru ein sera týdningarmikil partur av filmsframleiðsluni í Norðurlondunum. Her hevur serstakliga Nordisk Film og TV-fond ein stóran leiklut, við tað at hann byggir á samstarv millum øll fimm londini.

Samframleiðsla er ikki bert ein lættari máti at lyfta tað stóru uppgávuna, sum ein filmsframleiðsla er, men gevur eisini betri marknaðargrundarlag við tað, at filmurin hevur tveir ella fleiri heimamarknaðir í staðin fyri bert tann eina. Hetta er filmurin Barbara, ið varð lutvíst innspældur í Føroyum, eitt gott dømi um: Við tað at filmurin var framleiddur av donskum felag við donskum leikstjóra og leikarum, var upptikin í Føroyum og hevði norskar sjónleikarar í fleiri høvuðsleiklutum, so hevði hann lutfalsliga stóran áhuga í øllum trimum londunum.

Fyri at minka um kostnaðirnar eru amerikanskar filmsfyritøkur farnar at flyta ein størri og størri part av framleiðsluni burtur frá Hollywood, t.d. til Vancouver og til lond sum Írland, Italia, Ísland og New Zealand. Fíggjarligu fyrimunirnir kunnu vera lægri lønarlag ella fíggjarligur stuðul, sum t.d. tann skipanin, ið Ísland hevur, har filmsframleiðarar fáa 14% av teimum útreiðslunum, ið verða brúktar til filmsframleiðslu í Íslandi, endurgoldnar úr íslendska ríkiskassanum.

Í teirri øktu altjóða kappingini um tær alt meiri rørligu og flytandi filmsframleiðslurnar hava fleiri og fleiri lond stovnað sonevndar filmsnevndir ella filmskommisiónir. Hesar eru marknaðarføringareindir, ið venda sær til bæði langfilms- og lýsingarfilmsframleiðarar. Til ber at siga, at hesar arbeiða við vinnumenning fyri at fáa filmsframleiðslur til sítt øki. Hetta verður gjørt við marknaðarføringartiltøkum og uppbygging av netverkum. Arbeiðið hjá filmskommisiónunum er somuleiðis ein portalur hjá útlendskum áhugapørtum, ið vilja samstarva við fyritøkur og filmsarbeiðarar á staðnum. Í Norðurlondum finnast 5 landsfilmskommisiónir og seinastu árini eru

[21] Sama.
[22] Dahlstrøm et al, s. 21.
[23] Lange, A og Westcott, T (2004). Endurgivið í Dahlström (2005).

harumframt komnar fleiri økisfilmskommisiónir. Ein altjóða felagsskapur fyri filmskommisiónir finst eisini: The Association of Film Commisioners International.[24]

### 1.2.2.3 Filmspolitikkur – almennur studningur til filmsframleiðslu.

Filmspolitikkur í Norðurlondum endurspeglar eginleikan hjá filmi at vera bæði mentan og vinna, og er harvið eisini eitt politiskt øki, ið umfatar mentanarpolitiskar og vinnupolitiskar spurningar.[25] Mentanarpolitiskt verður filmurin lutvíst viðgjørdur sum mentan í týdninginum *list*, har listarlig dygd og nýskapan eru mátistokkurin, og har dentur eisini verður lagdur at fáa tann dygdargóða filmin út til so nógv sum gjørligt. Og lutvíst verður filmur viðgjørdur sum mentan í breiðari týdningi sum eitt virksemi, ið er við til at menna og verja mentanini og málið í landinum. Filmarnir skulu eisini sambært hesum partinum av mentanarpolitiska málinum endurspegla samfelagið og vísa tess virði og normar, og vísa støð og samfelagslív úr øllum landinum, bæði í bygd og í býi.

"Mentanarpolitiska vónin er, at fleiri søgur verða sagdar, fleiri røddir hoyrast, fleiri talent mennast og fleiri umhvørvi gerast sjónlig. Filmurin kann verða við til at varðveita og menna mentanarliga serleikan hjá einum landi."[26]

Grundleggjandi endamálið við filmspolitikki í einum vinnupolitiskum sjónarhorni er at skapa arbeiðspláss og búskaparligan vøkstur. Í Norðurlondum – Ísland undantikið- hava landspartarnir fingið størri ábyrgd av vinnupolitikki og vinniligum vøkstri. Vinnupolitisk tiltøk snúgva seg í stóran mun um at skapa góðar fyritreytir fyri búskaparligari menning. Her koma undirstøðukervi og útbúgvingarmøguleikar inn í myndina sum tvey øki, sum týdningarmikið er at seta inn á.

Spurningurin hevur ofta verið reistur, um ES-sáttmálin loyvir vinnuligum stuðli til filmsframleiðslu. Í Maastricht-sáttmálanum finst ein orðing, sum loyvir stuðli til virksemi, ið mennir og stuðlar mentanini í einum øki ella landi. Tað hevur tí verið hildið at vera í tráð við ES-reglurnar at stuðla slíkum virksemi, so leingi tað ikki ávirkar kappingarviðurskiftini á ein hátt, sum er í stríð við áhugamálini hjá ES.[27] ES-nevndin hevur gjørt reglur, sum merkja, at stuðul til filmsframleiðslu í einstøkum londum má gera tað gjørligt, at upp til 20% av fíggarætlanini fyri filmin kann brúkast í einum øðrum landi, og at samlaði almenni stuðulin ikki má fara upp um 50% av útreiðslunum. Fyri filmir, sum eru framleiddir í økjum, sum mugu metast smá mentanarliga ella málsliga, kann stuðulin vera hægri.[28] Norðurlond og tey norðurlendsku málini verða í hesum sambandi roknað at so smá, at tey kunnu lata hægri stuðul enn 50% til filmar á sínum egnu málum uttan at bróta ES-reglurnar á økinum.

Av Norðurlondum var tað í mong ár bara Ísland, sum hevði eina skipan, sum endurrindar útreiðslur til filmsframleiðslu. Í 2006 samtykti Noreg at royna eina slíka skipan í eitt avmarkað tíðarskeið. Slíkar skipanir finnast í onkrum formi í 11 ES-londum, m.a. Írlandi og Italia.

### 1.2.2.4 Filmur og økismenning – politikkur og úrslit.

"Í Vestureuropa finst ein vaksandi trúgv innan politikk og samfelagsumsiting upp á, at mentanarligar vinnur og virksemi innan mentan eru týdningarmiklir menningarfaktorar"[29]

---

[24] Association of Film Commisioners International: http://www.afci.org/
[25] Dahlström et al (2005), s. 23.
[26] Sama, s. 24.
[27] European Audiovisual Observatory (2007)
[28] Sama.
[29] Bayliss (2004).

“Motivini aftan fyri tað at stuðla framleiðslu av filmum kunnu vera, at hesir verða sæddir sum mentanarframleiðslur (kulturprodukter) og eitt mál í sær sjálvum, og/ella at framleiðslan av filmum inniber hættir at skapa eitthvørt annað. Hetta “annað” sipar í dagsins norðurlendska kjaki oftast til búskaparligan vøkstur og kann meira ítøkiliga snúgva seg um at skapa arbeiðspláss, at draga fólk og fyritøkur til ella at styrkja tann staðbundna ella regionala samleikan og tann sosiala kapitalin.”[30]

Trýkanturin í mynd 1 er eitt modell, ið vísir hvørjar ymiskar virkanir kunnu vera av mentanarligum virksemi.




Mynd 1. Trýkantur fyri mentanarstrategi. Kelda Svensson & Adolfsson (1995).

Tað, sum modellið sigur, er, at hóast eitt mentanarligt virksemi í fyrsta umfari ávirkar til dømis samleikan, so kann tað eisini hava ávirkan á vinnulívið. Ein sterkari samleiki økir um áræðið at fara undir nýggjar fyritøkur. Á sama hátt hevur mentanin við síni beinleiðis ávirkan á atdráttarmegina hjá einum øki eina “spjadda ávirkan” á samleika og vinnulív. Sama mentanarliga virksemið hevur tí ymisk sløg av ávirkan. Hetta modellið kann verður ofta brúkt til at greina, hvussu filmur knýtir seg at økismenning.[31]

Innan menningarpolitikk, annaðhvørt tað er økismenning ella menning av einum landi, ber til at arbeiða meira og minni beinleiðis móti teimum trimum hornunum í trýkantinum og at arbeiða í samspælinum millum teirra. Skattlig fígging av filmsvirksemi verður motiverað út frá øllum trimum aspektum, men við ymsum denti alt eftir umstøðunum og eftir, um talan er um politikk á lokalum, regionalum ella landsumfatandi støði.[32]

Vent verður aftur til modellið í umrøðuni av menningarmøguleikunum í Føroyum.

[30] Dahlström et al (2005), s. 26.
[31] Sama, s. 27.
[32] Sama.

#### 1.2.2.4.1 Vinnulív og arbeiðsmøguleikar

Seinnu árini hevur verið nógv gjørt burtur úr at gera búskaparfrøðiligar kanningar av ávirkanini, ið mentanarligar og kreativar vinnur hava á vinnulívið í avmarkaðum økjum og landspørtum, sonevndar regionalar ávirkanir. Ein háttur at lýsa hetta er at rokna multiplikator-virkanina fyri t.d. filmsvinnuna. Ein multiplikator er í hesum førinum eitt mát fyri sambandinum millum pengar, ið verða settir í filmsvinnuna, og búskaparligu streymarnar, sum hendan íløgan skapar. Er multiplikatorurin meira enn 1, merkir tað at tað verða skapt størri peningastreymar í búskaparrenslinum, enn tær íløgur, sum vóru gjørdar í eina ávísa vinnu. Búskaparfrøðingarnir W.G. Croy og R.D. Walker hava gjøgnumgingið eina nøgd av dømum og eru komnir fram til, at ávirkanirnar, sum koma frá filmsvinnu vísa ein multiplikator millum 1,3 og 1,57.[33] *Ávirkanirnar* kunnu vera *beinleiðis* (keypt verður í økinum fyri pengarnar, ið verða settir í film, *óbeinleiðis* (undirveitarar av vørum og tænastum) og *avleiddar* (nýtslan hjá starvsfólkunum í fyritøkunum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis luttaka í filmsframleiðsluni).

Hvussu nógv arbeiðspláss, ið beinleiðis eru avleidd av filmsvinnu, kann vera torført at rokna út, eftirsum tað í stóran mun snýr seg um verkætlanarstarvssetanir. Ein positiv ávirkan á ferðavinnuna, so sum øktur eftirspurningur eftir hotelgistingum, matstovum og lokalum flutningi, sum ein filminnspæling skapar, verður ofta nýtt sum grundgeving fyri at lata skattafíggjaðan stuðul til filmsframleiðslu. Sum dømi kunnu nevnast, at í New Zealandi verður mett, at innspælingin av Lord *of The Ring* filmunum tilførdi búskapinum har umleið 850 milliónir krónur, umframt at talið av ferðafólki til New Zealands er tvífaldað. Filmsturisma er ein vaksandi grein innan ferðavinnuna. Í Avstralia tala tey enn um *Crocodile Dundee*-virkanina og í Eysturríki hevur ferðavinnan í fleiri áratíggju notið gott av *The Sound of Music* og Skotland kann framvegis selja seg sum *Brave Heart*-landið. Í Svøríki hava tey staðfest eina *Wallander*-effekt í Ystad frá krimifilmunum, sum eru sera væl umtóktir í Týsklandi og Onglandi.[34] Líknandi væntanir vóru til virkanir av filminum *Barbara* í Føroyum, men orsøkin til, at hesar ikki komu, var helst, at filmurin yvirhøvur fekk vánalig ummæli og ikki gjørdist serliga væl umtóktur.

#### 1.2.2.4.2 Atdráttarmegi fyri fyritøkur og fólk

Ávirkanin á ferðavinnuna kemur inn á spurningin um atdráttermegina hjá einum øki. Í alheimsgjørdu kappingini hevur marknaðarføring av –ikki bara vørum og tænastum- men eisini av plássum ment seg til eitt týdningarmikið innsatsarøki innan økismenning. Plássmarknaðarføring miðar í høvuðsheitum eftir at gera tað lokkandi hjá fólki at búseta seg á plássinum og hjá fyritøkum at stovna virksemi ella á annan hátt at gera íløgur. Eitt annað endamál kann eisini vera at fáa fólk og fyritøkur at vera verandi. Ein týdningarmikil fyritreyt fyri væl eydnaðari plássmarknaðarføring er, at staðið verður sjónligt fyri nógvum fólkum. *Image*'ið hjá plássinum hevur í hesum sambandi stóran týdning og strembað verður eftir at byggja upp og menna eina jaliga mynd av staðnum – ofta við slagorðum og myndaeyðkennum/eyðkennismyndum. Í plássmarknaðarføringini er tað vorðið alt meira vanligt ikki bara at arbeiða úteftir, men eisini at taka íbúgvirnar á staðnum við. Íbúgvar, sum eru stoltir av sínum býi ella síni bygd kunnu metast sum eitt slag av staðbundnum ambassadørum fyri býin ella bygdina.[35]

Filmsframleiðsla kann viðvirka til plássmarknaðarføring upp á fleiri ymiskar mátar. Lutvíst kann sjálvur filmurin vera við til at økja um kennskapin til plássið ella økið og harvið økja um atdráttarmegina, sum er umrødd omanfyri. Hartil ber til at byggja víðari á filmin og brúka

[33] Sama, s. 28.
[34] Sama, s. 29.
[35] Sama, s. 30.

myndirnar og innihaldið í filminum beinleiðis í marknaðarføringini. *Lord of the Ring* hevur verið nýttur í marknaðarføringini av New Zealeandi í einum stórt uppslignum samstarvi millum Air New Zealand og New Line Cinema, sum hevur framleitt teir tríggjar filmarnar. ANZ nevndi seg "Airline to Middle-Earth" og hevði motiv frá filmunum málaði á fleiri av flogførum sínum.[36]

#### 1.2.2.4.3 Samleiki og sosialur kapitalur.

Stigið frá atdráttarmegi og plássmarknaðarføring til samleika og sosialan kapital er ikki langt. Økisbundin ávirkan, lýst sum styrktur samleiki og sosialur kapitalur, snýr seg um, hvussu staðbundnir aktørar og fólkið, sum býr í einum øki, verða mobiliseraði og styrkt fyri at gerast virkin í vinnulívinum og á arbeiðsmarknaðinum og fyri at økja um teirra trivnað og lívsdygd.

Økisbundin samleiki snýr seg um at menna atdráttarmegina hjá einum øki í mun til tað, sum liggur uttan fyri økið. Samleikin er knýttur at økisbundnum eyðmerkjum. Økisbundin identifikatión er framhildin sum ein lyklapartur í framvøkstrinum av økjum/landspørtum sum eitt sosialt rúm, ið fólkið á staðnum kennir eitt tilknýti til. Økisbundin eyðmerking grundar seg á ymiskar staklutir sum hugmyndir um náttúruumhvørvi, landslag, byggisiðir, mentan og tjóðskap, dialekt ella søguliga bakgrund.[37]

Sosialur kapitalur verður ofta nevndur, sum ein týdningarmikil staklutur í økismenningini. Sosialur kapitalur snýr seg um virði, siðir og normar og kann lýsast sum óformlig staðbundin kervi. Tey skapast og endurskapast gjøgnum tey netverk og sínámillum sambond sum eru millum einstaklingar, bólkar og felagsskapir í lokala samfelagnum. Sosiali kapitalurin á einum plássi hækkar og styrkir bæði ítøkiligar íløgur og íløgur í menniskjansligan kapital.[38] Ítøkiliga kann tann sosiali kapitalurin á einum staði, har ein filmsinnspæling fer fram, koma til sjóndar við, at tað gongur lætt og skjótt at loysa praktiskar trupulleikar. Tað eru nógvar søgur frá smærri innspælingarplássum s.s. Trollhättan og Pajala í Svøríki um, hvussu fólkið á staðnum hevur kunnað loyst praktiskar trupulleikar av tí at "øll kenna øll". "Skal ein kúgv brúkast til eina upptøku, verður ringt til grannan, og tað er skjótt at finna fram til tann persónin, ið tosast skal við, fyri at læsa høvuðsgøtuna av fyri at taka eina senu upp."[39]

#### 1.2.2.5 Landafrøðiliga spjaðingin av filmsvinnuni.

Kanningar vísa, at kreativu vinnurnar í vesturheiminum miðsavnast í stórbýunum. Býirnir bjóða eitt tætt fólkað umhvørvi, sum fremur møguleikar at møtast og býta um royndir, og møguleikarnar at fáa lut í framhaldandi kunnleikamenning. Hetta kann bæði vera tað, at ein leitar stragegiskt eftir kunning, men eisini, at ein intuitivt tekur til sín "býarins suð", sum kann vera leysasøgur, innlit, ávirkanir, viðmæli, siðir við meira.

Í nýggjari samfelagsvísindaligum bókmentum verður ofta víst til tørvin á einum kritiskum massa, t.v.s. at tað mugu vera nóg nógv fólk av ymiskum slag fyri at eitt pláss skal eggja til kreativitet. Richard Florida meinar til dømis, at kritiskur massi merkir, at hvørt einstakt menniskja lutvíst kann kenna seg aftur í sínum líkum, og lutvíst møtir eini rúgvu av persónum, ið eru øðrvísi enn hon/hann sjálv/ur.[40] Tey skapandi evnini verða stimbrað við, at samstundis sum ein er tryggur í sínum egna "bólki", kann ein verða stimbraður av tí, sum er øðrvísi. Tað finnast dømi um, at tey mest kreativu

---

[36] Sama.
[37] A. Paasi (2003).
[38] Putnam (1993).
[39] Dahlström et al (2005), s. 31.
[40] Florida (2002).

umhvørvini ikki altíð eru teir allar størstu býirnir, í hvussu er ikki eftir amerikonskum máti. Tað er hend ein miðspjaðing av teimum kreativu vinnunum til ymsar miðalstórar býir.[41]

Tað kann tykjast sum, at staðfestingin omanfyri av týdninginum, sum liggur í tættari búseting, um stórar streymar av fólki og førleikum og um kritiskan massa má føra til ta eitt sindur deterministisku niðurstøðuna, at filmsvinna í roynd og veru er ein stórbýarvinna. Móti hesi myndini stendur kortini tað rákið, sum hevur verið at sæð í Norðurlondum og aðrastaðni við hesi seinnu árini, har ein veldug menning av filmsvinnu í útjaðaraøkjum er farin fram.[42] Orsøkin til hetta er, at leiðarar innan filmsvinnuna í alt størri mun fáa eyguni upp fyri teimum fyrimununum, sum eru við at arbeiða á smærri plássum (smidligar og skjótar avgerðir, stuttur vegur til praktiska hjálp) og fyri at bróta av frá teimum føstu mynstrunum, sum eru í filmsumhvørvinum í stórbýunum, har tey, ið arbeiða í vinnuni ofta hava fylgst við fólki við somu bakgrund, somu virðum og sama hugsunnarhátti frá studentaskúlanum, ígjøgnum filmsskúlan og víðari í arbeiðslívinum.[43]

At stórbýirnir eru miðstøðir hjá filmsvinnuni forðar ikki fyri, at útjaðarin kann draga vinnuna til sín. Hetta sæst í norðurlendskum høpi í teirri sannroynd, at nógvar filmsstevnur liggja uttan fyri stórbýirnar og ofta í rættiliga smáum býum. Í altjóða filmsvinnuni eru tað eisini mong, sum virðismeta Norðurlond, tí tey umboða nakað øðrvísi enn tað, ið teir stóru filmsmetropolarnir standa fyri.[44] Hetta eru dømi um nisjur í filmsvinnuni, ið kunnu síggjast sum týdningarmikil undantøk til tey ráðandi rákini, ið ástøðini hjá m.o. Richard Florida benda á, og sum leggja dent á, at filmur er yvirhøvur er knýttur at stórbýum.

Tey netverk, sum verða skapaði í sambandi við filmsverkætlanir, eru sjáldan einans grundaði á persónar, sum búgva á staðnum, men umfata eisini landsdekkandi og altjóða sambond. Tí eru góðir samskiftismøguleikar og ferðamøguleikar til og frá einum øki ein serligur fyrimunur, tí hetta ger tað møguligt at heinta fólk inn ella at ferðast út við stuttum skotbrái.

Skipanin av filmsframleiðslu sum verkætlanir hevur eisini gjørt tað gjørligt at flyta innspælingar av langfilmum millum ymisk innspælingarstøð, alt eftir hvussu lutfalsligi kostnaðurin fyri arbeiðsmegi og skattastøðið broytast.

Flytingin av filmsvinnuni út í útjaðaraøkini í Norðurlondum, ella regionaliseringin av filmsvinnuni, er lutvíst ein *fíggjarligur spurningur*. Gongdin er íkomin, tí at tað nýggja regionala lagið í teirri politisku og umsitingarligu skipanini í Norðurlondum fær eina sterkari støðu og tekur á seg nýggj politikk-øki, ið áður hava verið fyrihildin statsvaldinum og miðfyrisiting tess. Sum liður í økismenningarpolitikkinum hava regionirnar í summum førum sett pengar í menningina av filmsframleiðslu. Harvið eru umstøðurnar og fyritreytirnar fyri at framleiða filmar ymiskar, alt eftir hvørji región, ið tú velur at spæla filmin inn í. Fíggjarligur stuðul er soleiðis við til at flyta filmsframleiðslu úr høvuðsstaðum til aðrar og øðrvísi landslutir. Øll Norðanlondini uttan Ísland hava okkurt slag økisbundnum fíggjarstuðli til filmsframleiðslu[45] Hyggja vit at Evropa finnast tað alment fíggjaðir regionalir filmsgrunnar í minst 11 londum.[46]

---

[41] Markusen og King (2003)
[42] Dahlström et al (2005), s. 32.
[43] Sama.
[44] Sama.
[45] Sama, s. 33.
[46] Lange og Westcott (2004), European Audiovisual Observatory (2007).

"Regiónir kunnu eisini vera *nýggj ídnaðarlig rúm* (nya industriella rum). Hetta merkir støð, har tað enn ikki eru fastar siðvenjur innan filmsídnaðin, sum kunnu verða forðandi fyri nýggjum hugskotum um film, og har tað er pláss fyri, at ungir og nýggir aktørar sleppa framat at framleiða langfilmar. Hetta eru faktorar, sum dentur hevur verið lagdur á hjá bæði Filmpool Nord og Film i Väst."[47]

Men spjaðingin í Norðurlondum av filmsvinnuni er fyrst og fremst knýtt at tí, at pengar eru settir í hetta virksemið frá regionalum politiskum myndugleikum, t.v.s. her hevur verið ein aktivur politikkur sum hevur givið úrslit. Hetta staðfestir svenski samfelagsgranskarin Margareta Dahlström (2007) í eini kanning av búsetingar- og arbeiðsviðurskiftum hjá svenskum filmsarbeiðarum: "Í Svøríki verða fleiri og fleiri filmar framleiddir, samstundis sum tann fyrrverandi miðsavnanin av allari filmsframleiðslu í Stokkhólmi endaliga og avgjørt er brotin. Ein nýggj landafrøði fyri filmsframleiðsluna er um at vaksa fram. Ein slík menning hevur verið møgulig orsakað av politiskum tiltøkum. Filmspolitikkurin hevur fingið eina regionala dimensión, nakað ið hevur viðført, at pengarnir til film lutvíst eru vorðnir regionaliseraðir, og at regionalir aktørar hava tikið ein aktivan leiklut á seg fyri at stuðla upp undir framleiðslu av filmum."[48]

### 1.2.3 Samanumtøka.

Filmsframleiðsla er ein kreativ vinna. Hóast tað kann sigast um filmsvinnuna sum heild í norðurlendskum og altjóða høpi, at hon er miðsavnað í stórbýarøkjum, so síggja vit í Norðurlondum og Evropa (og USA), at hetta mynstrið verður brotið við aktivum tiltøkum frá regionalum politiskum myndugleikum. Filmspolitikkur við bæði mentanarpolitiskum og vinnupolitiskum sjónarhornum hevur havt við sær, at filmsvinnan mennist uttan fyri stórbýarøkini, har hon áður hevur verið miðsavnað.

Vinnupolitisku tiltøkini hava verið at stuðla upp undir útbúgving, karmar og vinnuligt undirstøðukervi og hava verið motiverað av ynskjum um at skapa arbeiðspláss, sosialan kapital og regionala atdráttarmegi.

Mentanarpolitikkurin hevur latið stuðul til framleiðslu av dygdargóðum verkætlanum og harvið við givið vinnuni eitt bein at standa á – hann hevur verið motiveraður av at skapa tí einstaka landinum ella teirri einstøku regiónini ein egnan samleika og eina mentanarliga mótvekt móti teirri stóru yvirvágini av altjóða, serliga amerikonskum filmum.

Vit skulu hyggja eftir nøkrum dømum um, hvussu filmsvinnan er vaksin fram í Norðurlondum. Longur frammi í hesum áliti verður eisini mett um, hvat royndirnar frá regionaliseringsgongdini innan film í Norðurlondum kunnu nýtast til í føroyskum høpi.

### 1.3 Økismenning innan filmsvinnuna í Svøríki.

Seinastu 10 árini eru hendar stórar landafrøðiligar broytingar innan svensku filmsvinnuna. Í byrjanini av 90-árunum vórðu at kalla allir langfilmar í Svøríki innspældir í ella kring Stokkhólm, meðan einans hendinga filmur var framleiddur í øðrum pørtum av landinum. 10 ár seinni var støðan broytt, og meginparturin av filmunum vórðu framleiddir langt burturi frá høvuðsstaðnum.[49]

---

[47] Sama. Filmpool Nord og Film i Väst eru virknastu filmsdeplarnir í Svøríki uttan fyri Stockholm.
[48] Dahlström et al (2007), s. 5.
[49] Dahlström et al (2005), s. 39.

Orsøkin til hetta er at finna í teirri strategi, sum Svenska Filminstitutet stakk út í kortið seinast í 80-árunum, og sum frá 1997 og frameftir førdi til eina fíggjarliga stuðulsskipan, sum fekk heitið “stöd til regionala resurscentrum för regional verksamhet för film och video” (“stuðul til regionalar tilfeingisdeplar fyri film og video”). So við og við er filmsvirksemi komið í gongd í øllum pørtum av Svøríki gjøgnum stovnseting av regionalum tilfeingisdeplum. Hesir tilfeingisdeplarnir arbeiða við at bjóða miðlafrálæru fyri børn og ung, at stimbra samstarvi millum ymsar aktørar innan filmsøkið, at vísa dygdarfilmar fyri almenninginum og at vera við til at menna framleiðslu av stuttfilmum og dokumentarfilmum. Tilsamans 19 slíkir tilfeingisdeplar eru í Svøríki í dag, og av teimum vórðu 3 gjørdir til framleiðsludeplar fyri spælifilmar í 2000, tá ein nýggj politisk avtala varð gjørd um filmsstuðulin í Svøríki fyri tíðarskeiðið 2000-2005. Hesi vóru *Film Pool Nord* (í Luleå í Norrbotten), Film i Väst (í Trollhättan í Västra Götaland) og Film i Skåne (í býnum Ystad). Í januar 2006 fekk ein nýggj filmspolitisk avtala gildi, ið heldur fram á somu kós sum tann fyrra.

Í tabell 1 niðanfyri sæst eitt fíggjaryvirlit yvirlit yvir hesar tríggjar framleiðsludeplarnar fyri árið 2005. Her sæst, at statsligi stuðulin er knappliga eina millión sv.kr. um árið, meðan regionali stuðulin, sum verður latin afturímóti, er munandi hægri.

**Tabell 1: Stuðul til regionalar filmsframleiðsludeplar í Svøríki í 2005 (SEK).**

| *Upphæddir í svenskum kr.* | *Stöd från Svenska Filminstitutet* | *Regional motprestation* | *EU-bidrag* | *Omsättning* | *Premiärsatta samfinansierade långfilmer* |
|---|---|---|---|---|---|
| Film i Väst | 950 000 | 45 850 000 | 1 060 000 | 66 940 000 | 19 |
| Filmpool Nord | 950 000 | 5 000 000 | 7 000 000 | 26 310 000 | 5 |
| Film i Skåne | 950 000 | 11 500 000 | 0 | 15 100 000 | 5 |

**Kelda: SFI (2006) Verksamhetsberättelse 2005, s. 48.**

Í hesum trimum regiónunum hava myndugleikarnir sostatt valt at seta skattapengar í filmsvinnuna. Pengarnir verða játtaðir frá kommunum, landspartastýrunum og regiónunum. Í 2005 fingu 19 langfilmar stuðul frá Film i Väst, og var hetta meira enn helvtin av øllum teimum svensku filmunum, sum vóru frumsýndir í biografunum tað árið. Film Pool Nord hevur eina umleið líka langa søgu sum Film i Väst, men hevur ikki havt ein líka stóran vøkstur, meðan Film i Skåne, sum er stovnað nakað seinni enn hinir báðir deplarnir, hevur víst eina dynamiska menningargongd.

Vit skulu stutt hyggja at virkseminum í tveimum av hesum trimum svensku filmsframleiðsludeplunum.

### 1.3.1 Film i Väst – eitt menningartiltak í Västra Götaland.

Film i Väst er ein filmsdepil í Västra Götaland, sum í dag er skipaður sum eitt partafelag, sum regiónin og nakrar av kommunum í regiónini eiga. Film i Väst er dømi um, at eitt virksemi, ið byrjaði sum filmsmentanarligt virksemi fyri ung, hevur ment seg til ein sterkan depil fyri framleiðslu av langfilmum. Film i Väst var stovnað í 1992 í lítla býnum Alingsås, umleið 1 tíma uttan fyri Göteborg. At byrja við var endamálið, at ung og áhugafilmarar (amatørar) kundu fáa umstøður at royna at gera filmar í verkstøðum við films- og videoútgerð, sum vórðu riknir av kommunum ella av lokalum feløgum við kommunalum stuðli. Í 1993 var ein talentmenningarskúli stovnaður og í 1994 eydnaðist við stuðli frá kommunum og landspartastýrinum at fáa settan á stovn ein vestursvenskan filmsgrunn, sum var við til at fíggja framleiðslu av langfilmum og stuttfilmum í økinum. Hesin var tó bert virkin í tvey ár.

Men eldsálirnar aftan fyri Film i Väst góvu kortini ikki upp, men søktu um ES stuðul til at menna virksemið. Í umsóknini var dentur lagdur á tørvin á einum filmstudio til spælifilmar, á tørvin á møguleikum fyri eftirframframleiðslu og fyri at menna førleikar, og somuleiðis var víst á, at tað ikki funnust langfilmsframleiðandi fyritøkur í økinum. Í 1997 fekk Film i Väst játtaðan sonevndan Mál 2-økismenningarstuðul úr bygnaðargrunnunum hjá ES (Structural funds).[50] Virksemið var í hesum sambandi flutt til býin Trollhättan.

Neyðugt var at fara undir at gera breiðar íløgur í eitt vinnuligt undirstøðukervi till tess at skapa eitt langtíðarberandi framleiðsluumhvørvi . Í tíðarskeiðnum 1997-2004 var ES-stuðulin 90 milliónir svenskar krónur tilsamans, og hann hevur tí havt stóran týdning fyri menningina av Film i Väst. Størsti stuðulin er kortini øll árini komin frá Västra Götalandsregiónini og teimum avvarðandi kommununum í regiónini. So við og við, sum ES-stuðulin er minkaður, til hann fall burtur í 2006, hevur regiónin hækkað sín stuðul tilsvarandi.

Umsetningurin hjá Film i Väst vaks frá 1 millión SEK í 1992 til 67 milliónir í 2005. Fram til 2001 vórðu umleið 70 fyritøkur við tilknýti til miðlar stovnaðar í økinum.

Samfígging av filmsframleiðslu hevur verið týdningarmesti faktorurin til tess at draga filmsverkætlanir til økið. Film i Väst kann bjóða sær til at fíggja upp til ein triðing av fíggjarætlanini í eini verkætlan, men krevur afturfyri, at ein upphædd, ið svarar til minst 150% av innskoti felagsins, verður brúkt í regiónini.[51]

Í teimum reglugerðum og leiðreglum, ið eru gjørdar fyri samframleiðslunum hjá Film i Väst, stendur m.a.: "Västra Götalandsregionens vision med Film i Väst är att organisationen ska bidra till att etablera regionen som den ledande filmregionen i norra Europa."[52]

Film i Väst setir treytir fyri at veita fígging. Millum tær týdningarmestu reglurnar eru:
- Verkæltanir mugu leggja ein part av framleiðsluni í í økinum, har FiV er virkið.
- Høvuðsframleiðarin skal hava eina mannaða skrivstovu í sama øki.
- Minst 50% av øllum teimum, ið fáa løn í sambandi við filmsverkætlanina skulu hava bústað í Västra Götalandsregiónini.[53]

Tá ið Västra Götalandsregionen varð stovnað í 1999 (fyri Västra Götalands Län, sum var niðurlagt), yvirtók hon Film i Väst og skipaði fyritøkuna sum partafelag við regiónini sum einasta partaeigara. Vinnumenningarnevndin og Mentanarnevndin fyri regiónina varða báðar av felagnum. Västra Götalandsregiónin arbeiðir eftir visiónini "Tað góða lívið", ið varð samtykt í 2005 og miðar eftir, at regiónin bæði skal vera ein sterkur mentanardepil og hava støðugan vinnulívsvøkstur, og leggur dent á, at mentan er ein orkukelda og stimbur fyri borgararnar, samstundis sum hon gagnar búskaparvøkstrinum.[54]

---

[50] Mál 2-økismenningarstuðulin hjá ES miðar eftir at stuðla økjum við viknandi vinnuvirksemi og viknandi fortreytum fyri búskaparligum vøkstri. Virksemið flutti úr Allingsås til Trollhättan, tí Trollhättan uppfylti treytirnar sum Mál 2 stuðulsøki. Sama, s. 52.
[51] Stern, Svensson og Toll 2003, s. 6.
[52] www.filmivast.se
[53] www.filmivast.se , http://epi.vgregion.se/vgrtemplates/RegRightColumn.aspx?id=8660
[54] Västra Götalandsregionen 2005.

Fram til 2005 fekk Film i Väst, sum áður nevnt, tilsamans 90 milliónir SEK í stuðli úr ES-menningargrunnunum, og hesir pengar hava sjálvsagt átt stóran lut í menningini av virkseminum. Men nú, ið ES-stuðulin hevur fingið ein enda, hevur regiónin tikið avgerð um at traðka til og dekka burturdotna ES-stuðulin inn við hægri játtanum frá mentanar- og vinnumenningarnevndunum. Kommurnar, ið eru við í arbeiðinum, hava tikið somu avgerð.

Í løtuni sær Film i Väst møguleikar fyri at víðka virksemið innan m.a. eftirframleiðslu. Felagið miðar ikki eftir at gerast meira ráðandi innan svenskan film, tí tá hvørvur tað fjølbroytnið í vinnuni, sum felagið sjálvt hevur verið við til at skapa. Í staðin vil Film i Väst víðka virksemi sítt innan altjóða framleiðslur.[55]

***Lyklafaktorar í samanrenningini millum film og økismenning í Västra Götalandsregionen.***
Tað vinnuliga undirstøðukervið er ein týdningarmikil faktorur í sambandinum millum film og vinnuliga menning. Hesin faktorurin er fyrst og fremst til staðar í teimum innspælingarhøllum, sum eru bygdar í Trollhättan. Film i Väst heldur til í einum gomlum ídnaðarøki í Trollhättan og hevur í dag fýra ymisk filmstudio har. Tað nýggjasta er Studio Fares, ið er 1100m².

Menniskjansliga tilfeingið er eitt "bleytt" undirstøðukervi. Í 2003 gjørdi Film i Väst eina kanning av førleikabygnaðinum í Västra Götalandsregiónini í eini spurnarkanning, har framleiðsluleiðarar og filmsframleiðarar vórðu spurdir. Tað vísti seg, at filmsfeløgini høvdu ikki havt trupulleikar við at liva upp til kravið, um at minst helvtin av teimum, sum vórðu sett í starv, skuldu vera úr regiónini. Samstundis var staðfest, at tað vantaðu førleikar innan ávís øki. Hetta galt serliga filmsleikstjórar og A-fotografar.[56] Filmsleikstjórar samstarva ofta við nakrar fáar A-fotografar. Ljóðtøkningar, elektrikarar og nakrar aðrar serfrøðingafunktiónir mangla eisini í regiónini.

Sum liður í eini langsiktaðari ætlan fyri menning av eini langtíðarberandi filmsvinnu í regiónini hevur Film i Väst ment fleiri ymiskar útbúgvingar. Eitt øki, har tørvur á útbúnum fólki tíðliga varð staðfestur, var framleiðsluøkið. Tí var Film í Väst við og bygdi upp 3-ára filmsframleiðaraútbúgvingina á lærda háskúlanum í Trollhättan/Uddevalla. Felagið tók eisini stig til eina hægri útbúgving í 3D-animatión og í listarligari framseting á sama lærda háskúla. Harumframt rekur Film i Väst í samstarvi við kommunalu vaksnamannaútbúgvingarnar eina gymnasiala yvirbygningsútbúgving fyri ymiskar starvsbólkar innan filmsvinnuna. Hendan er vorðin til eina 2-ára yrkisútbúgving. Fyri royndar filmarbeiðarar og ungar filmsframleiðarar, ið enn ikki eru komnir í gongd, rekur Film i Väst eina uppvenjingarverkætlan (trainee-projekt) saman við lokalu arbeiðsávísingunum og framleiðslufeløgunum.

Ein lyklaførleiki er at meta um uppskot til langfilmsverkætlanir. Hjá Film i Väst er tað forstjórin Tomas Eskilsson, ið hevur hesa ábyrgdina. Hann tekur avgerð um hvørjar filmsverkætlanir, ið Film i Väst skal samframleiða. Metingarstøðið er listarliga dygdin, væntaði áhugin hjá biografgangarunum, eins og filmar til børn og ung skulu raðfestast frammarliga. Harumframt verður eisini mett um, hvussu filmsverkætlanin ávirkar filmsvinnuna og arbeiðsmarknaðarstøðuna í regiónini.[57]

---

[55] Dahlström et al (2005), s. 54, endurgivið úr samrøðu við Tomas Eskilsson, stjóra fyri langfilmadeildini í Film i Väst.
[56] Ein A-fotografur er tann persónurin á framleiðsluliðnum sum tøkniliga og listarliga hevur ábyrgdina av fotografisku sniðgevingini av einum filmi í samstarvi við m.o. filmsleikstjóran.
[57] www.filmivast.se

Ein filmur, sum fær stóran viðgang ella "succes", hevur nógv at siga – lutvíst fyri at vátta organisatiónina inneftir, men kanska fram um alt í mun til nærumhvørvið, regiónina og alt landið. Ein væl fagnaður filmur, ið selir nógv atgongumerki, ger tað lættari hjá politikarum at vilja satsa upp á filmsframleiðslu. Á lands- og altjóða pallinum er ein "succes" við til "at vísa, at mann dugir". Fyri Film i Väst fekk *Fucking Åmål* ein slíkan avgerandi týdning. Filmurin varð frumvístur í 1998 og var ein av best fagnaðu svensku filmunum í 1990-árunum bæði millum ummælarar og áskoðarar.

Týdningurin, ið filmsvinnan hevur fyri økismenning, sæst m.a. av sambandi hennara við aðrar vinnur. Film i Väst hevur kannað ta samlaðu vinnuna, sum fæst við livandi myndir í Västra Götaland. Hendan vinnan umfatar films- og sjónvarpsframleiðslu, lýsingarfilmar, sjónvarps- og telduspøl, simulering, útbúgvingarfilmar og audiovisuellar tænastur til internetið. Trollhättan við Film i Väst er miðstøð fyri langfilmaframleiðslu, meðan Göteborg er miðstøð fyri sjónvarps- og lýsingarfilmar. Samstundis sum Film i Väst er vaksið, er eisini framleiðslan hjá Sveriges Television í Göteborg vaksin, serliga innan drama, sum er ferfaldað seinastu árini.[58]

Kanningin vísir eisini, at tað eru stovnaðar nógvar fyritøkur innan films- og miðlavinnuna í regiónini. Hetta verður umrøtt sum eitt "filmcluster", har Film i Väst verður sæð sum motorurin.[59] Hetta sjónarmiðið gongur eisini aftur hjá Vinnumenningarnevndini í Västra Götalandsregionen, sum letur nógv tað størsta regionala íkastið til fíggingina av Film i Väst. Nevndin metir stuðulin til samframleiðslu av langfilmi og drama sum ein stimbur til menningina av einum audiovisuellum ídnaði.[60]

Á heimasíðuni hjá Film i Väst er ein listi yvir filmsfyritøkur í regiónini, sum vísir, at 14 framleiðslufeløg og 11 aðrar films- og miðlafyritøkur eru bara í Trollhättan. Film i Väst hevur eitt tætt samarbeiði við hinar filmsfyritøkurnar, og forstjórin Tomas Eskilsson leggur dent á týdningin av at byggja upp langtíðar viðurskifti við framleiðslufeløg, filmskaparar og aðrar lyklapersónar.[61] Framleiðslufeløgini eru aksin fyri allar aðrar fyritøkur. Um tey hava nógv virksemi í gongd, breiðir ávirkanin seg út í alla vinnuna.[62]

Lokalur eldhugi og tað, at eldsálir og lyklapersónar finnast, er enn ein týdningarmikil faktorur fyri sambandið millum filmsvinnu og økismenning. Hetta hevur havt stóran týdning í stovnanini og menningini av Film i Väst (sí omanfyri).

At politikarar á regionalum støði, fyrst í läns-ráðunum og síðani í regiónini Västra Götaland, hava satsað upp á filmsvinnu hevur havt avgerandi týdning. Fleiri lyklapersónar vísa eisini á týdningin av, at Västra Götaland er ein región við sjálvstýri, og at hetta gevur eina týðiligari strategiska ábyrgd fyri økismenningini í regiónini.[63]

### 1.3.2 Filmsvinnan í Norrbotten – Filmpool Nord.

Filmsvinnan í Norrbotten, ið er norðasti landsparturin í Svøríki, tók dik á seg í 1990, tá táverandi Norrbottens Län fekk eina statspulju upp á 8 milliónir SEK, sum vóru oyramerktar til mentan. Táverandi skrivstovustjórin fyri vinnumenningardeildini hjá läninum, Per-Erik Nilsson, ið eisini

[58] Stern, Svensson og Toll 2003, s. 4.
[59] Sama, s. 6
[60] Dahlström et al (2005), s. 56
[61] Sama, endurgivið úr samrøðu við Tomas Eskilsson, forstjóra i Film i Väst.
[62] Sama.
[63] Sama, s. 57.

hevði ábyrgdina av mentanarumsitingini, mælti til at nýta peningin til at fáa í gongd eina filmsvinnu í Norrbotten. Per-Erik Nilsson er í dag stjóri fyri felagnum Filmpool Nord. Hugskotið um at nýta hendan pening til at stuðla upp undir filmsframleiðslu í läninum var umsett til veruleika í 1991, tá ein tilfeingismiðstøð fyri regionala filmsvinnu varð stovnað. Fokus í hesum virksemi var útlán av tøkniútgerð og fíggjarligur stuðul til filmsframleiðslu. Samstundis sum nógvar ivasamar røddir vóru frammi bæði í Norrbotten og í Stokkhólmi um møguleikarnar fyri og nyttuna av at framleiða filmar í Norrbotten, kom ein rúgva av umsóknum frá lokalum filmsskaparum um at sleppa at gera filmar.[64]

Í 1992 var virksemið skipað í Filmpool Nord sum ein 3-ára royndarskipan. Í 1996 var royndin gjørd varandi, og Filmpool Nord varð skipað sum eitt partafelag, ið Norrbottens Län átti. Síðani 1998 hava allar kommunurnar í Norrbotten verið við sum partaeigarar, länsstýrið í Norrbotten og kommunan í Luleå vórðu størstu íleggjarar við ávikavist 18 og 14 prosentum av partapeninginum. Á gamla hernaðarøkinum Kronan í Luleå hevur Filmpool Nord skrivstovuhøli saman við øðrum mentanarstovnum. Millum mentanarvirksemið finst ein biografur og Studio Kronan, eitt filmstudio á 700 fermetrar, ið Filmpool Nord er partaeigari í. Hetta er norðaligasta filmstudio fyri yrkisligar filminnspælingar, sum finst í Svøríki. Í 1990-árunum var filmsframleiðslufelagið Giraff Film stovnað í Luleå, og í 2005 vóru 5 filmsframleiðslufeløg stovnaði, ið hava skrivstovur á Kronan økinum.

Frá 1997 øktist almenni stuðulin til Filmpool Nord munandi, tá svenski staturin lat pening úr stuðlinum til regionalar tilfeingisdeplar. Í 2000 var Filmpool Nord gjørt til landsdepil fyri langfilmaframleiðslu. Í árunum 2003-2005 var árligi regionali stuðulin 5 mill. SEK. Harumframt er fitt av stuðli komin úr bygnaðargrunnunum hjá ES – fram til 2005 tilsamans 44 mill. SEK. Í árunum 2000-2005 var ES-stuðulin 15-20% av samlaðu fíggjarætlanini hjá Filmpool Nord. Tilsamans hevur Filmpool Nord verið við til at framleitt umleið 40 langfilmar (íroknað sjónvarpsrøðir) og umleið 250 dokumentar- og stuttfilmar.[65]

Men framgongdin hjá Filmpool Nord snýr seg ikki bara um at skapa fíggjarligt tilfeingi og vinnuligt undirstøðukervi fyri filmsframleiðslu í Norrbotten. Tað málrættaða arbeiðið hjá eldhugaðum lyklapersónum hevur eisini verið ein avgerandi fortreyt fyri menningini.[66] Umframt áðurnevnda Per-Erik Nilsson, ið líka síðani 1991 hevur arbeitt fyri at menna filmsvinnuna í Norrbotten, so hevur menningin eisini verið borin fram av lyklapersónum innan arbeiðsávísingarnar, kommunurnar, länsstýrið og ríkispolitikk. T.d. endaði formaðurin í länsráðnum røðu sína á eini ráðstevnu um film í 2004 við at lova framhaldandi fíggjarligan stuðul til filmsvinnuna frá regionalu myndugleikunum.

***Menningin av einum lands- og altjóða perspektivi.***
Tað krevjast ymisk sløg av tilfeingi til langfilmaframleiðslu. Tað snýr seg m.a. um undirstøðukervi og netverk, fígging og førleikar. Tað seinasta ber við spurningin um, hvørt tað eru persónar tøkir, ið hava vitan um og royndir í filmsframleiðslu. Tað er áhugavert at hyggja at, hvussu hesi ymsu sløgini av tilfeingi hava ment seg í Norrbotten regiónini.

Fyri tað fyrsta krevjast undirstøðukervi og netverk. Ein filmbýur er í ferð við at verða skapaður í tilknýti til Studio Kronan og skrivstovurnar hjá Filmpool Nord. Hesin filmbýurin skal innihalda fleiri films- og miðlaatknýttar fyritøkur s.s. filmsfyritøkur og tøknifyritøkur. Hendan satsingin er

[64] Sama, s. 50, Johansson 2004, s. 9, Filmpool Nord 2002, s. 2.
[65] www.fpn.se
[66] Dahlström et al 2005, s. 59.

gjørlig av einum tøttum samstarvi millum Luleå kommunu, Luleå Näringsliv AB (vinnumenningarfyritøka) og Filmpool Nord.

Filmpool Nord hevur nógv sambond við fyritøkur í filmsvinnuni í Norrbottens län. Í eini spurnarkanning, ið vendi sær til allar fyritøkur, ið kunnu staðfestast at hava virkað innan filmsvinnuna í Norrbotten, vísti tað seg, at nærum allar høvdu havt samband við Filmpool Nord. Tænasturnar, sum fyritøkurnar fingu vóru –settar upp eftir týttleika-: Fígging, sparring, ráðgeving, netverk, førleikamenning og distributión.[67] (Sí tabell 2 niðanfyri.)

**Tabell 2: Tænastur, ið Filmpool Nord hevur veitt fyritøkum í Norrbotten.**




Kelda: Johansson, Staffan (2004): *Filmindustrin i Norrbotten. Framväxt, nuläge och ekonomisk betydelse.* S. 23.

Tá vit tosa um filmsframleiðslu, ber helst til at víðka hugtakið undirstøðukervi til tað ítøkiliga náttúruumhvørvið, sum hevur víst seg at vera eitt tilfeingi í menningini av filmsframleiðslu í Norrbotten. Filmar, sum eru samframleiddir av Filmpool Nord, hava í stóran mun gjørt nýtslu av teimum serstøku náttúruumhvørvunum í Norðursvøríki. Eisini tað lítla samfelagið verður mett sum eitt tilfeingi, tí tey sum hava spælt filmar inn í Norrbotten siga frá, at "tað er lætt og stuttligt at spæla filmar inn í Luleå og Norrbotten, tí fólk eru hjálpsom og vinarlig".[68]

Miðvís sambond í netverkum er ein fortreyt fyri at skapa langfilmsverkætlanir. Framleiðsla av langfilmum fer fram í verkætlanum. Tað henda alla tíðina nýggjar samansetingar av verkætlanum. Tí hevur tað stóran týdning, at aktørar taka lut í netverkum og eru til staðar har, ið fólk møtast fyri at seta slíkar verkætlanir saman.

Ein støðug tilgongd av førleikum er sera týdningarmikil, og hetta er ein avbjóðing fyri ein landslut sum Norrbotten við teimum landafrøðiligu fyritreytum, sum har eru. Nógvar filmsframleiðslur eru

[67] Johansson 2004, s. 25.
[68] Dahlström et al 2005, s. 60, endurgivið úr samrøðu við Tomas Eskilsson, forstjóra i Film i Väst.

altjóða samframleiðslur. Fyri svenskar filmar hevur serliga norðurlendskt samstarv stóran týdning. Filmpool Nord miðar eftir at menna samstarvið í Nordkalot-økinum.

Eitt annað tilfeingi í framleiðslu av langfilmum er atgongdin til fígging í Norrbotten. Hendan kemur eisini í framtíðini at vera tengd at almennum pengum. Út frá tí sum kommunalir og regionalir fíggjarveitarar hava meldað út, er framhaldandi stuðul væntandi. Filmpool Nord hevur átt lut í nøkrum av teimum best seljandi filmunum í Svøríki seinastu árini, og hetta saman við framgongdini hjá fyritøkuni styrkir argumentini fyri at lata skattafíggjaðan stuðul til virksemið. Tí hava regionalu myndugleikarnarir eisini økt játtanina, tá ES-stuðulin er fallin burtur. Í dag er árliga fíggjarætlanin 33 milliónir svenskar krónur, sum í høvuðsheitum eru regionalir pengar.[69]

Gjøgnum praktiskar royndir frá filmsverkætlanum og gjøgnum útbúgvingar er ein førleiki stigvíst bygdur upp, sum er eitt tilfeingi fyri framtíðar menningina av filmsvinnuni í Norrbotten. Ein lokal og regional "filmsarbeiðarastætt" er ment. Johansson vísir í kanning síni á, at nógvir av hesum filmsarbeiðarunum er sonevndir "mångsyslare" (t.e. fólk, ið starvast innan fleiri ymisk yrki), men at tað eru eini 150 fólk í regiónini, sum burturav arbeiða við filmi[70]. Harumframt eru onnur 80, ið arbeiða innan sjónvarpsvinnuna.[71]

Í Norrbotten finnast nakrar útbúgvingar innan film. Her hevur Filmpool spælt ein stóran leiklut, tí fyritøkan hevur í stóran mun verið tann, ið skipar fyri slíkum útbúgvingum. Útbúgvingarnar hava snúð seg um rekvisittir, foto, handritaskriving, framleiðsluarbeiði, leikstjórn, klipping, framleiðslu av tónleikavideo og filmstøkni. Útbúgvingarnar hava verið fíggjaðar við stuðli úr regionalum arbeiðsmarknaðargrunnum og skipaðar í samstarvi við m.a. svenska sjónvarpið SVT og við regionalar og landsdekkandi hægri lærustovnar.

Førleikamenning fer tó ikki einans fram ígjøgnum útbúgvingar, men í stóran mun gjøgnum praktiskar arbeiðsroyndir og við, at kunnleiki verður útbreiddur í samstarvi millum ymsar aktørar.

Framtíðarmálið hjá Filmpool Nord er at økja um talið av samframleiddum langfilmum. Ætlanin er longu í 2007 at økja talið úr 3-4 árliga upp í 7 um árið, umframt at draga fleiri fyritøkur í filmsvinnuni til regiónina. At vaksa um virksemið er eisini ein máti at gera tað gjørligt hjá filmsarbeiðarum at arbeiða við filmi burturav alt árið.[72]

### 1.3.3 Samanumtøka um regionala filmsvinnu í Vestur- og Norðursvøríki.

Bæði í Västra Götalandsregionen og í Norrbotten, sæst at eitt virksemi, sum er bygt upp frá grundini av og er byrjað við at veita undirvísing, fígging og praktiskar karmar til filmsframleiðslu í lokaløkinum, eru vaksin til stór vinnulig virksemi.

Film i Väst og Filmpool Nord eru fyritøkur, sum við almennum pengum fara inn og heilt ella lutvíst fíggja filmsverkætlanir undir treytum um, at verkætlanin í ávísan mun skal framleiðast í regiónum teirra. Við at bjóða partvísa fígging draga fyritøkurnar pening til regiónina og skapa grundarlag fyri, at aðrar fyritøkur í regiónini kunnu fara inn í verkætlanirnar sum veitarar upp á handilsligar treytir.

---

[69] Filmpool Nord, www.fnp.se
[70] Johansson 2004, s. 25.
[71] Sveriges Television 2006, s. 36.
[72] Filmpool Nord 2007, www.fnp.se

Lyklafaktorarnir í menningini hava verið eldsálir í vinnuni og dyggur politiskur stuðul og vilji til at skapa fyritreytirnar fyri eini regionalari filmsvinnu. Tá vinnuliga undirstøðukervið var fingið upp á pláss, var gjørligt at fáa inn virksemi, sum er fíggjað við pengum, ið koma uttanífrá.

Tað at regiónirnar og staturin samstundis hava havt ein mentanarpolitikk, sum letur stuðul til framleiðslu av svenskum filmum og til aðrar mentanarstovnar, ið filmsvinnan samstarvar við, hevur sjálvandi eisini verið ein partur av grundarlagnum undir regionalu filmsvinnuni.

### 1.4 Menning av filmsvinnu í útjaðarunum í Noregi.

Í Noreg er menningin av filmsvinnuni í útjaðaranum komin eitt sindur seinni í gongd enn í Svøríki. Politiskt eru tvey rák, sum bera móti øktari regionalisering av filmsvinnuni. Lutvíst hevur norski staturin seinastu árini lagt dent á at menna filmsvinnuna uttan fyri Oslo, sum annars hevur verið staðið, har at kalla øll norsk filmsframleiðsla fór fram. Hetta er gjørt við at flyta týdningarmiklar filmsstovnar úr Oslo, t.d. at flyta miðlaeftirlitið til Fredriksstad, stovna filmsútbúgving í Lillehammer, leggja The Norwegian Film Commision, sum skal fáa útlendskar filmsframleiðslur til Noreg, í Bergen og við at stuðla filmsmiðstøðum og grunnum í Bergen, Trondheimi og Tromsø. Og lutvíst hava fleiri útjaðaraøki tikið egin stig til at fremja filmsvinnu í sínari región og hava orðað visiónir um at gera øki teirra til fakligar deplar innan filmsvinnuna.

> "Regional filmindustri kan gi arbeidspladser og et bredt spekter av yrker, som tiltrekker unge i deres karrierevalg og gjør at de blir boende. Flere steder i Norge har derfor visjoner om å bli et filmfaglig kraftsentrum. Et kappløp om å bli i fremste rekke å nå disse kulturelle og næringsmessige målsettingene er allerede i gang."[73]

Gongdin í Noreg er soleiðis merkt av eini ávísari regionalari kapping um at gerast fremstu menningardeplarnir innan filmsvinnuna. Í hesi kappingini, vísir granskarin Grete Rusten á, detta fleiri smá umhvørvi niðurímillum, tí virksemið er ov lítið og óstøðugt til at halda fast um tað kvalifiseraðu arbeiðsmegina.[74] Tær regiónirnar, sum standa sterkast í hesi kappingini, tykjast at vera Bergens-økið, Trondheim og Tromsø. Tað kunnu ávísast fleiri orsøkir til hetta, men Grete Rusten metir, at ein týdningarmikil ávirkan er, at hesar býirnir hava universititet og hægri háskúlar, ið bjóða útbúgvingar til filmsvinnuna.[75]

Ein annar týdningarmikil menningarmøguleiki hjá norskari filmsvinnu er áhugin hjá útlendskum filmsframleiðarum at nýta Noreg sum *location*. Her standa nøkur av útjaðaraøkjunum munandi sterkari enn miðsavnaða vinnan í Oslo, tí tað er tann stórslidna náttúran, sum er áhugaverd hjá útlendsku framleiðaranum at gera filmsupptøkur í, og ikki býirnir. Teir eftirspyrja stórfingin landsløg við fjallalendi og stórum fjørðum, ið eru órørd av sivilisatiónini, men kortini liggja nær við altjóða flogvallir og onnur flutningsknútapunkt.[76] Her standa Bergen, Trondheim og Troms aftur sterkt. Til tess at stuðla upp undir hendan menningarmøguleikan í filmsvinnuni, setti norska stjórnin í 2006 í verk eina royndarskipan, har útlendskir filmsframleiðarar fáa endurgoldið 15% av útreiðslunum, ið teir brúka í sambandi við filmsframleiðslu í Noreg.[77]

---

[73] Rusten (2005), s. 145.
[74] Sama, s. 172-173
[75] Sama, s. 157f.
[76] Sama s. 156.
[77] Sama s. 157.

Grete Rusten vísir eisini á, at alla staðni har filmsvinna er komin í gongd í Noreg , hevur tað eisini verið ein avgerandi fyritreyt, at tað finnast eldsálir á staðnum, sum hava havt vilja og evni at dríva gongdina frameftir. Summar regionalar filmssatsingar "er nermest drevet takket være profilerte ildsjeler". Hon vísir tó eisini á, at tað kann vera ein sera sárbar strategi, at lata ov nógv hvíla á eldsálunum – tað má skapast ein vinnuligur bygnaður, sum kann bera í longdini, eisini tá eldsálirnar falla frá ella fara víðari til aðrar avbjóðingar.[78]

Í Noreg vóru í 2004 framleiddir 20 spælifilmar, og statsligi stuðulin til filmsframleiðslu var 240 milliónir NOK.

### 1.5 Menning av regionalari filmsvinnu í Danmark.

Seinastu 15 árini hevur danska filmsvinnan verið í listarligum og fíggjarligum uppgongutíðum. Ávirkanin frá *Dogme 95* tiltakinum hjá Lars von Trier og øðrum og tann listarliga og nýskapandi orkan, sum kom haðani, eigur ein part av æruni fyri hesum, men eisini tann mentanarpolitiski bygnaðurin og landslagið av útbúgvingar- og mentanarstovnum, sum stuðla upp undir filmsvinnuna, hava verið avgerandi fyritreytir undir hesi menningini.[79]

Í Danmark hevur tað verið altjóðagerð heldur enn regionalisering, ið hevur skapað nýggj mynstur og nýggjar leiðir í filmsvinnuni, ikki minst gjøgnum ein aktør sum Zentropa, ið hevur sett sera nógv virksemi í gongd, eins og DR hevur framt stórar satsingar upp á sjónvarpsrøðir, sum hava verið framleiddar í samstarvi við aðrar danskar og norðurlendskar aktørar. Menningin hevur verið miðsavnað í og kring Keypmannahavn, har tey stóru feløgini, útbúgvingarstovnarnir og landsstovnarnir innan filmsvinnuna liggja. Millum størstu aktørarnar eru áðurnevnda Zentropa og danski filmsskúlin, umframt det Det Danske Filminstitut, sum bæði er veitari av almennum stuðli til danska filmsframleiðslu, men sum eisini rekur ymiskt virksemi filmslistini at frama, s.s. filmssavn, DFI-filmworskhop, Center for Børne- og Ungdomsfilm og Film X, ið er eitt interaktivt film studio fyri børn og ung.

Tó er eisini komin gongd á eina meira desentrala menning í Danmark, har kommunalir myndugleikar hava sett pengar av til at draga filmsvinnu til øki, ið liggja uttan fyri Keypmannahavn. Seinastu árini er ein ávís regionalisering tí eisini farin fram í donsku filmsvinnuni. Tey mest markantu av hesum tiltøkunum eru Filmby Århus og Film Fyn.[80]

Hesi umboða tvær heilt ymiskar strategiir fyri at menna filmsvinnuna í økjum sínum.

Í Filmby Århus hava kommunan og amtið (nú regiónin) valt at seta pening í at byggja upp framleiðsluhøli og skrivstovuhøli fyri at skapa eitt audiovisuelt *cluster* (tyssi) av fyritøkum við filmsframleiðslu sum felags umsnaringarpunkti. Satsað verður upp á, at hendan miðsavnanin í næst størsta býnum í Danmark fer at draga fyritøkur til sín og soleiðis tryggja eitt varandi førleikalyft.[81]

Film Fyn, sum er fíggjað av fyrrverandi amtinum, nú regiónini, og kommunum á Fjóni, setir ikki pengar sínar í múrsteinar, men roynir aktivt at brúka pening sín til at halda eitt høgt framleiðsluvirksemi. Tað stóra framleiðsluvirksemið hevur borið við sær, at eitt filmstudio er stovnað í einari niðurlagdari verksmiðju. Film Fyn stuðlar ikki for-framleiðslu og menning av

[78] Sama, s. 172.
[79] Jørgensen 2005, s. 83-84.
[80] Sama, s. 94 og 99.
[81] Sama, s. 105.

handritum, men miðar eftir at byggja upp eitt undirstøðukervi og ein lokalan kunnleikagrunn, sum ger regiónina lokkandi sum framleiðslustað – eisini tann dagin, tá núverandi almenni stuðulin fellur burtur ella minkar munandi.[82]

Báðar hesar nevndu verkætlanirnar uppfata seg sum vinnupolitisk tiltøk, hvørs endamál er at skapa búskaparligt virksemi í nærøkinum. Báðar verkætlanirnar samstarva við Det Danske Filminstitut, hvørs ráðgevarar/konsulentar eiga listarligu avgerðirnar um filmsverkætlanirnar, meðan regionalu verkætlanirnar fáa til vega restfíggingina og fáa afturfyri skapað lokalt búskaparligt virksemi og fáa víst landslut sín og umhvørvi sítt fram á hvíta løriftinum.[83]

### 1.6 Menning av filmsvinnuni í Íslandi.

Tá talan er um regionala menning av filmsvinnu í norðurlendskum høpi, er helst rættast at meta Ísland sum eina región, tá tað kemur til støðd og samfelagsbygnað.

Íslendska filmsvinnan hevur ment seg stórliga síðani umleið 1990. Síðani 1995 eru framleiddir millum tveir og níggju spælifilmar um árið, og í miðal hava íslendingar framleitt 6 spælifilmar um árið seinastu 10 árini.[84]

Mentanarpolitiskt stuðlar íslendska stjórnin filmsgerð gjøgnum íslendska filmsgrunnin, sum verður umsitin av Íslendska Filmsdeplinum, ið er ein stovnur undir íslendska útbúgvingar- og mentamálaráðnum. Stuðul úr filmsgrunninum verður bara latin íslendskum filmum. Í 2004 var játtanin hjá filmsgrunninum 288 milliónir ISK ella 24 milliónir DKK.[85]

Í 1999 samtykti Altingið eina skipan, har íslendski staturin gjaldar filmsframleiðarum 14% aftur av teimum útreiðslum, ið teir hava í sambandi við filmsframleiðslu í Íslandi. Fram til 2004 vóru játtaðar umleið 570 milliónir ISK ella 47 milliónir DKK sambært hesi lógini.[86] Hendan skipanin vendir sær bæði til íslendskar og útlendskar filmsframleiðarar, og 9 av teimum tilsamans 21 filmunum, ið fram til 2004 høvdu fingið stuðul útgoldnan eftir skipanini vóru burturav útlendskir filmar, har ímillum fleiri stórar framleiðslur úr Hollywood.

Eitt triðja týðandi filmspolitiskt tiltak er skrivstovan *Film in Iceland*, sum er partur av *Invest in Iceland* marknaðarføringini hjá íslendska útflutningsráðnum. *Film in Iceland* marknaðarførir Ísland sum filmsframleiðsluland bæði viðvíkjandi fíggjarligu fyrimununum, sum útlendskir framleiðarar kunnu fáa í Íslandi, viðvíkjandi teimum møguleikunum fyri *locations,* sum Ísland hevur við síni fjølbroyttu náttúru, og viðvíkjandi teimum tænastum, ið íslendska filmsvinnan kann veita.[87]

Ísland luttekur harumframt í bæði norðurlendskum og evropeiskum filmssamstarvi, og íslendskir filmsframleiðarar hava soleiðis eisini møguleikar at fáa fígging til sínar filmar gjøgnum samstarv við framleiðarar uttanlands.

Útbúgvingartilboð innan vinnuna og eitt ríkt mentanarlív, við ríkisstuðlaðum sjónleikarhúsum, søvnum, kringvarpi og útbúgvingarstovnum eru eisini ein týdningarmikil partur av tí

---

82 Sama.
83 Sama.
84 Skúladóttir 2007, s. 185, Film in Iceland 2006 og 2007.
85 Sama, s. 186.
86 Sama, s. 183.
87 Film in Iceland 2007.

undirstøðukervi, sum ger tað gjørligt hjá Íslendingum at framleiða filmar, sum í fleiri førum eru kappingarførir í dygd á altjóða og evropeiska marknaðinum.

Filmspolitiskt arbeiðir Ísland sostatt við bæði vinnupolitiskum og mentanarpolitiskum strategium, og tað er eingin ivi um, at tað er ein samvirkan millum hesar strategiir, sum er grundarlagið undir teirri jaligu gongdini, sum íslendska filmsvinnan hevur verið í seinastu árini.

Nærri verður greitt frá íslendsku filmsvinnuni og íslendskum filmspolitikki í kapitli 4.2.

## 2. Støðan í Føroyum, sum er.

Í hesum partinum skal roynt vera at gera eina stutta lýsing av støðuni viðvíkjandi filmi og filmsgerð í Føroyum, sum hon er í løtuni.

### 2.1 Søguligt afturlit.

Søguliga hevur filmsvirksemið í Føroyum verið sera avmarkað. Og tað, ið er blivið upptikið er ofta ikki varðveitt fyri eftirtíðina. Eitt filmssøguligt savn, sum kundi tikið hond um gamlar filmar og varðveita teir fyri eftirtíðina, er tí bráneyðugt. Hetta kundi verið gjørt í samstarvi við sjónvarpið hjá Kringvarpi Føroya, sum í nógv ár hevur havt sera vánaligar umstøður at goyma gomlu bond síni, og sum tí er í vanda fyri at missa nógv av tí elsta tilfarinum med alla.

Vit vita um nakrar filmar og filmsupptøkur, sum føroyingar hava gjørt gjøgnum tíðirnar, harav ikki alt er varðveitt, og harumframt vita vit um nakrar filmar, sum útlendskir filmsframleiðarar hava gjørt í Føroyum.

Í 1920 gjørdi sviin Nordenskjold ein film í Føroyum, sum var ein blandingur av dokumentari og spælifilmi. Nordenskjold fekk fólk at spæla leiklutir í myndum, sum lýstu gerandisdagin í Føroyum tá. M.a. eru myndir úr stóru Dímun, tá slaktineyt skulu flytast av oynni.

Í 1952 upptóku eysturtýskarar ein spælifilm í Føroyum, sum nevndist *Schatten über den Inseln* (www.filmportal.de), hetta var ein løgin eyðkendur eysturtýskur propagandafilmur.

Í 1953 innspældu norðmenn filmin *Selkvinnen*, sum bygdi á søgnina um kópakonuna. Filmurin varð lutvíst upptikin í Nolsoy, og tá nólsoyingar hildu mentanarstevnu í 2003, fingu teir fatur í einum kopii av filminum og vístu hann. Um áhugin í Nolsoy í 2003 var stórur, so var hann heldur lakari í Noreg, tá filmurin kom fram í 1953. Hann gjørdist tað størsta floppið í norskari filmssøgu og varð beinleiðis orsøkin til, at táverandi filmsstuðulsskipanin í Noreg varð avtikin.

#### 2.1.1 Nakrar royndir innan dokumentar- og spælifilmar: 1950-1980.

Áðrenn sjónvarpið varð stovnað í Føroyum, vóru bert heilt fáar royndir gjørdar at gera føroyskar dokumentarfilmar.

Ein, ið íðiliga royndi at gera upptøkur og dokumentera persónar og gerandislív í tíðarskeiðnum frá seinast í 1950'unum til miðskeiðis í 70-árunum, var Jákup Andreas Arge. Eftir hann liggja nógvir tímar av upptøkum, ið hann eisini av sínum eintingum hevur latið talgilda og soleiðis varðveita fyri eftirtíðina. Jákup Andreas Arge lat í nógv ár upptøkur til Danmarks Radio. Millum filmarnar, sum eru eftir Jákup Andreas Arge, eru *Færøerne i dag*, ein dokumentarfilmur um Føroyar frá umleið 1969, sum varð sendur í donskum sjónvarpi. Harumframt er filmurin *Kornið í Føroyum*, sum dokumentarar, tá korn varð heystað fyri seinastu ferð í Húsavík. Filmurin fylgir við, tá akurin verður skorðin, kornið bundað, treskjað og malið og at enda síggja vit eisini drýl verða bakaðan úr korninum. Filmarnir hjá Jákupi Andreasi Arge vóru ikki kendir av almenninginum, fyrr enn teir vórðu latnir Sjónvarpi Føroya, sum vísti teir í 2003. Filmur var eitt sera dýrt ítriv, og Jákup Andreas Arge søkti seinast í 60'unum og í byrjanini av 70'unum Føroya Landsstýri um stuðul til útgerð, filmsrullur og framkalling í sambandi við filmsarbeiði sítt. Umsóknirnar vórðu sýttar.

Í 1974 gjørdi Arni Nørrevang tríggjar sjónvarpssendingar fyri Danmarks Radio um Føroyar. Arne Nørrevang legði sendingarnar til rættis, meðan eitt framleiðslulið úr Danmark stóð fyri upptøkunum.

Tann mest ambitiøsi føroyski dokumentarfilmurin, sum hevur verið gjørdur, áðrenn sjónvarpið kom, er *"Tríggir varðar"*, sum Eyðun Johannesen gjørdi í 1975. Hetta er ein filmur, ið lýsir teir tríggjar høvundarnar Heðin Brú, Christian Matras og Rikard Long. Eyðun legði filmin til rættis, men hevði eitt framleiðslulið úr Danmark at gera upptøkurnar.

Frá 1974 til umleið 1977 gjørdi spaniólin Miguel Hidalgo, ið var sera eldhugaður fyri filmi, nakrar spælifilmar í 8 og 16 mm formati við føroyskum áhugaleikarum í leiklutunum. Hesir vóru *"Rannvá"* í 1974, *"Páll Fangi"* í 1975 og *"Heystblómur"* í 1977. Filmarnir vóru vístir alment í Føroyum og gingu fyri fullum húsum í skúlahøllum og bygdarhúsum kring landið. Filmarnir hava ongantíð verið vístir í føroyskum sjónvarpi, og eingi eintøk eru av teimum í Føroyum. Hesir filmarnir vóru helst ikki serliga góðir filmslistarliga, men teir høvdu verið áhugaverdir at havt og sæð aftur, sum dokument fyri sína tíð.

Aðrir føroyskir spælifilmar hava ikki verið framleiddir, fyrr enn Katrin Ottarsdóttir byrjaði sítt virki sum filmsleikstjóri í seinnu helvt av 80'unum.

### 2.1.2 Sjónvarpið og filmsframleiðsla.

Í 1984 byrjaði Sjónvarp Føroya sítt virksemi. Sjónvarpið legði frá byrjan av dent á tíðindatilfar og dokumentarfilmar við lýsingum av fólkalívi í Føroyum. Dokumentarfilmar við meira tematiskum ella listarligum innihaldi hevur verið sera lítið av í sjónvarpinum. Framleiðslan av fiktión í sjónvarpinum hevur verið avmarkað. Katrin Ottarsdóttir starvaðist í sjónvarpinum í byrjanini og gjørdi m.a. ein stuttfilm, ið nevndist *"Eitt kvøld í býnum"*. Aðrar fiktiónsframleiðslur hava í høvuðsheitum verið barnasendingar og jólakalendarar. Kendast eru helst "Dólgarnir" frá seinast í 80 árunum, "Vættrarnir í Galdralandi" frá 1992 og millum teir størru og meira ambitiøsu telist tann seinasti "Jól í vitanum" frá 2006. Spælifilmar fyri vaksin hava verið fáir. "Stjórin er á floti" frá 1987 var ein krimisøga, ið bygdi á eitt handrit eftir Øssur Winthereig. Aðrar filmsverkætlanir hava mest verið satiriskir stuttfilmar, s.s. "Gálgin" eftir Bjarka Thomsen frá 1992 og "Pipar og Salt" skemtirøðirnar. Men annars hevur sjónvarpið gjørt lítið burtur úr filmsfiktión ella dokumentarfilmum, sum miða eftir einum filmslistarligum úttrykki ella einari filmslistarligari viðgerð av einum evni.

### 2.1.3 Útlendskar filmsframleiðslur í Føroyum

Gjøgnum árini hava nakrir útlendskir spælifilmar verið innspældir í Føroyum. Talan hevur í øllum førum verið um lútvísa innspæling í Føroyum, har bara teir partarnir av filmunum, sum fara fram í uttandura umhvørvi í Føroyum, eru innspældir her, meðan inndura myndirnar eru upptiknar í filmstudium uttanlands. Hesir filmar hava havt avmarkaða ávirkan á filmslistarliga virksemið í Føroyum, lutvíst tí at langt hevur verið ímillum teir, og lutvíst tí, at fáir føroyingar hava verið knýttir at teimum. Taka vit tíðarskeiðið 1960-2006 hava 4 útlendskir spælifilmar verða innspældir í Føroyum. Í 1960 gjørdu danir skemtifilmin *"Tro, håb og Trolddom"* við handriti eftir Erik Balling og William Heinesen. Í 1961 var ein svensk-týskur filmur gjørdur yvir bókina Barbara eftir Jørgen Frantz Jacobsen; hesin filmurin flutti søgugongdina til samtíðina, og svenska Harriet Andersson spældi høvuðsleiklutin. Í 1996 var so *Barbara* hjá Niels Malmros innspældur og frumsýndur í 1997. Í 1998 spældu íslendingar inn ein spælifilm her, sum nevndist *"Dansinn"* og bygdi á stuttsøguna

hjá Williami Heinesen *"Her skal danses"*. Harumframt hava gjøgnum árini verið danskar og onkur svensk sjónvarpsframleiðsla, har einstakir partar hava verið upptiknir í Føroyum.

### 2.1.4 Føroyskir spælifilmar.

Allir føroyskir spælifilmar higartil, sum hava verið framleiddir á einum yrkisligum grundarlagi, knýta seg at filmsleikstjóranum Katrin Ottarsdóttir, sum var útbúgvin frá Den Danske Filmskole í 1984. Filmarnir hjá Katrin higartil eru "*Atlantic Rhapsody – 52 myndir úr Havn"* frá 1989, *"Hannis"*, barnafilmur, ið var partur av einari norðurlendskari film-trilogi frá 1992, "*Maðurin, ið slapp at fara*", sjónvarpsfilmur, framleiddur til danska sjónvarpið í 1995 og "*Bye Bye Bluebird*", ein føroyskur roadmovie frá 1999 og fyrsti veruligi spælifilmurin hjá Katrin Ottarsdóttir. Katrin Ottarsdóttir arbeiðir gjøgnumgangandi við áhugaleikarum í filmum sínum. Filmarnir eru eyðkendir við, at søgurnar og handritini eru spennandi og nýhugsandi í einum føroyskum samanhangi, men at persónliga leikstjórnin av áhugaleikarunum ikki megnar at forloysa persónarnir í filmunum leiklistarliga, við tí úrsliti at vantandi royndirnar og førleikarnir hjá sjónleikarunum verða útstillaðar á løriftinum. Katrin Ottarsdóttir hevur í fleiri samrøðum við føroyskar fjølmiðlar greitt frá, at hon sjálv hevur arbeitt fyri at reisa pening til framleiðslurnar av filmum sínum, og at hetta er farið við tí nógva av arbeiðsorku hennara gjøgnum árini.

Katrin Ottarsdóttir fekk í 2007 tillutað 3 ára starvsløn frá Mentanargrunninum at arbeiða við filmslist í Føroyum.

## 2.2 Films- og videoframleiðsla í dag.

Landslagið innan føroyska films- og videoframleiðslu er enn sera avmarkað. Tað eru eingir stuðulsmøguleikar til filmsframleiðslu og eingin siðvenja fyri filmsframleiðslu. Og bæði professionella umhvørvið og undirgrundsumhvørvið eru sera avmarkað.

Stórt sæð einasta filmsumhvørvið uttan fyri kringvarpið og lýsingarvinnuna er tað, sum knýtir seg at miðlaverkstaðnum Klippfisk.

Klippfisk hevur í 2008 fingið stuðul frá Tórshavnar Kommunu at seta ein dagligan leiðara í starv og er í ferð við at byggja eitt undirvísingar- og framleiðsluumhvørvi upp.

### 2.2.1 Sjónvarp

Innan sjónvarp er framvegis bara tann eina sjónvarpsstøðin, sum Kringvarp Føroya rekur. Fyrrverandi eigararnir av Rás 2 hava boðað frá, at teir eru á veg við einari nýggjari føroyskari sjónvarpsrás, sum skal senda á handilsligum grundarlagi.

Ivasamt er, um pláss er fyri eini sjónvarpsstøð á handilsligum grundarlagi, so leingi *public service*-kringvarpið eisini sendir handilslýsingar. Almenna sjónvarpið hevur ein avgjørdan kappingarfyrimun, eftirsum tað hevur meiri pening at framleiða sendingar, sum hava áhuga hjá lýsarunum. Meginparturin av lýsingarinntøkunum hjá almenna sjónvarpinum stavar frá lýsingum kring Dag og Viku, og tíðindasendingin hjá sjónvarpinum verður ring at kappast ímóti hjá nýggjum sjónvarpsstøðum, tá tað tað kemur til lýsingarsølu.

Um Kringvarp Føroya misti rættin at senda lýsingar og reka eydnuspøl og í staðin fekk tilsvarandi fígging yvir fíggjarlógina, so kundi hetta skapað eitt inntøkugrundarlag hjá einari ella tveimum føroyskum sjónvarpsrásum afturat. Hetta hevði verið eitt gott íkast til tess at stuðla upp undir eitt breiðari grundarlag fyri films- og sjónvarpsvinnu í Føroyum.

Almenna sjónvarpið framleiðir enn sum áður í høvuðsheitum tíðindi, reportasjukendar dokumentarsendingar, nakað av barnatilfari, eitt lítið sindur av undirhaldi og at kalla onga fiktión. Kringvarpið framleiðir eisini at kalla alt sítt sjónvarpstilfar sjálvt og keypir í sera avmarkaðan mun sendingar og tænastur uttan fyri stovnin.

Skal ein føroysk filmsvinna mennast og ein framleiðslumarknaður hava møguleika fyri at koma á føtur, er neyðugt at ein partur av sendingunum hjá almenna kringvarpinum verður lagdur út til framleiðarar uttan fyri stovnin. Slíkar áleggingar eru vanligar fyri almenn kringvørp í hinum Norðurlondunum. Hetta er sjálvandi eisini ein fíggjarligur spurningur. Kringvarpið hevur, sum er, alt ov trongar fíggjarligar karmar til at røkja sína uppgávu, og framleiðslan av sjónvarpstilfari er hareftir. Men verður játtanin til Kringvarp Føroya hækkað ella inntøkugrundarlagið hjá stovninum breiðkað á annan hátt, so eigur menningin av einari breiðari films- og sjónvarpsvinnu at vera havd í huga, um talan verður um at økja játtanirnar til kringvarpið, og tann treytin at fylgja við, at minst helvtin av øktu fíggingini skal nýtast til at keypa sendingar uttan fyri stovnin. Hetta vil gagna menningini av føroyskari films- og sjónvarpsvinnu, og eisini gera Kringvarpið minni sárbart, tá sparingar eru neyðugar.

### 2.2.2 Reklamur.

Kringvarpið er, sum er, einasta sjónvarpsrásin, sum selur lýsingarpláss til sjónvarpslýsingar. Í seinastuni er harumframt eisini um at koma gongd á biografreklamur.

Framleiðsla av sjónvarpsreklamum er stórt sæð einasta handilsliga grundarlagið undir filmsframleiðslu uttan fyri Kringvarpið. Virksemið er avmarkað við tað, at tað bert er tann rásin at senda reklamurnar í. Feløgini, ið framleiða sjónvarpsreklamurnar eru tí eisini rímiliga tætt knýtt at Kringvarpinum. Framleiðararnir av sjónvarpsreklamum kunnu býtast upp í tveir flokkar. Teir, ið framleiða nógvar, einfaldar og bíligar reklamur, t.d. tilboðslýsingar frá handlum og vøruhúsum, og teir sum framleiða fáar, tøkniliga og listarliga framkomnar og dýrar lýsingar, t.d. kampanju-lýsingar fyri telefyritøkur, peningastovnar og tryggingarfeløg. Í tí seinna bólkinum hevur ein ávís menning kunnað sæst í dygdini seinnu árini.

Áhugavert verður at síggja um ein nýggj sjónvarpsrás fer at økja um marknaðin fyri sjónvarpslýsingar ella um nýggja rásin einans fer at taka frá Kringvarpinum. Í mun til at menna føroyska films- og sjónvarpsvinnu er eingin ivi um, at tann gagnligasta loysnin er at tryggja Kringvarpinum nøktandi inntøkugrundarlag umvegis fíggjarlógina og lata marknaðin fyri sjónvarpslýsingar og eydnuspøl fíggja eina víðkan av útboðnum av føroyskum sjónvarpsrásum.

### 2.2.3 Annað

Seinnu árini er eisini vaksin fram ein marknaður fyri kunningarfilmum, sum stovnar og størri fyritøkur lata gera. Hesir eru sum oftast framleiddir av somu aktørum, sum framleiða teir meira framkomnu lýsingarfilmarnar.

Í sambandi við, at internet og breiðband gerast eins vanligar miðlar og útvarp, bløð og sjónvarp økist eisini tørvurin á føroyskum lýsingar- og kunningarfilmum til hendan miðilin.

Hóast tað hevur verið ein rívandi menning innan føroyskt tónleikalív seinastu umleið 17 árini, so hevur hetta ikki sæst aftur í framleiðslu av føroyskum sjónbandaløgum. Sjónvarpið hevur framleitt nøkur fá slík til serlig høvi, men tónleikavinnan sjálv hevur at kalla ikki nýtt orku upp á slíkar

framleiðslur. Fremsta orsøkin er helst, at eingin miðil hevur verið at vísa hesar í, eftirsum ungdómur hevur verið ein lágt raðfestur málbólkur hjá almenna sjónvarpinum.

Tað kann hugsast at sjónbandaløg gerast meira áhugaverd hjá føroysku tónleikavinnuni, nú ið alnótin gerst ein alt meiri týðandi miðil fyri útbreiðslu av tónleiki.

### 2.3 Føroyingar í filmsvinnu uttanlands.

Nakrir fáir føroyingar eru útbúnir og starvast innan filmsvinnuna uttanlands. Teir eru góð sambond at hava til filmsvinnuna í Norðurlondunum og at hava til at taka, tá serligir førleikar skulu brúkast í Føroyum. Millum føroyingar við filmsútbúgving, sum búgva uttanlands kunnu nevnast, Katrin Ottarsdóttir, filmsleikstjóri, Per Zachariassen, sjónvarpsframleiðari, Ingun Olsen, dokumentarfilmari í London, Helgi Toftegaard, framleiðari í DK. Harumframt eru fleiri ungir føroyingar í løtuni í ferð við at taka størri og smærri útbúgvingar innan film uttanlands.

### 2.4 Undirvísing í filmi í Føroyum.

Tilboðini um undirvísing innan film í Føroyum eru í løtuni sera fá. Tekniski skúlin í Havn bjóðar miðlatøkni sum eitt valfak. Studentaskúlarnir í Havn og í Eysturoynni bjóða film og sjónvarp sum vallærugrein.

Umframt hetta er so miðlaverkstaðurin Klippfisk, sum leggur karmar til undirvísingina hjá studentaskúlanum í Havn og samstarvar við Tórshavnar Kvøld- og ungdómsskúla um skeiðsvirksemi. Klippfisk hevur virkað bæði sum ein skeiðsdepil og sum ein tilfeingisdepil, har ung hava kunnað komið og lænt upptøkuútgerð og fingið atgongd til klippiútgerð í sambandi við sínar egnu filmsverkætlanir. Ein trupulleiki hevur verið, at eingin hevur formliga havt ábyrgdina av rakstrinum og útgerðini, og eingin hevur átikið sær eigaraskapin og fíggjarligu ábyrgdina fyri miðlaverkstaðnum. Klippfisk hevur higartil verið samskipað gjøgnum ókeypis arbeiði frá serliga eldsálunum Jákupi Veyhe og Jan Berg Jørgensen, og seinasta árið hava kreftirnar hjá teimum ikki reiðiliga rokkið til at hildið dampin upp í virkseminum.

Nú eru tó útlit, at Klippfisk fær eitt lyft uppeftir aftur. Eitt áhugafelag er stovnað, sum hevur ábyrgd av rakstrinum, og Tórshavnar Kommuna hevur játtað rakstrarstuðul. Í desember 2007 er nýggj útgerð keypt, og 1. apríl 2008 var dagligur leiðari fyri virkseminum settur í starv.

Ein útbygging av tilboðunum hjá Klippfisk hevur verið harðliga tiltrongd, so menningin kann koma eitt stig víðari, og við setan av leiðara er gongd sett á eina nýggja menning, sum skal økja um bæði skeiðstilboðini og framleiðsluna av dygdargóðum føroyskum stuttfilmum.

## 3. FISK 2006: Lýsing og eftirmeting.

FISK 2006 var eitt norðurlendskt filmsskeið, sum var gjøgnumført í Havn í døgunum 10.-23. juli 2006 við luttakurum úr Føroyum, Noreg, Svøríki og Finlandi. Skeiðið vendi sær til ung við royndum í at gera film ella video, og undirvísararnir vóru yrkisfilmsfólk úr Norðurlondum. Endamálið úr føroyskum sjónarhorni var at lyfta fakliga støðið hjá teimum ungu, sum fáast við film, eggja teimum til at útbúgva seg innan vinnuna og harvið stuðla upp undir menning av eini føroyskari filmsvinnu.

### 3.1 Málseting og fyrireikingar.

FISK 2006 kom í lag sum partur av eini evropeiskari verkætlan, ið táverandi Menningarstovan luttók í. Verkætlanin nevndist PICYBU (**P**articipation **i**n Rural Communities by **Y**oung **B**roadband **U**sers) og var eitt samstarv millum Troms í Norðurnoreg, Västra Norrbotten í Norðursvøríki og Lapplands Län í Norðurfinlandi. Endamálið við PICYBU, sum var partur av yvirskipaða ES-programminum NPP (Northern Periphery Programme, ið umfatar Finland, Svøríki, Noreg, Skotland og Írland), var at eggja ungum fólkum til at taka aktivan leiklut í samfelagnum gjøgnum vinnuliga nýtslu av breiðbands- og miðlatøkni. Breiðari sæð var endamálið eisini at finna fram til, hvussu samskiftistøkni kann nýtist til at skapa arbeiðs- og útbúgvingartilboð, sum kunnu eggja ungum at vera búgvandi í útjaðaraøkjunum í Norðurlondum. FISK 2006 legði seg innan fyri karmarnar á PICUBY eftir at skapa filmssamstarv millum ung úr omanfyri nevndu pørtum av Norðurlondum, at skapa filmar, sum kunnu vísast um internetið og at nýta internetið/breiðband sum amboð í hesum arbeiðinum.

Tilgongdin at skapa verkætlanina byrjaði í oktober 2005 við einum samstarvi millum miðlaverkstaðin Klippfisk og Menningarstovuna.

Mílasteinarnir í gjøgnumføringini vóru:
1. desember 2005: Verkætlanarbólkur stovnaður við umboðum fyri Klippfisk, Menningarstovuna, Felagið fyri Føroyskar Lýsingarstovur, Norðurlandahúsið og Tórshavnar Kommunu.
31. januar 2006: Fíggingarætlan klár og lærarar settir.
31. mai 2006: Lærarar og verkætlanarleiðari hava gjørt endaligan leist fyri skeiðið.
10. juni 2006: Allir næmingar upptiknir og fyrireikingar hjá næmingunum byrja.
10. juni 2006: Heimasíða til fyrireikingararbeiðið virkin.
10. juli 2006: Skeiðið byrjar.
23. juli 2006: Skeiðið endar við almennum frumsýningum av framleiddu filmunum.
Oktober 2006: Eftirmeting av skeiðnum liðug.

Orðaðu høvuðsendamálini við FISK 2006 vóru:

- At menna ung filmstalent frá luttakandi økjunum við at bjóða eitt filmsskeið á høgum fakligum stigi.
- At skapa samband millum ungar filmskaparar í norðurlendsku útjaðaraøkjunum og yrkisfólk innan norðurlendska filmsvinnu.
- At geva ungum filmsskaparum úr útjaðaraøkjunum møguleika at arbeiða við filmi á einum høgum professionellum støði og harvið geva teimum íblástur at útbúgva seg víðari innan hesa vinnuna.

- At skapa netverk millum tey ungu frá luttakandi økjunum við at fáa tey at arbeiða saman praktiskt og listarliga.
- At geva ungum úr norðurlendskum útjaðaraøkjum íblástur til at gerast aktiv listarfólk og luttakarar í samfelags- og mentanarlívinum í heimstaðarøkjum sínum.
- At stuðla hugi og vilja hjá ungum í norðurlendsku útjaðaraøkjunum at virka í heimliga umhvørvinum.
- At geva ungum úr útjaðaraøkjum í Norðurlondum møguleikar at skapa sær vinnumøguleikar innan film og sjónvarp.
- At gera útjaðaran lokkandi hjá ungum.

Visiónin var at seta gongd á menningina av vinnuligum filmsumhvørvum í luttakandi økjunum og at eggja til samstarv og netverk millum hesi umhvørvini.

Føroysku fyrireikararnir høvdu harumframt sum sítt egna endamál at eggja ungum føroyskum filmsframleiðarum at gera filmin til ein vinnuveg við at geva teimum høvi til at koma í samband roynd og virkin fólk innan yrkisfilmslistina í Norðurlondum.

Eydnukrøvini ella "succes-kriteriini", sum vóru sett til verkætlanina, áðrenn fær farið varð í gongd, vóru:
- At luttakarar skuldu vera úr øllum luttakandi londunum.
- Allir lærararnir skuldu umboða tað virknu og professionellu filmsvinnuna.
- At verkætlanin skuldi gjøgnumførast innan fyri teir givnu fíggjarligu karmarnar.
- At eftirmetingin skuldi vísa minst 90% nøgdsemi hjá næmingum og lærarum við námsfrøðiligu dygdina, skipanina av arbeiðnum og fakliga ágóðan hjá luttakarunum.

### 3.1.1 Lýsing av konseptinum.

Konseptið í FISK 2006 var at luttakararnir skuldu sjálvir arbeiða við at gera filmar og fáa vegleiðing í tilgongdini frá fýra royndum lærarum innan greinirnar leikstjórn/handrit, myndatøku, ljóð og klipping.

Arbeitt var við einfaldari tøkni, ið var løtt at handfara, tí endamálið við skeiðnum var at læra næmingarnir at brúka film sum ein forteljandi miðil og tí skuldi minst møgulig tíð brúkast upp á at seta næmingarnar inn í tøknina.

Málbólkurin var ung, sum høvdu ávísar royndir við filmi, t.d. høvdu havt film og sjónvarp sum lærugrein á miðnámsskúla ella høvdu drúgvar royndir frá arbeiði í miðlaverkstaði.

Næmingarnir arbeiddu gjøgnum alt skeiðið saman í toymum, ið vóru samansett umleið ein mánað fyri skeiðsbyrjanina og mannað tvørtur um landamørkini. Undan skeiðnum fyrireikaði hvørt toymi ein stuttan spælifilm og ein dokumentarfilm, sum skuldu framleiðast undir sjálvum skeiðnum. Ein heimasíða og ein afturlatin stevna á internetinum vóru skapað til hetta samstarvið, og har gav lærarin í handriti/leikstjórn eisini næmingunum ráð og vegleiðing.

Beinleiðis undirvísing í formi av fyrilestrum og leiðbeining var mest sum eingin, og denturin var í staðin lagdur á læring gjøgnum egnar royndir, "learning by doing". Í innleiðandi partinum av skeiðnum arbeiddu næmingarnir í toymunum og loystu praktiskar filmsuppgávur. Teir skuldu gera ein stuttan film um dagin, har denturin var lagdur á ymsar stílar: Eina jagstranarsenu, eina dialogsenu, ein rituellan film og eina fríari filmsvenjing, har uppgávan var at skapa kenslur hjá

áskoðaranum fyri einum ávísum luti. Leikluturin hjá lærarunum var so at vegleiða undir arbeiðinum og at eftirmeta úrslitið. Høvuðsuppgávan undir skeiðnum var at framleiða tann spælifilmin, sum toymini høvdu fyrireikað frammanundan, og teir seinastu dagarnar á skeiðnum arbeiddu teir næmingarnir, sum ikki vóru við í klippingini av høvuðsfilminum, við at gera ein stuttan dokumentarfilm.

Filmur er ein sera arbeiðskrevjandi miðil, og tí var neyðugt at arbeiða 13 arbeiðsdagar út í eitt uttan frídagar til tess at fáa undirvísingarætlanina at hanga saman. Lærarnir mettu undan skeiðnum, at hetta var neyðugt fyri at halda orkuni og intensitetinum í tilgongdini uppi.

### 3.1.2 Lærarar.

Lærararnir á skeiðnum vóru úr Danmark, Svøríki og Finlandi. Lærari í leikstjórn og handritaskriving var Joachim Bergenstråhle, sum er útbúgvin filmsleikstjóri og handritahøvundur frá Dramatiska Insitutet í Stockholm. Seinastu árini hevur Joachim starvast í framleiðslufelagnum Vintergatan AB, har hann serliga arbeiðir við menning av filmsverkætlanum og sum handritaráðgevi. Hendrik Bohn Ibsen er dani og undirvísti í filmsupptøku. Hann er útbúgving filmsfotografur og hevur arbeitt innan donsku filmsvinnuna í nógv ár, og hevur undirvíst á danska filmsskúlanum, serliga á dokumentarlinjuni. Lærarin í ljóði var Jyrki Saaarinen úr Finlandi, sum í nógv ár hevur starvast innan almenna finska sjónvarpið YLE, har hann hevur gjørt ljóð til bæði sjónvarpsrøðir, studiosendingar og tónleikasendingar. Undirvísarin í klipping var Anders Villadsen úr Danmark, sum hevur ein tann mest brúkti klipparin har seinastu árini – millum filmarnar, ið hann hevur klipt teljast dokumentarfilmarnir *Føroyar.dk* og *Gasolin* og spælifilmarnir *Adams Æbler*, *De grønne slagtere* og *En kort en lang.*

Verkætlanarleiðari og skeiðsleiðari var Mikkjal Helmsdal og hjálparar vóru Jákup Veyhe og Jan Berg Jørgensen frá Klippfiski. Hesir tríggir tóku sær eisini av undirvísingini í framleiðslu-leiðslu.

### 3.1.3 Luttakarar.

Upprunaliga ætlanin var at 20 luttakarar skuldu vera, sum skuldu býtast í 4 toymi á 5 luttakarar. Ætlanin var tá at hava 8 luttakarar úr Føroyum og 4 úr ávikavist Noreg, Svøríki og Finlandi. Tá av tornaði eydnaðist bara –vegna sein avboð o.a.- at fáa 1 næmingur úr Noreg, 1 úr Svøríki, meðan 5 næmingar komu úr Finlandi. Saman við teimum 8 næmingunum úr Føroyum mannaðu hesi 3 toymi á 5 luttakarar.

Ymiskt var hvussu royndir hesir luttakarnir vóru. Úr Føroyum vóru bæði sera roynd og minni roynd. Teir 5 luttakararnir úr Finlandi vóru ungir, 17-18 ár, og høvdu fingist við film og video í eitt skúlaár. Næmingarnir úr Noreg og Svøríki vóru 21 og høvdu drúgvar royndir sum ávikavist fotografur og leikstjóri.

Málið um at allir luttakandi næmingarnir skuldu hava so mikið góðar royndir, at tað t.d. ikki skuldi vera neyðugt at geva vegleiðing um tøkni og grundleggjandi filmiskan arbeiðshátt undir skeiðnum, ikki helt til fulnar.

### 3.1.4 Stuðlar og áhugapartar.

Høvuðsfyriskipari av skeiðnum var Menningarstovan/Samvit í samstarvi við partarnar í PICYBU verkætlanini. Fíggjarligir høvuðsstuðlar vóru Menningargrunnurin og Nordisk Kulturfond, ið lótu 200.000 kr. hvør. Harumframt stuðlaðu PICYBU, Mentamálaráðið, Norðurlandahúsið, Tórshavnar Kommuna, Kulturfonden Finland-Danmark og Letterstedtska Fonden verkætlanini. Sponsoríkast

vóru givin frá lýsingarfyritøkuni Sansir og frá Atlantic Airways. Harumframt var Kringvarpið ein virkin samstarvspartur, ið lænti skeiðnum høli og útgerð. At enda var Føroya Fólkaháskúli ein týdningarmikil samstarvspartur við at bjóða luttakurunum gisting fyri ein sera rímiligan prís.

### 3.2 Skeiðið.

Skeiðið bygdi á eitt grundleggjandi hugskot, sum føroysku fyrireikararnir høvdu orðað, tá søkt varð um pengar til verkætlanina á heysti í 2005.

Seinast í mai 2006 hittust fyrireikararnir og teir 4 lærararnir á arbeiðsseminari eitt vikuskifti í Føroyum. Her vóru endaligu avgerðirnar tiknar um, hvussu skeiðið skuldi gjøgnumførast námsfrøðiliga og verkliga. Arbeiðast skuldi við einfaldari útgerð, fokus skuldi vera á filminum sum frásagnarmiðil, og arbeiðið skuldi skipast gjøgnum sjálvstøðugt arbeiði við vegleiðing ("coaching"), og frálæra í tøkni og filmslæru skuldi vera sum minst.

Avgjørt var at næmingarnir skuldu arbeiða í toymum á fimm luttakarar, sum høvdu arbeiðsuppgávurnar sum ávikavist leikstjóri, fotografur, ljóðfólk, klippari og framleiðsluleiðari. Framleiðsluleiðararnir skuldu allir vera føroyingar. Skeiðið skuldi byrja við fýra døgum, har toymini skuldu framleiða ein venjingarfilm um dagin. Síðani fingu toymini 3 dagar at fyrireika innspælingina av høvuðsfilmi sínum, 3 dagar til upptøkurnar av hesum filmi og 2 dagar til at klippa og 2 dagar til ljóðeftirarbeiði. Upptøkufólkini og framleiðsluleiðararnir, sum lupu av, meðan høvuðsfilmurin varð kliptur, gjørdu so tveirmanstoymi og framleiddu ein stuttan dokumentarfilm seinastu 4 dagarnar av skeiðnum.

Somuleiðis varð tað ein partur av konseptinum, at allir næmingarnir –eisini teir føroysku- búðu og arbeiddu saman undir øllum skeiðnum.

#### 3.2.1 Undirvísingin og skeiðsgongdin.

Skeiðið fór fram 10.-23. juli 2006. Tann 9. juni vóru næmingarnir skipaðir í toymi og ein heimasíða og ein samstarvsstevna vóru stovnað á internetinum, har næmingarnir skuldu arbeiða saman um at skriva handrit og fyrireika upptøkurnar av høvuðsfilmum sínum. Tá næmingarnir komu til Føroya tann 9. juli, skuldi eitt sonevnt *treatment* av filmshandritinum fyriliggja, t.v.s. ein útgáva av handritinum, har neyvt er greitt frá øllum, sum hendir, men dialogurin enn ikki er skrivaður inn. Tvey av toymunum høvdu tó uppskot til liðug handrit, tá skeiðið byrjaði.

Gongdin í skeiðnum var hendan:

<u>1.-4. dagur:</u>
Toymini gjørdu ein venjingarfilm um dagin. At hvørjum venjingarfilmi vóru knýttar nakrar uppgávur, sum løgdu dent á ymisk øki innan filmslist og filmsarbeiði, og sum í flestu førum eisini innihildu nakrar avmarkandi reglur: Ein jagstranarsena – uttan motorakfør. Ein ritualsena – sum bara mátti verða upptikin við nærmyndum. Ein samrøðusena – við bundnum dialogi. Og at enda ein sena, ið skuldi vísa, at ein lutur hevði ella fekk lívsavgerandi týdning fyri ein persón í filminum. Toymini fingu sjónleikarar stillaðar til taks, og til innandura venjingarnar fingu teir locations at gera upptøkurnar í.

Hvørt toymi hevði eitt komplett sett av tøkniútgerð til upptøkuarbeiðið, eitt fast klippi- og arbeiðsrúm at vera í og ein bil.

Innleiðandi venjingardagarnir vóru skipaðir soleiðis:
Kl. 08.30-11.00: Spurningar til leiðararnar, prát við lærararnar um hugskotini hjá toymunum til givnu uppgávuna og fyrireiking av upptøkunum. Kl. 11.00-14.00: Upptøkur. Kl. 14.00-17.00: Klipping og eftirarbeiði. Kl. 18.00-20.00: Felags døgurði og gjøgnumgongd og eftirmeting av dagsins arbeiði.

Tilsamans 12 stuttir filmar vórðu gjørdir teir innleiðandi 4 dagarnar.

5. dagur:
Toymini fyrireikaðu upptøkurnar av høvuðsfilmi teirra. Handrit og innspælingarætlanir vóru fínpussaði undir vegleiðing frá lærarunum.

6.-8. dagur:
Toyminu tóku sínar høvuðsfilmar upp. Sjónleikarnar høvdu toymini lutvíst funnið sjálvi og lutvíst vóru sjónleikarar nýttir, sum skeiðleiðslan hevði fingið samband við gjøgnum lýsingar í fjølmiðlunum. Upptøkustøð (locations) vóru avgjørd frammanundan av toymunum sjálvum og vóru í flestu førum vald av føroysku toymislimunum og løgd fyri hini við myndum og videoupptøkum umvegis internetið.

9.-10. dagur:
Leikstjórar og klipparar arbeiddu við at klipping av myndatilfarinum til høvuðsfilmin. Ljóðfólkini fyrireikaðu ljóðklipping og ljóðeftirgerð. Framleiðsluleiðararnir og fotografarnir arbeiddu saman og fyrireikaðu og upptóku ein stuttan dokementarfilm.

11.-12. dagur:
Leikstjórar og ljóðfólk arbeiddu við ljóðklipping og ljóðeftirgerð av høvuðsfilmunum. Fotografar, framleiðarar og klipparar kliptu dokementarfilmarnar.

13. dagur.
Eftirmeting og almenn frumsýning av trimum høvuðsfilmum og trimum dokumentarfilmum.

14. dagurin var heimferðardagur hjá lærarum og útlendsku luttakarunum.

### 3.2.2 Filmarnir.
Filmarnir vóru ymiskir í dygd, men tað lá ikki í skeiðnum at samanbera teir hesum viðvíkjandi. Hvat upptøku, klipping og ljóðtøkni viðvíkti, vóru filmarnir sum heild rættiliga javnir í dygd. Munurin á filmunum sást í, hvussu greið søgan hevði verið frá byrjan av. “Avgrundin”, ið var leikstjórnað og skrivað av svenska næminginum Andreas Öhman var ein sera stramt frásøgd og dramatisk søga um kærleika og hevnd. Hinar báðar søgurnar vóru meira abstraktar. “Holið”, ið var leikstjórnað og skrivað av føroyska leikstjóranum Jóannes Lamhauge, var ein uppgerð millum faðir og son, sum var pallsett í einum veruleikafjarum umhvørvi, við eitt hol, ið pápin er í ferð við at grava úti í haganum. Sum áskoðarar síggja vit eina uppgerð millum ein juppi-son og ein arbeiðarapápa, men vit fáa ikki at vita, hvat uppgerðin ítøkiliga snýr seg um ella hvat frammanundan er hent teirra millum. Men kortini ivast vit ikki í sambandinum millum persónarnar. Triði filmurin “Bundin”, ið hevði føroyskan handritahøvund og finskan leikstjóra, royndi at lýsa sinnisstøðuna hjá einum manni, ið hevur læst seg inni í einum gomlum húsum, sum at síggja er barndómsheim hansara, og ikki torir at fara út. Okkurt er, sum bindur hann til húsið og forðar honum í at gera seg leysan. Her má áskoðarin alla tíðina gita seg til, hvat er veruligt og hvat er

hugamyndir hjá høvuðspersóninum. Hesin filmurin setti krøv til hugflogið, men hekk kortini saman gjøgnum tann óveruliga stemningin, sum gekk ígjøgnum filmin. Teir tríggir dokumentarfilmarnir vóru eisini sera ymiskir. Franklin Jacobsen hevði valt at fylgja einum klemmibólki, sum hevði sett sær fyri at býta klemm út á G-festivalinum. Andreas Høgenni fylgdi tónleikabólkinum The Story Ends, tá teir góvu sína fyrstu fløgu út. Og filmurin Ær eftir Anton Petersen og Petter Hansen, var eitt portrett eini ær hjá Torvaldi Lützen, sum gekk á beiti uppi við veðurstøðina í Hoydølum.

### 3.2.3 Eftirmetingin hjá næmingunum.

Seinasta dagin á skeiðnum svaraðu næmingarnir einum spurnarblaði við 48 spurningum um skeiðið. Tá svar teirra verða sett inn á ein stiga, har sera nøgdur er 100% og sera misnøgdur er 0%, so var miðal nøgdsemið við skeiðið hetta:

| | |
|---|---|
| Fakliga útbýtið úr innleiðandi venjingarfilmunum: | 90,1% |
| Fakliga útbýtið úr skeiðnum sum heild: | 94,7% |
| Fakliga útbýtið úr arbeiðinum við høvuðsfilminum: | 85,3% |
| Nøgdsemið við tann lidna høvuðsfilmin: | 70,7% |
| Fakliga útbýtið úr arbeiðinum við dokumentarfilminum: | 80,7% |
| Nøgdsemi við tann lidna dokumentarfilmin: | 65,3% |
| Nøgdsemið við arbeiðið hjá lærarunum sum heild: | 94,7% |
| Nøgdsemi við arbeiðið hjá einstøku faklærarunum: | 88,3% |
| Nøgdsemi við støddina á toymunum: | 933% |
| Nøgdsemi við at toymini vóru samansett tvørtur um tjóðskap: | 89.3% |
| Nøgdsemi við tøkniútgerðina og við arbeiðsumstøðurnar: | 94,0% |
| Nøgdsemi við dagliga fyriskipan, kunning og tøkniliga “support”: | 79,6% |
| Nøgdsemi við mat og gistingarumstøður: | 84,7% |
| Nøgdsemi við tað tøttu arbeiðsskránnna: | 84,0% |

Um nakrar yvirskipaðar linjur skulu dragast úr eftirmetingini hjá næmingunum, so fingu fylgjandi viðurskifti jalig skoðsmál: Professionalisman hjá lærarunum og tað góða samstarvið teirra millum. Arbeiðsviðurskiftini undir skeiðnum, herundir at útgerðin var góð og álítandi, at toymini høvdu góð arbeiðshøli og at hvørt toymi hevði sín egna bil, so lætt var at koma runt í sambandi við kanningar, fyrireikingar og upptøkur. At fyriskipan, matur og gisting virkaðu væl. At øll kendu, at tey persónliga fingu nakað fakligt burtur úr skeiðnum. Tær neiligu niðurstøðurnar vóru: Arbeiðsskráin var í so hørð og tætt pakkað. Fakliga støðið hjá næmingunum var sera ójavnt og hetta hevði í summum førum eina neiliga ávirkan á samstarvið í toymunum.

### 3.2.4 Eftirmetingin hjá lærarunum.

Lærararnir svaraðu einum spurnarblaði við 40 spurningum. Hesir spurningarnir vóru meira opnir og svarini meira kvalitativ enn í eftirmetingini hjá næmingunum. Lærararnir gjørdu sína eftirmeting nakrar vikur eftir skeiðið.

Høvuðsniðurstøðurnar hjá lærarunum vóru:

At sjálvt konseptið fyri skeiðinum vísti seg at virka væl í verki.
At næmingarnar tóku tóku arbeiðið í ótrúliga stórum álvara og gingu upp í skeiðið við stórum eldhuga.

At praktisku arbeiðsviðurskiftini hjá næmingunum vóru sera góð og virkaðu sera væl.
At dagliga tilrættaleggingin og fyriskipanin var nøktandi.
At nakrir av næmingunum tóktust at fáa sera nógv burtur úr skeiðnum fakliga.

Samstundis høvdu lærarnir hesar kritisku viðmerkingarnar:

Tað ójavna fakliga støðið hjá næmingunum hevði negativan ávirkan á námsfrøðiliga útbýtið sum heild.
Tað, at summir næmingar høvdu sera avmarkaðan forkunnleika til tað arbeiðsøkið, sum teir skuldu hava ábyrgd av í toymi sínum, gjørdi at lærararnir ikki kendu, at teir fingu givið so nógv frá sær, sum teir høvdu ynskt, og hetta hevði neiliga ávirkan á heildarupplivingina hjá tveimum av lærarunum.
Arbeiðsskráin hjá næmingunum var ov hørð, og ov lítil hvíld var løgd inn í tilgongdina.

Tríggir av teimum fýra lærarunum søgdu seg heilt víst vera sinnaðar at luttaka aftur, um líknandi skeið verða fyriskipað í framtíðini. Ongin segði seg ikki ynskja at luttaka aftur.

### 3.2.4.1 Metingin hjá lærarunum av møguleikunum fyri filmsvinnu í Føroyum.

Í sambandi við eftirmetingina vóru teir fýra lærararnir út frá sínum royndum í vinnuni bidnir um at geva síni boð upp á hvørjir møguleikar og hvørjar forðingar eru fyri at byggja eina filmsvinnu upp í Føroyum.

#### 3.2.4.1.1. Fyrimunir og møguleikar.

Teir fýra meta allir, at tann serliga føroyska náttúran og tað føroyska landslagið skapa heilt serligar karmar at gera film í: Landslagið er serstakt og órørt og skjótt at koma til frá bygdum øki. Somuleiðis meta teir at mentanin og tað serliga føroyska sinnalagið eru ein styrki, har fólk eru skjót at traðka til at loysa uppgávur ella at vera til hjálpar. Tríggir teirra nevna, at tann eldhugurin og tað arbeiðssemið, sum er millum teirra, ið longu fáast við film, er ein styrki at byggja víðari á, og somuleiðis møguleikarnar sum liggja í at samstarva við aðrar listargreinir, sum tykjast at vera í stórari menning, eitt nú myndlist, tónleikur og sjónleikur.

Lærarnir vísa eisini á týdningin av at skapa eitt umhvørvi, har nýggir føroyskir og smalir útlendskir filmar kunnu verða vístir, og sum kann verða kjarnin í einum árligum filmsfestivali, ið kann vera við til at seta Føroyar á norðurlendska og so við og við altjóða filmskortið.

Lærararnir meta, at ein góður máti at fáa gongd á eina filmsframleiðslu í Føroyum er at ein fimsdepil, ið veitir ókepis atgongd til framleiðsluútgerð til føroyskar filmframleiðarar, men afturfyri setir bindandi listarlig og professionel krøv, t.v.s. at krøv um professionellan arbeiðshátt og tøkniliga og listarliga dygd verða knýtt at ókeypis atgongdini til útgerðina.

Lærarnir meta eisini, at menningarmøguleikar liggja í at byggja víðari á tað ríka vakstarlagið innan mentan, myndlist, leiklist og tónleik, sum er í Føroyum. Tó má eitt størri forstáilsi fyri filmsframleiðslu sum disiplini skapast. Listargreinirnar mugu møtast í størri virðing hvør fyri aðrari, og tað er týdningarmikið at fáa gongd á eina filmsframleiðslu, ið ikki er knýtt at sjónvarpi, hvørs framleiðslumentan er merkt av, at tingini skulu ganga skjótt, og fyrireiking og tilrættalegging av framleiðslutilgongdini eru raðfest aftarliga.

Tað er týdningarmikið fyri menningina av einari filmsvinnu, at tað er politiskur vilji til at stuðla eini slíkari, bæði mentanarliga og fíggjarliga.

Lærarnir síggja eisini møguleikar fyri at fáa altjóða filmsframleiðarar hendan vegin, um t.d. studningsskipanir og skattafyrimunir verða givnir til tess at gera hetta áhugavert.

Joachim Bergenstråhle, ið arbeiðir við verkætlanarmenning innan svensku filmsvinnuna, metir, at um føroyingar tóku stig til og gjøgnumførdu eina altjóða filmsverkætlan á høgum listarligum støði í Føroyum vildi hetta vakt ans innan altjóða filmsheimin.

Og Bergenstråhle heldur víðari: Sum við øllum ídnaðarverkætlanum fer uppbyggingin av eini føroyskari filmsvinnu at krevja fíggjarligt áhaldni, eina góða ætlan og evni at knýta seg at dugnaligum samstarvspørtum. Annars er einki ógjørligt. Uttan at broyta veðrið. Tí má ein møgulig føroysk filmsvinna má verða bygd kring eitt gott og vælútgjørt filmsstudio.

### 3.2.4.1.2 Vansar og avbjóðingar.

Teir fýra læraranir vísa allir á, at grundarlagið undir einari føroyskari filmsvinnu her og nú er veikt: Fólkagrundarlagið er avmarkað, vinnan er lítil og fakliga støðið í vinnuni er lágt. Tað vantar bæði fakfólk og útbúgvingarmøguleikar. Harumframt eru fáir møguleikar at vísa føroyskar filmar og at kalla eingir møguleikar at fíggja teir. Tað avmarkaða framleiðsluapparatið, sum er, og teir smáu framleiðslumøguleikarnir stuðla heldur ikki upp undir kreativar hugsanir um film.

Lærararnir meta eisini, at fíggjarliga grundarlagið undir eini filmsvinnu í Føroyum er ov avmarkað, um føroyskir myndugleikar ikki seta pening í at menna vinnuna. Hetta er tó eisini galdandi í hinum Norðurlondunum.

Føroyar liggja langt av leið frá altjóða stórbýum og sambandið flogvegis og sjóvegis til altjóða metropolarnar er avmarkað, um samanborið verður við t.d. Ísland. Veðrið í Føroyum er harumframt óstøðugt, og tað dámar filmsframleiðarum illa.

Avbjóðingin liggur tí í at bøta um fyritreytirnar.

Serlig tiltøk, eitt nú studningstiltøk til filmsframleiðslur í Føroyum, kunnu gera tað áhugavert hjá útlendskum framleiðslufeløgum at koma higar.

Og eitt væl útgjørt føroyskt filmstudio vil gera, at tað ikki bara er tann vakra –men óstøðuga- føroyska náttúran, ið kann lokka útlendskar filmsframleiðarar hendanvegin.

Um ein føroysk filmsvinna skal samstarva við og fáa uppgávur frá filmsframleiðarum uttanlands, krevur tað eisini, at vinnan hevur eitt heimligt bein at standa á, t.v.s. at tað finst føroysk fígging til eina regluliga framleiðslu av føroyskum filmum. Hetta er ein mentanarpolitisk avgerð, ið má takast, og sum peningur má játtast til.

## 3.3 Niðurstøður viðvíkjandi FISK 2006.

Samanumtikið var FISK 2006 ein væl eydnað verktætlan, sum náddi settu málunum fyri innihaldi, dygd og nøgdsemi.

Niðurstøðan hjá fyrireikarunum er, at rætt er at fyriskipa fyri framhaldi av skeiðnum, t.d. annað hvørt ár. Haldast skal fast um námsfrøðiliga leistin, har skeiðið er skipað sum verkligt filmsarbeiði undir vegleiðing frá yrkisfólki innan filmsvinnuna, og at læringin fer fram gjøgnum egið arbeiði og eftirmetingar av hesum.

Semja er tó um, at í framtíðini skal arbeiðast meira miðvíst við rekruttering av næmingum, so eitt javnari fakligt støði verður tryggjað millum næmingarnar. Harafturat skal skeiðið verða eitt sindur styttri.

Klippfisk og SamVit samstarva í løtuni um at skipa ein nýggjan filmssummarskúla á sumri 2009, sum verður skipaður innan karmarnar á ES-fíggjaðu verkætlani NoCry (Northern Creative Youth) og fíggjaður við føroyskum, norðurlendskum og evropeiskum stuðli. Á filmssummarskúlanum í 2009 verður luttøka úr Føroyum, Norðurírlandi, Skotlandi, Noreg og Finlandi.

## 4. Filmspolitikkur sum vinnupolitikkur: Írland og Ísland.

Sum ávíst í innleiðandi partinum um gransking í regionalari filmsvinnu í Norðurlondum, so kann almennur filmspolitikkur vera bæði mentanarpolitikkur og vinnupolitikkur. Mentanarpolitikkurin tekur støði í mentanarliga leiklutinum hjá filminum sum miðli og miðar eftir at stuðla filmsgerð, ið kann vera ein mentarlig mótvekt í tí einstaka landinum ella landspartinum til útlendskar filmar. Mentanarpolitikkurin stuðlar einstaklingum og verkætlanum fyri teirra innihald. Vinnupolitikkur tekur støði í at nýta filmsvinnuna til at skapa arbeiðspláss, menna førleikar og gera eitt land ella eitt øki lokkandi hjá fólki at búseta seg í ella fyritøkum at stovna virksemi í. Vinnupolitikkurin leggur dent á at stuðla upp undir vinnuliga undirstøðukervið hjá eini vinnu og at stuðla virksemi, sum beinleiðis ella óbeinleiðis elvir til annað vinnuligt virksemi.

Í Norðurlondum hevur statsligi filmspolitikkurin yvirhøvur verið ein mentanarpolitisk strategi, meðan tann regionali filmspolitikkurin, ið er vaksin fram seinastu árini ofta hevur bæði mentanarpolitisk og vinnupolitisk mál.

Ísland og Írland eru dømi um evropeisk lond, hvørs stjórnir hava bæði eina mentanarpolitiska og eina vinnupolitiska strategi til menning av filmsvinnuni. Serliga í Írlandi er vinnupolitiska strategiin grundarlag undir einum stóri parti av tí virkseminum, sum fer fram í filmsvinnuni, og teirri menningini av førleikum og undirstøðukervi, sum írska filmsvinnan hevur upplivað síðani miðskeiðis í 90-árunum.[88]

### 4.1 Írland sum dømi.

Írland stuðlar síni filmsvinnu beinleiðis og óbeinleiðis við eini røð av mentanarpolitiskum tiltøkum, t.d. beinleiðis stuðul til írskar filmar, alment fíggjað írskt sjónvarp, almennir útbúgvingarstovnar, sum útbúgva arbeiðsmegi til vinnuna, almenn sjónleikarhús og aðrar mentanarstovnar, ið skapa livikor til arbeiðsmegina, ið filmsvinnan hevur tørv á, t.d. sjónleikarar, handritahøvundar, pallmyndateknarar o.o.

Menningin í írsku filmsvinnuni tók dik á seg í 1993, tá Írska Filmsnevndin, The Irish Film Board, var endurstovnað og fór at virka sum almennur stuðulsstovnur fyri filmslistina.[89]

Umframt mentarpolitisku tiltøkini hevur Írland eina røð av vinnupolitiskum strategium, sum gera tað lokkandi hjá útlendskum filmsfeløgum at framleiða filmar sínar í Írlandi og lønandi hjá fyritøkum og einstaklingum at arbeiða innan filmsvinnuna har.

#### 4.1.1 Vinnupolitisk tiltøk til fremjan av írskari filmsvinnu.

Eitt tað týdningarmesta stigið til tess at fáa útlendskar filmsframleiðarar til Írlands er tann sonevnda Section 481 í írsku skattalógini.[90] Section 481 inniber eina afturbering til útlendskar filmsframleiðarar av peningi, ið verður nýttur til filmsframleiðslu i Írlandi. Útlendskir filmsframleiðarar kunnu fáa 20% av teimum útreiðslunum, ið teir brúka til filmsframleiðslu í Írlandi afturgoldnar frá írska statskassanum. Loftið fyri samlaðu útreiðslunum, ið endurgjald kann veitast

[88] The Irish Film Board (2006), s. 8.
[89] The Irish Film Board (2007), http://www.theirishfilmboard.ie/financing.php?id=5
[90] The Irish Film Board (2006), s. 8.

fyri, er 35 milliónir evrur (262,5 milliónir krónur), t.v.s. at ein útlendskur filmsframleiðari kann spara 7 milliónir evrur (52,5 milliónir krónur) við at leggja eina stóra filmsverkætlan í Írlandi.[91]

Írland roynir eisini miðvíst at fáa fólk við listarligum evnum innan handritaskriving, skaldskap, tónleik og myndlist at búseta seg í Írlandi. Hetta verður gjørt við skattafrítøku av inntøkum fyri listarverk, sum merkir at listarfólk, sum eru búsitandi í Írlandi, gjalda ikki skatt av inntøkum, sum stava frá upphavsrætti til ella sølu av teirra egnu upprunalistarverkum, s.s. filmshandritum, skaldsøgum, tónleikaverkum, visuellum verkum o.ø.

Í 2000 setti Írland í gildi í ES-konventiónini um samframleiðslur av filmum. Við hesum fingu írskir filmsframleiðarar atgongd til ES-stuðulsskipanirnar fyri samframleiðslum av filmi í Evropa.

Eitt annað, ið kann draga útlendskar fyritøkur til Írlands, er partafelagsskatturin, sum við 12,5% er tann lægsti í Evropa. Írland er eisini sera lagaligt, tá tað kemur til tulking av dupultskattaavtalum við onnur lond, soleiðis at fyritøkur sum hava inntøkur í fleiri londum ongantíð nýtast at gjalda meira tilsamans í skatti enn tey 12,5%.

Harumframt rekur írski staturin fleiri stovnar, ið veita tænastur til írskar og útlendskar filmsframleiðarar, eitt nú The Irish Film Commision og The Irish Film Board. The Location Services Unit er ein tænastudepil undir The Irish Film Board, ið veitir filmsframleiðarum, ið ynskja at kunna seg um møguleikarnar fyri at framleiða filmar í Írlandi. Depilin veitir filmsframleiðarum atgongd til ein umfatandi location-dátugrunn við talgildum myndatilfari frá upptøkustøðum/locations í øllum Írlandi og til ein framleiðsludátugrunn við upplýsingum um tøkar sjónleikarar og fyritøkur, ið kunnu veita roynda arbeiðsmegi til upptøkurnar og karmar og útgerð til filmsframleiðsluna. The Location Unit veitir eisini upplýsingar um skattareglur og miðlar samband millum filmsframleiðarar og almennar myndugleikar, fyritøkur og stovnar kring alt Írland.[92] Gjøgnum hesa tænastuna verður Írland sum location og framleiðsluland við lagaligum skatta- og fíggjartreytum marknaðarført miðvíst mótvegis filmsframleiðslufyritøkum í Onglandi, Evropa og USA. Á henda hátt er tað seinasta 10-15 árini eydnast at fáa amerikonsk og ensk filmsfeløg at leggja stórar filmframleiðslur í Írlandi, t.d. King Arthur, Saving Private Ryan, Braveheart og In America.[93]

Umleið 50 fyritøkur, sum veita heildartænastur til filmframleiðslu virka í Írlandi, har eru umleið 1600 free-lance yrkisfólk tøk innan filmsvinnuna og árliga verða 15-20 spælifilmar, 8-10 sjónvarpsrøðir og umleið 40 styttri spælifilmar framleiddir í Írlandi, umframt óteljandi dokumentarfilmar og lýsingarfilmar.[94]

### 4.1.2 Fyritreytir fyri menning av filmsvinnuni í Írlandi.

Írland hevur nakrar fyrimunir sum land, ið hava verið viðvirkandi til, at filmsvinnupolitisku tiltøkini, ið eru nevnd omanfyri, hava verið so mennandi fyri filmsvinnuna seinastu 15 árini.

Fyriuttan skattafyrimunirnar, sum útlendskar fyritøkur fáa við at leggja virksemi sítt í Írlandi, hevur Írland eitt gott veðurlag, har er eitt sera fjølbroytt landslag og fjølbroyttur arkitekturur, har er nógv órørd náttúra, sum er løtt at koma til, landið hevur sera gott ferðasambandi við umheimin og enskt

[91] The Irish Film Board (2007), http://www.theirishfilmboard.ie/financing.php?id=5
[92] The Irish Film Board (2006), s. 6.
[93] Sama, s. 2.
[94] Sama, s. 10.

er høvuðsmálið í landinum og hetta ger tað lætt hjá útlendingum, ikki minst amerikanarum og onlendingum at arbeiða í Írlandi.

Ikki minst hetta seinasta ger, at írskir filmar og sjónvarpsframleiðslur eisini hava ein munandi størri marknað enn bara Írland sjálvt, og dugnalig írsk filmslistarfólk hava somuleiðis ein stóran arbeiðsmarknað at virka á.

Ein onnur fyritreyt er tað ríka mentanarlívið, sum finst í Írlandi, við statsfíggjaðum mentanarstovnum so sum sjónvarpi, sjónleikarhúsum, mentanarhúsum, operahúsum v.m.

Undir almenna írska sjónvarpinum IBC eru fleiri smáar sjónvarpsstøðir, har smáar framleiðslufyritøkur hava møguleikan at fáa fótin inn um í vinnuni við at bjóða seg fram at gera smáar og bíligar framleiðslur. Á einum marknaði sum tí írska er hørð kapping um teir stóru og inntøkugevandi uppgávurnar, og hetta er eisini við til at hækka støðið í vinnuni sum heild.

### 4.2 Ísland sum dømi.

Í Norðurlendskum høpi hevur Ísland verið undangonguland tá tað kemur til at stimbra filmsvinnuna við vinnupolitiskum tiltøkum. Íslendska filmsvinnan hevur ment seg í stórum seinastu 15 árini. Lutvíst tí, at Ísland mentanarpolitiskt hevur valt at fíggja størri filmsvirksemi og lutvíst tí, at íslendska stjórnin gjøgnum íslendska útflutningsráðið hevur samstarvað við films- og ferðavinnuna um at marknaðarføra Ísland sum upptøkustað/location fyri útlendskar filmar. Hetta hevur, havt við sær, at nógvir útlendskir stórfilmar lutvíst eru upptiknir í Íslandi, eins og eitt stórt tal av útlendskum lýsingarfilmum, t.d. fyri bilum, eru upptiknir har.

#### 4.2.1 Filmspolitisk tiltøk í Íslandi:

Filmspolitisku tiltøkini í Íslandi eru lutvíst mentanarpolitisk, t.v.s. beinleiðis stuðul til framleiðslu av íslendskum filmum og íslendskum sjónvarpsrøðum. (Seinastu 10 árini eru framleiddir 6 spælifilmar í miðal í Íslandi. Harumframt eru fleiri sjónvarpsrøðir gjørdar.)[95] Og lutvíst eru tiltøkini vinnupolitisk.

Týdningarmesta vinnupolitiska tiltakið til tess at fáa útlendskar filmframleiðslur til Íslands er skipanin, ið gevur útlendskum filmsframleiðarum eina afturbering frá íslendska ríkiskassanum upp á 14% av samlaðu útreiðslunum, sum teir brúka upp á filmsframleiðslu í Íslandi. Hendan skipanin umfatar spælifilmar og sjónvarpsrøðir, umframt dokumentarfilmar. Skipanin umfatar ikki lýsingarfilmar og tónleikavideofilmar.[96]

Hitt týðandi vinnupolitiska stigið er stovnanin av eini serligari skrivstovu undir íslendska útflutningsráðnum, sum nevnist "Film in Iceland" og sum marknaðarførir Ísland á altjóða marknaðinum sum eitt fjølbroytt og eksotiskt location-land. Hendan marknaðarføringin upplýsir um fíggjarligu stuðulsmøguleikarnar fyri framleiðslu av spælifilmum í Íslandi og møguleikarnar fyri locations-/upptøkustøðum, sum eisini lokka nógvar framleiðarar av lýsingarfilmum til Íslands.[97]

Ísland er gjaldandi partur av Nordisk Film og TV-fond og hevur harvið atgongd til at fáa pening til norðurlendskar samframleiðslur úr hesum grunni. Ísland er harumframt gjøgnum EBS-avtaluna partur av filmssamstarvinum í ES, sum merkir, at íslendskir filmar verða viðurkendur sum

---

[95] Film in Iceland (2007a): http://www.filminiceland.com
[96] Film in Iceland (2007), s. 9.
[97] Film in Iceland (2007a): http://www.filminiceland.com

evropeiskir filmar við øllum teimum fyrimunum, sum tað inniber í sambandi fyrimunir við útbreiðslu av filmunum í ES, og at Ísland hevur atgongd til stuðulsskipanarnar hjá ES fyri framleiðslusamstarvi av evropeiskum filmum.[98]

### 4.2.2 Fyritreytir fyri menningini av filmsvinnuni í Íslandi.

"Flying in over the black sand beaches and lava fields, I could see that Iceland had the rugged and unusual look we needed for our film,"Flags of Our Fathers". I soon learned that Iceland also has friendly, hard-working people with a refreshing can-do spirit. The open roads and undisturbed countryside remind me of the way America was fifty years ago.With such gorgeous scenery, delicious fish and even golf, Iceland made for a terrific filming location." **Clint Eastwood**. [99]

Orðini hjá Clint Eastwood siga nógv av tí, sum tey, ið marknaðarføra Ísland sum filmsland, fegin vilja fáa fram: At Ísland hevur eitt heilt serligt og fjølbroytt landslag at bjóða, og at í Íslandi er dugnalig arbeiðsmegi innan filmsvinnuna. "Land of Our Fathers" frá 2006 er ein av nógvum amerikonskum stórfilmum, sum hava nýtt serligu umstøðurnar, sum Ísland hevur at bjóða og samstundis gjørt nýtslu av fíggjarligu fyrimununum, sum íslendska stjórnin bjóðar útlendskum filmsframleiðarum. Aðrir filmar hava verið *Lara Croft: The Tomb Raider* frá 2001, *James Bond – Die Another Day* frá 2002 og *Batman Begins* frá 2005.

Fyriuttan tey ítøkiligu mentanar- og vinnupolitisku stigini, ið hava stuðlað beinleiðis upp undir menningina av filmsvinnuni í Íslandi, so eru nakrar náttúrugivnar umstøður og eitt mentanarligt, vinnuligt og listarligt undirstøðukervi, sum eisini eru og hava verið ein fyritreyt fyr framgongdina í vinnuni.

Ísland hevur umframt tað almenna sjónvarpið fýra handilsliga riknar sjónvarpsstøðir, ið ið skapa eftirspurning eftir framleiðslu av sendingum og skapa marknað fyri og eftirspurning eftir lýsingarfilmum.

Almenna kringvarpið og tann størsta handilsliga sjónvarpsrásin framleiða sjónvarpsfiktión og útvarpsleikir og eru harvið ein menningarstaðir fyri handritahøvundar, leikstjórar og sjónleikarar, umframt at skapa arbeiðspláss innan filmsvinnuna.

Ísland hevur eitt virkið og alment stuðlað yrkissjónleikaraumhvørvi, við útbúgvingum innan leiklist og við fleiri yrkissjónleikarhúsum, ið uppihalda og menna eina stætt av dugnaligum sjónleikarum, leikstjórum og dramatiskum rithøvundum.

Gjøgnum almenna filmsstuðulin og gjøgnum tað virksemið, sum almenna kringvarpið og størstu handilsligu sjónvarpsstøðirnar skapa, er grundarlag hjá einum hampuliga stórum tali av yrkislærdum fólki innan filmsvinnuna at búgva og liva av yrki sínum í Íslandi. Hetta er eisini ein fyritreyt fyri, at íslendska vinnan kann veita útlendskum filmsframleiðarum eina tænastu, ið er kappingarfør við onnur filmslond.

Ísland hevur síðani miðskeiðis í 90-árunum stuðlað upp undir eina røð av fjølbroyttum tilboðum, sum hava givið ungum møguleika at royna seg við filmi og video sum miðli. Undirvíst hevur verið

[98] Film in Iceland (2007), s. 9.
[99] Sama, s. 5.

í miðlatøkni á framhalds- og miðnámsskúlin, miðlaverkstaðir hava verið knýttir at ungdómshúsum og ein 2 ára grundútbúgving í films- og sjónvarpstøkni er tøk á Filmsskóla Íslands.

Tann seinasta og helst eisini ein tann størsti fyrimunurin, ið Ísland hevur sum filmsland, er náttúran og landslagið. Ísland hevur ótrúliga fjølbroytt og serstøk landsløg. Her eru oyðimørkir, her er grønt fjallalendi, her eru jøklar, her eru hvítar og svartar sandstrendur, her eru landsløg, sum kunnu minna um aðrar gongustjørnur. Og alt hetta er skjótt og lætt at koma til frá bygdum øki, men liggur kortini í friði og verður ikki órógvað av ferðslu ella øðrum ófriði frá nútíðar samfelagnum.

## 5. Framtíðarmøguleikar fyri filmsvinnu í Føroyum.

### 5.1 Mentanarligur týdningur hjá eini filmsvinnu.

Mentanarliga tørvurin á at skapa eitt føroyskt filmsmál og og at skapa filmssøgur við føroyskum innihaldi kann samanberast við tørvin fyri 120 árum síðani at skapa eitt føroyskt skrivtmál og bókmentir við føroyskum innihaldi. Mentanarliga sæð er vegamótið, ið vit standa við nú, helst líka avgerandi, sum tá farið varð undir at skapa fyrstu føroysku bókmentirnar.

Í altjóðagjørda samfelagnum eru vit partur av einum globalum samskifti. Samstundis vísir tað seg, at hin einstaki hevur stóran tørv á at kenna seg sjálvum aftur í teimum miðlum, ið hann møtir. Tí síggja vit bæði í Norðurlondum og Evropa eina umfatandi menning innan mentanarøkið úti í regiónunum. Hetta er ikki minst galdandi innan filmsídnaðin, og í t.d. Vesturdanmark, Suður-, Vestur- og Norðursvøríki og í Íslandi hava regionalir myndugleikar sett nógvan pening í at menna filmsvirksemi og hava fingið gongd á eina lutfalsliga sera stóra filmsframleiðslu (Ísland kann í hesum høpi metast sum ein región).

Úrslitið er ikki bara, at hetta skapar arbeiði í regiónunum, men eisini –sambært kanningum- at tað skapar stoltleika hjá íbúgvunum, skapar størri gleði við at búgva í regiónunum, samstundis sum tað gerst meira lokkandi fyri onnur at flyta hagar.

Við orðunum, sum nýtt verða í granskingarverkætlanini hjá Dahlström o.fl. um filmsvinnu í norðurlendskum regiónunum, so styrkir filmsvinnan plássmarknaðarføringina, vinnuligu og mentanarligu atdráttarmegina, samleikan og sosiala kapitalin í regiónunum.

### 5.2 Vinnuligur týdningur av filmsvinnu

Filmsvinnan er tøkniliga før fyri at veita tænastur til hvønn krók av heiminum. Við alnótini hevur tað ikki longur so stóran týdning, hvar eftirarbeiðið til ein film verður gjørt, og somuleiðis er skjótt og ómakaleyst at senda upptøkur úr einum heimsparti til ein annan.

Ein føroysk filmsvinna, sum hevur førleikarnar til at gera seg galdandi, kann tí bæði tæna einum heimamarknaði og veita tænastur til marknaðir uttan fyri Føroyar.

Royndirnar frá menning av filmsvinnu í norðurlendskum útjaðaraøkjum vísa, at nógv avleitt virksemi er av filmsframleiðsluni (tænastur, bygging, flutningur, gisting, ferðavinna, o.a.) umframt, at ein sjónlig filmsvinna tykist at hava sera jaliga ávirkan á sjálvskensluna í einum lokalum øki og á evnini hjá sama øki at draga væl útbúna arbeiðsmegi og harvið arbeiðspláss til sín (smb. við dømini í Norðurlondum í kapitli 1).

Tað eru ongar grundleggjandi forðingar fyri at menna eina vinnu innan films- og videoframleiðslu í Føroyum, men tað krevur karmar og tað krevur fólk við evnum og útbúgving, og alt hetta má byggjast upp.

Tað krevur, at grundleggjandi útbúgvingartilboð verða ment, og at hesi innan nøkur ár verða lyft upp á yrkisútbúgvingarstig og til hægri útbúgvingar.

Tað krevur eisini, at gróðrarbotnur verður skaptur fyri einum fjølbroyttum vinnuverksemi innan film og video.

Um vit hyggja at royndunum frá Íslandi, Írlandi, Vestur- og Norðursvøríki, Danmark o.ø. so er gjørligt at menna eina filmsvinnu í Føroyum, sum lutvíst framleiðir føroyskar filmar og lutvíst samstarvar við útlendsk filmsfeløg.

Ein filmsvinna eigur eisini at vera við til at marknaðarføra Føroyar uttanlands, bæði sum ferðavinnuland og sum location-stað hjá útlendskum filmsframleiðarum.

Ein føroysk filmsvinna má hava minst trý bein at standa á: Framleiðslu av føroyskum fiktiónsfilmum, har meginparturin av fíggingini kemur frá mentanarpolitiskum stuðulsskipanum, sum skulu fremja framleiðslu av føroyskum filmum. Samframleiðslur við útlendskar, serliga norðurlendskar, filmsframleiðarar. Sølu av tænastum til føroyska heimamarknaðin (lýsingar, sjónvarpsframleiðslur, kunningarfilmar, tónleikavideo o.a.), sølu av tænastum til fyritøkur uttanlands og sølu av tænastum til útlendskar framleiðarar, sum velja at leggja virksemi í Føroyum.

### 5.3 Filmsvinna og árin hennara á samleika og atdráttarmegi hennara mótvegis vinnulívi og arbeiðsmegi

Í kapitli 1 varð trivið í bókina *Living on Thin Air. The New Economy* (1999) hjá C. Leadbeater, sum lýsir tað vektloysið í modernaða búskapinum, sum kemst av, at fleiri og fleiri fáa sítt livibreyð frá "tí tey hava í høvdinum"- kreativiteti, talenti og hugskotum, og ikki frá ítøkiliga framleiddum vørum. Hetta er ein gongd, ið sambært Leadbeater førir mentan og búskap tættari saman.[100]

Hetta er somuleiðis ein gongd, sum Føroyar eisini mugu taka til sín og handla eftir, soleiðis at vit skapa neyðugu fyritreytirnar fyri, at fólk kunnu liva "av tí tey hava í høvdinum". Eisini vit fáa tørv á at skapa inntøkur frá kreativum og ikki-ítøkiligum vørum og tænastum.

Í teimum norðurlendsku regiónunum, sum eru nevndar framman fyri, verður stuðul latin til filmsvinnu út frá eini meting av og trúgv upp á, at filmsvinnan setir regiónirnar á landakortið, at hon ger regiónirnar sjónligar, og at hon ger regiónirnar lokkandi at búseta seg í og styrkir samstundis staðbundna samleikan hjá teimum, ið eru har frammanundan. Og sterkari samleiki, verður mett, kann óbeinleiðis hava vinnuligan ágóða við sær, við tað sterkari samleiki gevur størri áræði at stovna nýtt virksemi ella útbyggja tað, ið ein hevur frammanundan[101].

Dømi úr Norðurlendskum regiónum: Styrking av samleika, sosialur kapitalur, arbeiðspláss og førleikamenning. Føra niðurstøður frá Film och regional utveckling i Norden yvir á føroysk viðurskifti.

### 5.3.1. Yvirskipaðar grundgevingar fyri einum filmsvinnupolitikki í Føroyum.

Í kapitlinum um gransking í regionalari filmsvinnu í Norðurlondum varð víst á, at politisku grundgevingarnar í sambandi við tann virkna regionala filmsvinnupolitikkin, ið hevur givið so ítøkilig úrslit í Noreg, Svøríki, Danmark og lutvíst Íslandi er ein mentanarpolitisk og vinnupolitisk heildarhugsan, sum tekur støði í einari øktari sannkenning í Evropa av, at mentanin spælir ein stóran

[100] Leadbeater 1999. Endurgivin í Dahlström et al (2007).
[101] Dalmström et al (2005), s. 26.

og avgerandi leiklut í vinnuligari menning í regionalum høpi.  Víst varð til niðanfyri standandi modellið fyri mentanarstrategi hjá Svensson og Adolfsson.




Mynd 3.  Trýkantur fyri mentanar og filmsvinnu strategi.  Kelda Svensson & Adolfsson (1995).

Í føroyskum høpi er týdningarmikið, at hugt verður at filmsvinnuni sum bæði eitt mentanarpolitiskt og eitt vinnupolitiskt menningartiltak.

Ein føroysk filmsvinna vil –fyri uttan tað mentanarliga virði og tann styrkta samleikan, sum filmirnir í sær sjálvum skapa-  skapa virðir út í øll trý hornini í trýhyrninginum.  Vinnan skapar arbeiðspláss, hon skapar áhuga fyri Føroyum sum land og ger tað lokkandi hjá einstaklingum og fyritøkum at seta seg niður her, og hon skapar netverk og førleikar, sum styrkja tann sosiala kapitalin.

Hetta eru týdningarmikil kappingarparametur í eini tíð, tá Føroyar sum samfelag kappast við umheimin um arbeiðsmegi, eisini um ta væl útbúnu føroysku arbeiðsmegina, ið býr og virkar í londunum uttan um okkum.

### 5.4 Filmsundirvísing og týdningur hennara fyri menning av filmsvinnu

Hyggja vit eftir, hvat tað er, sum hevur sett tær væl eydnaðu regionalu film satsingarnar í gongd í t.d. Svøríki, so sæst at byrjanin var, at eitt gott undirvísingartilboð varð sett á stovn.  Film i Väst í Trollhättan er eitt dømi um hetta.  Film i Väst byrjaði sum ein miðlaverkstaður í býnum Alingsås í 1991 og mentist til at gerast ein tann størsti filmsvinnudepilin í Svøríki, har fleiri stórir svenskir, danskir og altjóða filmar eru framleiddir, m.a. *Dancer in the Dark*, Dogville og *Manderlay* hjá Lars von Trier.  Filmpool Nord í Norðursvøríki byrjaði eisini sum tilfeingisdepil, sum veitti útgerð og vegleiðing til áhugaðar filmarar á staðnum.

Tað er gjøgnum undirvísing og útbúgvingartilboð, at hugurin hjá ungum talentum verður vaktur og støðið verður lagt til eina møguliga yrkisleið innan filmsvinnuna. Og tað er í einum undirvísingar- og útbúgvingarumhvørvi at hugskotini til verkætlanir og fyritøkur ofta verða kveikt.

### 5.5 Føroyar sum filmsvinnuland: Styrkir og veikleikar, møguleikar og forðingar.

Tá lunnar skulu leggjast undir eina filmsvinnu í Føroyum er neyðugt at kortleggja hvørjir fyrimunir og vansar eru í útgangsstøðinum og hvørjir møguleikar og hvørjar hóttanir liggja fyri framman.

**Styrkir hjá Føroyum sum komandi filmsvinnuland:**
Samfelagið er lítið og liðiligt og tað er stuttur vegur er til tey, ið taka avgerðir. Vit hava eitt serstakt náttúruumhvørvi, sum er lætt og skjótt at koma til. Vit hav nærleika til Stórabretlands og Skandinavia. Í Føroyum er lætt at finna og engasjera eldsálir innan nógv ymisk øki. Tónleikaumhvørvið og kreativ vinna sum heild eru í stórari menning. Í Føroyum er eitt sterkt og aktivt føroyskt mentanarlív.

**Veikleikar:**
Her eru fá fólk við yrkisútbúgving innan filmsvinnuna. Einki undirstøðukervi er til filmsvinnuna og eingir karmar, t.d. filmstudio og útgerðarmiðstøðir, sum filmsframleiðarar kunnu leiga høli og útgerð frá. Veðurlagið er óstøðugt og tað ávirkar møguleikarnar fyri uttandura upptøkum. Flogferðslusambandið við umheimin er avmarkað og til tíðir óstøðugt.

**Møguleikar:**
Til ber at menna førleikar innan vinnuna við egnum útbúgvingum og byggja upp undirstøðukervi og egna framleiðslu. At fáa útlendskar framleiðarar til Føroya við at veita teimum fyrimunir (t.d. stuðul ella skattafyrimunir). Fáa útlendskar framleiðarar at nýta føroysku náttúruna í sum location. Skapa virksemi innan tónleikafilmar í kjalarvørrinum á altjóða framgongdini hjá føroyskum tónleikarum. Samstarv við íslendsku filmsvinnuna um t.d. altjóða marknaðarføring. Marknaðarføring av Føroyum gjøgnum filmar, sum eru framleiddir her. Føroyar sum ein karmur um og kelda til søgur er ódyrkað land í norðurlendskum filmshøpi, og tí kann í nøkur ár vekjast áhugi fyri samstarvi við norðurlendskar films- og sjónvarpsframleiðarar.

**Hóttanir:**
Vinnan dettur niðurfyri orsakað av vantandi førleikamenning (útbúgvingartilboð v.m.). Kapping við Ísland kann føra til , at marknaðarføringin av Føroyum verður ósjónlig í mun sterka brand'ið, sum Ísland hevur í altjóða filmsvinnuni. Vinnan fellur niðurfyri orsakað av vantandi vinnu- og mentanarpoliskum vilja til aktivan filmsvinnupolitikk.

Ein føroysk filmsvinnustrategi má byggja á styrkirnar, bøta um veikleikarnar, gera nýtslu av møguleikunum og leggja upp fyri hóttanunum.

### 5.6 Strategiskir møguleikar fyri menning av føroyskari filmsvinnu

#### 5.6.1 Menningarmøguleikar: Útbúgving og framleiðsla.

Fyri at fáa gongd á eina føroyska filmsvinnu er týdningarmikið at skapa eitt føroyskt útbúgvingar- og talentmenningartilboð.

Her eigur at verða byrjað við einum miðlaverkstaði í Havn, har virksemið millum ung filmsáhugað og áhugafilmsframleiðarar í løtuni er størst. Her hevur Tórshavnar Kommuna sett skjøtil á við at at

veita studning til miðlaverkstaðin Klippfisk, sum nú er farin undir at bjóða undirvísing og vegleiðing til ung og til borgarar, ið ynskja at læra at gera film. Ynskiligt hevði verið at Mentamálaráðið fylgir hesum stiginum upp, so virksemið kann víðkast til at umfata alt landið og verkstaðurin kann víðka virksemi sítt til eisini at veita fólkaskúlunum, vinnu- og miðnámsskúlunum undirvísing og tænastur. Verkstaðurin skal eisini á inntøkufíggjaðum grundarlagi veita vinnuni tænastur.

Innan eitt ikki alt ov langt áramál, t.d. 5 ár, eigur landið at stovna eitt alment partafelag, sum rekur filmsvirksemi, byggir og rekur eitt filmstudio, framleiðir filmar, kann fíggja samstarv millum føroyskar og útlendskar filmsframleiðarar og er føroyski depilin fyri samstarv innan film, bæði innlendis og í mun til umheimin. Treytin fyri at veita einum útlendskum framleiðara fíggjarligan stuðul kann t.d. vera, at framleiðarin skal keypa vørur og tænastur í Føroyum fyri minst 1½ tað upphæddina, ið hann fær í fígging frá føroyska filmsfelagnum.

Á mentanarpolitiska økinum eigur ein filmsgrunnur at vera stovnaður, sum stuðlar framleiðslu av føroyskum filmum.

### 5.6.2 Útbygging av fiktión og dokumentari í sjónvarpinum.

Játtanin til Kringvarpið eigur at hækka við eini munandi upphædd, ið er oyramerkt til framleiðslu av føroyskari sjónvarpsfiktión. Umhugsað eigur eisini at vera at áleggja Kringvarpinum at leggja ein ávísan part av sjónvarpsframleiðsluni uttan fyri stovnin.

### 5.6.3 Netverk og møtistaðir.

Dentur eigur at verða lagdur at leggja lunnir at skapa netverk millum tey sum fáast við at skapa og framleiða film í Føroyum og eitt umhvørvi, har hesi kunnu hittast, samstarva og samskifta um felags áhugamál. Miðlaverkstaðurin eigur tí at útbyggja virksemi sítt, soleiðis at tað javnan verða fyriskipaðar filmsfyrivísanir av góðum útlendskum filmum, sum ikki verða vístir í vinnurekandi biografunum, og av teimum filmum, sum verða framleiddir í Føroyum. Um farið verður undir vinnuligar útbúgvingar innan filmsøkið er náturligt at knýta ein minni biograf at einum filmsskúla.

Sum partur av altjóða marknaðarføringini eigur eisini at verða miðað ímóti at skapa ein føroyskan altjóða filmsfestival, sum eina ferð um árið kann fáa altjóða ella norðurlendsku filmsvinnuna at venda eygunum hendan vegin. Ein slíkur festivalur eigur at verða miðsavnaður um tær filmsgreinir, har føroysk filmsframleiðsla kann gera seg galdandi í dygd, t.d. stuttfilmar ella dokumentarfilmar.

Konseptið við fleirtjóða filmsummarskúlum við skeiðstilboðum á høgum fakligum støði eigur eisini framhaldandi at verða ment, møguliga við tí langsiktaða málinum at stovna ein altjóða filmsháskúla/skeiðsdepil í Føroyum.

### 5.6.4 Tónleikavinnan og videoframleiðsla.

Í tann mun føroysk tónleikanøvn sláa ígjøgnum á altjóða pallinum er møguleiki hjá eini føroyskari filmsvinna at halda seg framat at framleiða tær visuellu framleiðslurnar, sum eitt altjóða tónleikanavn noyðist at geva út sum part av marknaðarførslu síni.

### 5.6.5 Reklamuvinnan.

Reklamuvinnan er í londunum uttan um okkum ofta vinnuligi grundarsteinurin undir filmsvinnuni. Tað er her talentini sleppa at gera sínar fyrstu professionellu royndir við smáum framleiðslum. Í Føroyum er hendan vinnan í stóran mun avmarkað av, at marknaðurin er óneyðuga avmarkaður og

stirvin, tí miðlapolitikkurin er soleiðis skipaður, at pláss er bara á marknaðinum fyri sjónvarpinum hjá Kringvarpinum.

Tørvur er á einum alternativi til almenna sjónvarpið fyri at skapa kapping og fakliga menning. Tað, at almenna Kringvarpið sendir sjónvarpslýsingar, forðar fyri, at til ber at skapa lønandi handilsligt sjónvarp uttan fyri Kringvarpið. Ein dagur eigur at verið ásettur, tá lýsingarnar verða avtiknar í almenna sjónvarpinum, og almennur stuðul givin Kringvarpinum í staðin. Hetta vil skapa ein marknað, har tað kann løna seg at seta á stovn eina sjónvarpsstøð á handilsligum grundarlagi. Harvið kann skapast eitt framleiðsluumhvørvi uttan fyri almenna Kringvarpið, og kappingin, sum kann standast av hesum, er neyðug fyri at menna films- og sjónvarpsvinnuna sum heild.

### 5.6.6 Samstarv við íslendska filmsvinnu.

Ísland hevur ment sína sølu av landinum sum location stað í nógv ár. Sum eina byrjan til tess at koma á filmsmarknaðin kann tað tí vera skilagott at fara inn í eitt samstarv við íslendsk feløg og myndugleikar, soleiðis at locations í Føroyum gerast ein víðkan av tí pakkanum, sum íslendingar bjóða út.

Hetta vil vera ein fyrimunur fyri Føroyar, tí Ísland er sera kent í altjóða filmsvinnuni og íslendska altjóða filmsskrivstovan hevur eitt stórt netverk innan altjóða filmsídnaðin, ikki minst tann í Hollywood, sum seinastu árini hevur lagt stórar og dýrar framleiðslur í Íslandi. Tað er eisini ein kendur lutur, at næstan allar tær stóru bilaverksmiðjurnar framleiða lýsingarfilmar í Íslandi, tá nýggj harðfør bilsnið skulu vísast fram í ymiskum veðri og landsløgum.

### 5.6.7 Samstarv við Norðurlond annars.

Í Norðurlondum eru filmsgrunnar, sum fíggja samframleiðslur millum norðurlond, eitt nú Nordisk Film og TV-fond. Felags fyri norðurlendskar –og fyri tað eisini evropeiskar og altjóða filmsgrunnar – er tó, at øll luttakandi lond gjalda inn í grunnarnar, og at filmsverkætlanirnar, ið søkja stuðul úr grunninum, mugu hava egna fígging í rygginum, áðrenn søkt verður.

Tað sama er galdandi fyri samframleiðslur millum einstøk norðurlond. Ísland sum dømi sýnir tó, at eitt lítið land kann samstarva nógvar vegir, og íslendskir filmsframleiðarar megna ofta at fáa upp til 70% av filmum sínum fíggjaðar við útlendskum kapitali. Men fyritreytin er altíð, at íslendski peningurin er til staðar frá byrjan av, og at framleiðslu- og undirstøðukervið eru til staðar í Íslandi.

Um føroyingar gerast aktivir filmsframleiðarar, ið sjálvir hava fígging í rygginum, og sjálvir hava førleikarnar og karmarnar til at framleiða filmarnar, eru sostatt fleiri norðurlendsk samstørv, sum til ber at fara inní, og sum kunnu menna føroyska filmsvinnu bæði fakliga og fíggjarliga. Eins og tann peningur, sum føroyskir myndugleikar seta í verkætlanir sum stuðul, kann koma fleirfaldaður aftur til vinnuna og harvið samfelagið.

### 5.6.8 Fígging

Tað slepst ikki uttan um, at filmsvinna kostar. Komandi 3 árini er neyðugt at brúka umleið 0,5-1 millión kr. árliga at byggja upp ein miðlaverkstað.

Harumframt eigur at vera bygt eitt eitt nútíðar filmsupptøkuhøli, sum er leyst av almenna sjónvarpinum og verður rikið av einum sjálvsognarstovni ella sjálvstøðugum almennum partafelag. Umframt at reka filmsupptøkuhølið skal felagið taka stig til framleiðslur av filmum og veita tænastur til filmsframleiðarar, bæði privatar og almennar. Tað almenna fíggjar íløgurnar, sum

mugu verða einar 25-30 milliónir krónur, men raksturin skal hvíla í sær sjálvum. Felagið skal seta í gongd egnar framleiðslur og skjóta fígging inn í filmsframleiðslur, sum kunnu draga útlendskar filmframleiðslur til Føroya og skapa Føroyum gott PR uttanlands.

### 5.7 Ein visión fyri menning av eini føroyskari filmsvinnu.

Tann menningin, ið er farin fram í Íslandi og fleiri norðurlendskum regiónum, vísir, at landafrøðilig stødd er eingin forðing fyri at seta sær mál fyri menning av filmsvinnu og at gjøgnumføra tey.

Tað er eingin ivi um, at menningin av eini føroyskari filmsvinnu hevur stóran mentanarligan týdning við tað, at filmurin sum søgufrásigandi miðil styrkir mentanarliga samleikan bæði úteftir og inneftir. Vit ávirkast av og taka til okkum filmssøgur, sum siga frá og tulka okkara egna veruleika, og vit kenna stóran stoltleika av okkum sjálvum, landi og mentan okkara, tá filmar, sum eru framleiddir her av føroyingum ella øðrum, bera føroyskar søgur, føroyska mentan og føroyskt umhvørvi og landslag út til stórar hyggjaraskarar uttan fyri Føroyar.

Ein visión er ein orðing av, hvussu ein ynskir at framtíðin skal síggja út. Visiónin er samandrátturin av teimum langtíðar og stutttíðar málum, ið ein setir sær.

Visiónin fyri hjá hesum høvundanum fyri føroyskari filmsvinnu um 10 ár er hendan:

Føroyska filmsvinnan í 2018 er ein dynamisk og livandi vinna, ið hevur bæði filmslistarfólk, filmsvinnufyriskiparar og filmstøkningar í starvi. Hon er bygd kring eitt alment partafelag, ið rekur filmstudio og framleiðir filmar í samstarvi við føroyskar og útlendskar framleiðarar og fyritøkur. Íløgurnar í hesum partafelag eru fíggjaðar av tí almenna, men raksturin hvílur í sær sjálvum. Vinnan stendur á trimum beinum: eitt er tann peningur sum gjøgnum mentanarpolitikkin er settur av til at framleiða føroyskar filmar, annað er tað ískoytið sum samframleiðslur við útlendskar, serliga norðurlendskar, framleiðarar gevur til framleiðsluna av filmunum og triðja og avgerandi beinið er tær tænasturnar, ið føroyska filmsvinnan selur á altjóða filmsmarknaðinum og til útlendskar filmsframleiðarar, ið velja at leggja ein part av virksemi sínum í Føroyum. Menningin í vinnuni verður tryggjað við einum støðugum útboði av hóskandi útbúgvingum, einum aktivum og framtakshugaðum mentanarpolitikki og einum vinnupolitikki, sum ger tað lokkandi hjá útlendskum filmsframleiðarum at nýta Føroyar sum upptøkuland og hjá fyritøkum yvirhøvur at seta pening í filmsvinnuna. Í miðal verður ein føroyskur spælifilmur í fullari longd framleiddur um árið, eins og tað verða framleiddir fleiri stuttfilmar, novellufilmar og sjónvarpsfilmar og –røðir á hvørjum ári. Útlendskir lýsingarfilmar og partar av útlendskum spælifilmum og sjónvarpsrøðum verða regluliga framleidd her.

Hetta kann ljóða óveruligt og ósannlíkt, sjálvt sæð í einum 10 ára útliti. Men í grundini er hetta bara ein avmynding av íslendsku filmsvinnuni í dag, førd yvir á føroyskan mátistokk. So tað er ikki ógjørligt í einum lítlum samfelag at skapa eina virkna og kappingarføra filmsvinnu, um viljin er til staðar hjá øllum pørtum.

## 6. Samanumtøka og tilmæli.

Møguleikarnir fyri at skapa eina filmsvinnu í Føroyum liggja fyrst og fremst í at menna førleikarnar at framleiða film og video, bæði hvat viðvíkur fyrireiking, framleiðslufyriskipan, leikstjórn, handritagerð, upptøkum og eftirarbeiði (klipping, ljóðeftirarbeiði, tónleikur o.s.fr.).

Sum tøknin er háttað og soleiðis, sum samskiftið fer fram og mennist, so fer tað at bera til hjá eini føroyskari filmsvinnu at bjóða tænastur sínar fram til útlendskar framleiðarar. Fyritreytin er, at førleikarnir og framleiðslukervið eru til staðar.

Fyri at skapa hesar fyritreytirnar er neyðugt at:

1) menna talentini og útbúgva tey
2) menna heimliga marknaðin, so grundarlag verður fyri fleiri framleiðslufeløgum
3) skapa karmar, so hesi feløg kunnu bjóða seg fram á marknaðum uttan fyri Føroyar og so tað er áhugavert hjá útlendskum framleiðslufeløgum at keypa tænastur í Føroyum.

Mælt verður til at:

- Skipaður verður ein almennur ella alment fíggjaður filmsdepil, sum:
  - Rekur miðlaverkstað, ið stuðlar skúlum við vitan, vegleiðing og útgerð til undirvísing í videoframleiðslu
  - Heldur skeið fyri skúlalærarum o.ø. í videoframleiðslu
  - Skipar fyri førleikamennandi skeiðum fyri framleiðslufeløg og almenna sjónvarpið
  - Stuðlar og eggjar borgarum – ungum sum eldri-, ið vilja royna at gera egnar filmar
  - Skipar fyri miðvísum skeiðvirksemi fyri ung og áhugafilmsskaparar sum heild
  - Umboðar føroyska filmsvinnu úteftir
  - Kann taka stig til og samskipa framleiðslu av føroyskum stuttfilmum og spælifilmum
  - Kann taka stig til at fáa útlendsk framleiðslufeløg at leggja framleiðslur í Føroyum
  - Rekur eitt væl útgjørt filmstudio, har privatir og almennir filmsframleiðarar kunnu leiga seg inn.
  - Veitir fulla ella lutvísa fígging til framleiðslur, sum verða framdar í Føroyum, bæði føroy skar og útlendskar.

- Lýsingarnar í almennu loftmiðlunum verða avtiknar innan fyri eitt ár, so pláss fyri verður fyri privatum loftmiðlum.
- Beinleiðis almenni stuðulin til Kringvarpið verður øktur, og ein triðingur av samlaðu inntøkum Kringvarpsins oyramerktur til at keypa sjónvarpssendingar uttan fyri stovnin.
- Ein grunnur verður stovnaður at stuðla framleiðslu av føroyskari fiktión á filmi. Allir framleiðarar skulu kunnu søkja úr hesum grunni.
- Framleiðsla av føroyskari fiktión verður gjørd til eina skyldu í komandi mál- og rammustýringarsáttmálum millum tað almenna og Kringvarpið
- Stuðulin til yrkisleiklist verður øktur, so hópurin av yrkisleikarum, sum eru virknir í Føroyum kann gerast breiðari
- Skattalætti ella stuðul (t.d. eftir íslendskari fyrimynd, har útlendsk framleiðslufeløg fáa 14% av tí peningi, ið tey brúka til vørur og tænastur í Íslandi, endurgoldin frá statinum) verður latin útlendskum filmsfeløgum, ið framleiða filmar ella partar av filmum í Føroyum.

- At stuðlað verður upp undir at fáa eitt afturvendandi norðurlendskt ella altjóða filmstiltak í Føroyum, t.d. eitt skeið og/ella ein festival av høgari góðsku, sum setir Føroyar á kortið hjá filmsvinnuni í londunum uttan um okkum, og sum gevur føroyingum høvi at skapa sær persónlig netverk við virkin fólk í filmsvinnuni uttan fyri Føroyar.

Niðurstøðan er, at átrokandi stigini, ið mugu takast eru:

1) At skipa førleika- og talentmenning gjøgnum undirvísingartilboð og skeiðvirksemi. Hetta eigur at verða gjørt við at stuðla verandi miðlaverkstaðnum í Havn, soleiðis at hann kann víðka sítt tilboð til alt landið, til skúlaskipanina og til vinnuna. Somuleiðis eigur miðlaverkstaðurin sum skjótast at kunna víðka virksemi sítt til netverksskapandi virksemi, s.s. filmsfyrivísingar v.m.

2) At skapa ein víðkaðan og meira dynamiskan heimamarknað fyri videoframleiðslu við at fíggja almenna kringvarpið við stuðli burturav og lata lýsingarinntøkurnar vera grundarlag undir einari ella fleiri handilsligum sjónvarpsstøðum.

3) At skipa ein føroyskan filmsgrunn at veita fígging til framleiðslu av føroyskum filmum. Allir filmsframleiðarar eiga at kunna søkja studning til verkætlanir úr grunninum. Treytir eiga at vera settar til eginfígging. Grunnurin eigur frá byrjan at fáa eina játtan upp á minst 1 millión krónur um árið.

# Keldulisti:


Bayliss, Darrin (2004): "Ireland's Creative Development: Local Authority Strategies for Culture-led development." *Regional Studies, vol 38, no 7*, s. 817-831.

DCMS, Department for Culture, Media and Sports (2007): *Creative Economy*. http://www.culture.gov.uk/what_we_do/Creative_industries/

Dahlström, Margareta, Bjarnadóttir, Hólmfriður, Hermelin, Brita, Jørgensen, John, Lahteenmäki-Smith, Kaisa, Rusten, Greta, Skúladóttir, Marta G. og Wengström, Elisabeht (2005): *Film och regional utveckling i Norden.* Svenska Filminstitutet og Nordregio.

Dahlström, Margareta, Hermelin, Brita og Östberg, Sara (2007): *Regionaliserad filmproduktion i ett filmarbetarperspektiv.* Kulturgeografisk Seminarium 1/2007. Rapporter från Kulturgeografiska Institutionen, Stockholms Universitet.

European Audiovisual Observatory (2007): http://www.obs.coe.int/about/oea/org/index.html

Filmfestivalen i Haugesund (2006): http://www.filmweb.no/filmfestivalen2006/

Film in Iceland: *Film in Iceland – 14% of Costs is Refundable.* Reykjavík.

Film i Väst (2007): Heimasíða. www.filmivast.se

Film i Väst (2007a): www.filmservice.se (Kunningarsíða um størv og útbúgving innan filmsvinnuna í Svøríki.)

Filmpool Nord (2007): Heimasíða. www.fpn.se

Filmpool Nord (2002*): En filmregion skapas. Fragment ur en 10-årig historia.* 10 ára minningarrit.

Florida, Richard (2002): *The Rise of the Creative Class: And How It's Transforming Work, Leisure, Community and Everyday Life*.

Florida, Richard (2007): *CreativeClass.org Home of the Richard Florida Creativity Group*. http://creativeclass.org/ .

Göteborg International Film Festival: http://www.filmfestival.org/

Icelandic Film Centre (2006): *Icelandic Feature Films in 2005*. IFC: Reykjavík.

Icelandic Film Centre (2007): http://filminiceland.com

Icelandic Film Centre (2007a): *Icelandic Feature Films in 2006*. IFC: Reykjavík.

Johansson, Staffan (2004): *Filmindustrin i Norrbotten. Framväxt, nuläge och ekonomisk betydelse.* Centrum för Utbildning och Forskning inom Samhällsvetenskap, CUFS, Luleå Tekniska Universitet.

Jørgensen, John (2005): "Den danske filmbranche og regionale filmfonde". Úr: Dahlström, Margareta, Hermelin, Brita og Östberg, Sara (2007): *Regionaliserad filmproduktion i ett filmarbetarperspektiv.* Kulturgeografisk Seminarium 1/2007. Rapporter från Kulturgeografiska Institutionen, Stockholms Universitet. S. 82-108.

Lange, E og Westcott, T (2004): *Public Funding for Films and Audiovisual Works in Europe – A Comparative Approach*. Strasbourg: The European Audiovisual Observatory.

Leadbeater, C. (1999): *Living on Thin Air. The New Economy*. London: Penguin.

Marcussen, Ann, og King, David (2003): *The Artistic Dividend: The Arts' Hidden Contribution to Regional Development*. Humphrey Institute of Public Affairs, University of Minnesota.

Norsk Filminstitutt (2007): http://www.nfi.no/

Paasi, Anssi (2003): "Region and place: regional identity in question". *Progress in Human Geography, Volume 27, Number 4*, August 2003, pp. 475-485

Porter, Michael E. (2000): "Location, Competition, and Economic Development: Local Clusters in a Global Economy". *Economic Development Quarterly, Vol. 14, No. 1, 15-34*

Porter, Michael E. (2003): "The Economic Performance of Regions." *Regional Studies, Volume 37, Numbers 6-7* / August-October 2003. S. 545-578.

Putnam, Robert, Leonardi, Robert and Nanetti, Rafaella Y. (1993): *Making Democracy Work: Civic Traditions in Modern Italy*.

Rusten, Grete (2005): "Film og regional utvikling i Norge". Úr: Dahlström, Margareta, Bjarnadóttir, Hólmfriður, Hermelin, Brita, Jørgensen, John, Lahteenmäki-Smith, Kaisa, Rusten, Greta, Skúladóttir, Marta G. og Wengström, Elisabeht (2005): *Film och regional utveckling i Norden.* Svenska Filminstitutet og Nordregio. S. 144-177.

Skúladóttir, Marta G (2005): "Iceland – A National Player in a Global Market". Úr: Dahlström, Margareta, Bjarnadóttir, Hólmfriður, Hermelin, Brita, Jørgensen, John, Lahteenmäki-Smith, Kaisa, Rusten, Greta, Skúladóttir, Marta G. og Wengström, Elisabeht (2005): *Film och regional utveckling i Norden.* Svenska Filminstitutet og Nordregio. S. 178-193.

Stern, Per, Svensson, Martin og Toll, Bengt (2003): *Film, TV och Moderna Medier i Västra Götaland*. Film i Väst. www.filmivast.se .

Sveriges Television (2006): *SVT 2005. Med årsredovisning.* Stockholm: SVT .

The Irish Film Board (2006): *Ireland. The Film Location.* Galway: The Irish Film Board.

The Irish Film Board (2007): Heimasíða: http://www.theirishfilmboard.ie/financing.php?id=5

Västra Götalandsregionen (2005): *Vision Västra Götaland – Det goda livet*. http://www.vgregion.se .